Býráðsfundur

Fundarinnkalling

Dato: 19. november 2026 **Kl**. 16:00
Stað: Býráðssalurin

Innihaldsyvirlit **Síða**

Til viðgerðar

292/26	26/00448-1	Mál beind í nevndir 2026	3
293/26	25/00258-1	Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt	5
294/26	25/10051-1	Karlamagnussarbreyt, asfaltering, parkering o.a.	6
295/26	26/04733-1	Vegaatkoma - atkomuviðurskifti til 72A og 72B við Marknagilsvegin - Vegur 4 og 5 á matr. nr. 1216a, Tórshavn - 24/00711	8
296/26	26/00463-1	Ábøtur á veganetið í og kring býlingin við Myllutjørn - 23/01129	10
297/26	26/04948-1	Fíggjarætlan 2027, Tórshavnar kommuna	11
298/26	26/08169-1	Eykajáttan av meirinntøkum 2026	23
299/26	26/07503-1	Dagføring av játtanarreglum	27
300/26	26/07063-8	Umbøn um eykajáttan til konto 3212 "Tímar vegna serligan tørv"	31
301/26	26/07552-3	Flyta sosialu deild í leiga hølir Yviri við Strond	34
302/26	25/08465-1	Sethúsaútstykking í Kirkjubø - 24/01748	38
303/26	26/08162-1	Vegatkoma til útstykking í Innibø, Kollafjørður	43
304/26	25/03667-1	Trivnaðarøki í Kollafirði	47
305/26	26/04091-1	Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 5.2	54
306/26	26/04092-1	Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 6.0	57
307/26	26/04093-1	Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 7	60
308/26	25/00954-1	Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið	63

309/26	26/06144-2	Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Kvíggjartún	74
310/26	25/02905-4	Dagføring av sertstøku byggisamtyktini fyri Argjaboða, matr. nr. 43g og 43h, Argir	77
311/26	25/01100-7	Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590	81
312/26	26/04326-4	Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr. nr. 1378 og 1235a, Tórshavn	96
313/26	25/00365-12	Keyp av lonunum í Hoydølum	99
314/26	26/08111-3	Fyrispurningur um møguliga víðarisølu av grundstykki – matr. nr. 135nn á Karlamagnusarbreyt 52, Hoyvík	102
315/26	26/08216-2	Matr.nr. 255bn, Kirkjubøur,Argir.	104
316/26	26/08200-2	Avrikssáttmáli við Visit Tórshavn 2027-2028	106
317/26	26/08426-1	Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2027 til 2030	108
318/26	26/00100-1	Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026	109
319/26	25/00154-2	Nýggj skatepark í Gundadali - 23/05071	113
320/26	25/06061-1	Eldradepil í Kollafirði	115

Til viðgerðar

292/26 Mál beind í nevndir 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Býráðsfundur	29.01.2026	3/26	26/00448-1
2 Býráðsfundur	26.02.2026	26/26	26/00448-1
3 Býráðsfundur	19.03.2026	73/26	26/00448-1
4 Býráðsfundur	30.04.2026	104/26	26/00448-1
5 Býráðsfundur	04.06.2026	174/26	26/00448-1
6 Býráðsfundur	18.06.2026	203/26	26/00448-1
7 Býráðsfundur	17.09.2026	240/26	26/00448-1
8 Býráðsfundur	22.10.2026	270/26	26/00448-1
9 Býráðsfundur	19.11.2026	292/26	26/00448-1

Upprunin til málið

Lýsing av málinum

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				

Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:

Býráðsfundur 29. januar 2026: Tikið til eftirtektar.

Býráðsfundur 26. februar 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 19. mars 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 04. juni 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 18. juni 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 17. september 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Framlagt.

293/26 Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Tekniska nevnd	02.11.2026	101/26	25/00258-1
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	212/26	25/00258-1
3 Býráðsfundur	19.11.2026	293/26	25/00258-1

Upprunin til málið
Bygging á Karlamagnusarbreyt er komin væl ávegis, og eru flestu økini bygd, ella er bygging í gongd. Sum økið við Karlamagnusarbreyt nærkast at verða liðugt, vísir tað seg, at nógvar avbjóðingar eru í økinum. Økið er sera tætt bygt, og er týdningarmikið at tær ymisku avbjóðingarnar verða loystar í einari heildarætlan.

Tí var avgjørt, at umsitingin fór undir eina tilgongd saman við borgarunum og áhugaðum í økinum fyri at gera eina tillagaða heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt.

Lýsing av málinum
Nú omanfyri nevnda tilgongd er liðug og arbeiðið er avgreitt, skal málið við hesum lokast.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
8175	L81047	Heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt	8175	LK81999	Vegaverkætlanir		373.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At flyta avlopið á kr. 373.00 av 8175, L81047, Heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt inn á Løgukarmin 8175, LK81999, Vegaverkætlanir.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Tekniska nevnd 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

294/26 Karlamagnussarbreyt, asfaltering, parkering o.a.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	231/26	25/10051-1
2 Tekniska nevnd	02.11.2026	103/26	25/10051-1
3 Fíggjarnevndin	11.11.2026	213/26	25/10051-1
4 Býráðsfundur	19.11.2026	294/26	25/10051-1

Upprunin til málið
Til liðuggerð av manglum á Karlamagnussarbreyt – asfaltering, parkering o.a. hevur ein verkætlan verið stovnað.

Lýsing av málinum
Omanfyri nevnda arbeiðið er nú liðugt, verkætlanin kann tískil lokast og verður í tí sambandi løgd fyri teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

Verkætlanin, L64015, *Karlamagnussarbreyt – asfaltering, parkering o.a.* undir kontu 6475, *Byggibúning bústaðir (íløgur)*, hevur eitt trot á kr. 646.000. Hetta verður goldið av kontu 8175, *Vegaverkætlanir* – løgukarmur, LK81999 *Vegaverkætlanir*.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☒

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
8175	LK81999	Vegaverkætlan, karmur

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
6475	L64015	Karlamagnussarbreyt, asfaltering, parkering o.a.	

Upphædd
646.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At verkætlanin L64015, Karlamagnussarbreyt, asfaltering, parkering o.a. verður lokað.
- At hallið á kr. 646.000 verður fíggjað av Løgukarmi LK81999, Vegaverkætlanir, undir konto 8175 Vegir (íløgur).
- At beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tekniska nevnd 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

295/26 Vegaatkoma - atkomuviðurskifti til 72A og 72B við Marknagilsvegin - Vegur 4 og 5 á matr. nr. 1216a, Tórshavn - 24/00711

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Tekniska nevnd	02.11.2026	104/26	26/04733-1
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	215/26	26/04733-1
3 Býráðsfundur	19.11.2026	295/26	26/04733-1

Ískoyti
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 24/00711-1 Vegaatkoma til 72A og 72B við Marknagilsvegin - Vegur 4 og 5 á matr. nr. 1216a, ið er lagt við sum fylgiskjal.

Upprunin til málið
Avtala er gjørd millum Tórshavnar kommunu og ánaran av matr.nr. 1216a, um m.a. at kommunan skal gera veg frá privata útstykkingarvegnum og oman til ognirnar Marknagilsvegur 72A og 72B, soleiðis at atkoman til ognirnar verður flutt burtur frá Marknagilsvegnum.

Lýsing av málinum
Arbeiðið er nú liðugt, við einum troti uppá 60.000 kr.
Trotið kemst av, at gøtuljósini blivu broytt frá tí, sum tilboð varð givið uppá, til tað, sum ljósætlanin hjá TK leggur upp til, og tað er at brúka PH lampur.

Skjøl
24/00711-1 Vegaatkoma til 72A og 72B við Marknagilsvegin - Vegur 4 og 5 á matr. nr. 1216a

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
8175	LK81999	Vegaverkætlanir, karmur	8175	L81056	Vegaatkoma til 72A og 7B Marknagilsvegur		60.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At verkætlan L81056, Vegaatkoma til 72A og 7B Marknagilsvegur verður lokað.
- At hallið á kr. 60.000 verður fíggjað av Løgukarmi LK81999, Vegaverkætlanir, undir konto 8175, Vegir (íløgur).
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Tekniska nevnd 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

296/26 Ábøtur á veganetið í og kring býlingin við Myllutjørn - 23/01129

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Tekniska nevnd	02.11.2026	102/26	26/00463-1
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	214/26	26/00463-1
3 Býráðsfundur	19.11.2026	296/26	26/00463-1

Ískoyti
Málið er upprunaliga lýst í jnr. 23/01129-1, Ábøtur á veganetið í og kring býlingin við Myllutjørn, ið er lagt við sum fylgiskjal.

Borgarar á Myllutjørn gjørdu vart við fleiri manglar í býlinginum. Hesir umfataðu asfaltering, gøtur, vegamerking, ferðslutrygd (spegl og skeltir) og liðguggerð av skráum o.l. Til at gera hetta arbeiðið varð stovnað verkætlan L81049, Dagføring av Myllutjørn, undir kontu 8175, Vegaverkætlanir.

Omanfyri nevnda arbeiðið er nú liðugt, málið kann tí lokast, og verður tískil lagt fyri teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

Verkætlanin, stovnsnummar 8175, L81049, *Dagføring av Myllutjørn*, hevur eitt trot upp á kr. 49.000. Hetta verður goldið av stovnsnummar 8175, *Vegaverkætlanir – karmur*, LK81999.

Skjøl
jnr. 23/01129-1, Ábøtur á veganetið í og kring býlingin við Myllutjørn

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
8175	LK81999	Vegaverkætlanir, karmur

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
8175	L81049	Dagføring av Myllutjørn	

Upphædd
49.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At verkætlan L81049, Dagføring av Myllutjørn, verður lokað.
- At hallið á kr. 49.000 verður fíggjað av Løgukarmi LK81999, Vegaverkætlanir, undir konto 8175, Vegir (íløgur).
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Tekniska nevnd 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

297/26 Fíggjarætlan 2027, Tórshavnar kommuna

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	18.06.2026	162/26	26/04948-1
10 Tilbúgvingarnevndin	30.09.2026	5/26	26/04948-1
11 Trivnaðarnevndin	01.10.2026	41/26	26/04948-1
12 Heilsu- og eldranevndin	01.10.2026	23/26	26/04948-1
13 Fíggjarnevndin	07.10.2026	193/26	26/04948-1
14 Býráðsfundur	22.10.2026	288/26	26/04948-1
15 Tekniska nevnd	05.10.2026	97/26	26/04948-1
16 Fíggjarnevndin	17.11.2026	239/26	26/04948-1
17 Býráðsfundur	19.11.2026	297/26	26/04948-1
2 Fíggjarnevndin	09.09.2026	187/26	26/04948-1
3 Býráðsfundur	17.09.2026	264/26	26/04948-1
4 Byggi- og býarskipanarnevndin	28.09.2026	199/26	26/04948-1
5 Tekniska nevnd	28.09.2026	94/26	26/04948-1
6 Vinnunevndin	28.09.2026	26/26	26/04948-1
7 Náttúru- og umhvørvisnevndin	28.09.2026	55/26	26/04948-1
8 Havnanevndin	29.09.2026	44/26	26/04948-1
9 Mentamálanevndin	30.09.2026	111/26	26/04948-1

Upprunin til málið
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðan viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hetta er ein sokallað teknisk framskriving av fíggjarætlanini 2026, sum er fyrsta stigið í sambandi við fyrireikingarnar og planleggingina av fíggjarætlanini 2027 hjá Tórshavnar Kommunu.

Lýsing av málinum
Tekniska framskrivingin av fíggjarætlanini 2026 er grundað á ta vitan og teir upplýsingar, ið eru tøkir í løtuni, og tekniska framskrivingin kann býtast upp í hesar tríggjar høvuðspartar:

1. Frakskriving av kommunuskattinum og skattinum av eftirlønargjøldunum.
2. Framskriving av rakstrarútreiðslunum.
3. Virksemisbroytingar eftir 1. desember 2025, tá fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt.

Ad. 1: Framskriving av kommunskattinum og skattinum av eftirlønargjøldum
Búskaparráðið metir í várfrágreiðing sínari, frá apríl 2025, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, fer at vaksa 3,3% í ársins prísum í 2027. Í játtanarkørmunum hjá landinum, eisini frá apríl í ár, verða landsskattainntøkurnar framskrivaðar við 7,9% í 2027.

Tað er rættiliga stórur munur á metta búskaparvøkstrinum hjá Búskaparráðnum í 2027 og metta vøkstrinum í landsskattinum hjá Fíggjarmálaráðnum í 2027. Hetta kemst m.a. av, at Búskaparráðið hevur gjørt nýggjar og væl hægri metinar av búskaparvøkstrinum í 2025 og 2026 í várfrágreiðingini 2026 í mun

til heystfrágreiðingina 2025. Í heyst metti Búskaparráðið vøksturin í BTÚ í leypandi prísum av verða 2,0%, meðan nýggja metingin í várfrágreiðingini sigur 5,8% í 2025.

Metingin og framskrivingin hjá Fíggjarmálaráðnum av landsskattinum eitt ár fram plagar at halda betri enn framskrivingin hjá Búskaparráðnum av BTÚ, sum er munandi truplari at framskriva samanborið við landsskattin.

Flestu greinarar kring heimin vísa á, at tað er óvanliga stór óvissa knýtt at øllum búskaparligum forsagnum í løtuni. Hetta kemst serliga av kríggi, hækkandi oljuprísum, inflatión og hækkandi rentum. ECB hevur nýliga hækkað rentuna 0,25% og fleiri rentuhækkingar eru væntandi.

Stóra óvissan leggur upp til varisligar metingar av inntøkunum hjá kommununi. Í fíggjarætlanaruppskotinum 2027 verður mett, at inntøkurnar fara at vaksa 5,5% samanborið við upprunaliga samtykta fíggjarlógaruppskotið 2026.

Hetta er við óbroyttum skattaprosentið á 19% og óbroyttum barnafrádrátti á 9.000 kr.

Skatturin av eftirlønargjøldum verður tó mettur at vaksa meira enn 7% í 2027 samanborið við upprunaliga fíggjarætlanina 2026, men frá 2027 og árini frameftir fer vøksturin í skattinum av eftirlønargjøldum at fylgja vøkstrinum í vanliga lønarskattinum. Hetta kemst av, at eftirlønarskattaprosentið nú er komið í eina fast legu.

Ad 2: Framskriving av rakstrarútreiðslum
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru býttar sundur í lønir og rakstrarútreiðslur annars. Tað eru bert lønarútreiðslurnar av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sum eru framskrivaðar í hesi fyrstu teknisku framskrivingini hjá kommununi. Lønirnar eru framskrivaðar við 4% frá FÆ-2026 til FÆ-2027. Hetta er grundað á væntaða vøksturin í sáttmálalønunum.

Ad. 3: Virksemisbroytingar
Virksemisbroytingarnar snúgva seg um lógarbroytingar og býráðssamtyktir eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt umframt avleiddar broytingar í rakstrinum frá avhendaðum íløgum. Samanlagt kosta virksemisbroytingarnar, eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 var samtykt, 45,5 mió. kr. Størstu virksemisbroytingarnar stava frá øktum virksemi undir greinunum børng & ung, undirvísing og almanna & heilsumál.

Mett úrslit av rakstrinum í 2027 eftir tekniskar framskrivingar
Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini av FÆ-2026, sum er fyrsta grundarlagið undir fíggjarætlanini 2027 vaksa inntøkurnar 5,48% og rakstrarútreiðslurnar 6,28%. Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini vaksa rakstrarútreiðslurnar sostatt meira enn mettu inntøkurnar. Tórshavnar Kommuna hevur vanliga sett sær sum innanhýsis mál, at rakstrarútreiðslurnar skulu vaksa minni enn mettu inntøkurnar.

Í hesi teknisku framskrivingini eru 281.726 t.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2027. Tá er Tórshavnar Havn tikin burtur úr framskrivingini.

Skjøl
-Tíðarætlan Fíggjarætlan 2027
-Teknisk framskriving av FÆ-2026

Tilmæli:
Kunnað verður um málið.

Fíggjarnevndin 18. juni 2026: Framlagt.

Ískoyti:
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2027 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 18. juni 2026. Eftir hetta hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2027.

1.000 kr.		Roknskapur 2025	Ætlan 2025	Ætlan 2026	Ætlan 2027	Broyting 2026/2027 pct.	Broyting 2026/2027 kr.
Inntøkur							
20501	Kommunuskattur	1.153.244	1.099.983	1.158.556	1.220.000	5,30%	61.444
20601	Felagsskattur	71.666	58.000	58.000	60.000	3,45%	2.000
20502	Húsaleiguskattur	1.268	1.000	2.000	2.000	0,0%	0
20801	Skattur af eftirlønarinngjøldum	248.847	231.376	265.000	285.000	7,5%	20.000
20802	DIS, FAS og frádráttir	35.322	35.322	34.000	34.000	0,0%	0
20804	Kommunanna partur av Veiðigjaldi	697	800	800	800	0,0%	0
20805	Kommunanna partur av Tøkugjaldi	294	200	200	200	0,0%	0
20806	Tænastugjald á tóm býli	0	0	2.900	4.200	44,8%	1.300
	Inntøkur íalt	**1.511.338**	**1.426.681**	**1.521.456**	**1.606.200**	**5,6%**	**84.744**
Rakstur							
§1	Kommunal fyrisiting	109.199	106.920	113.025	120.718	6,8%	7.692
§2	Almanna- og heilsumál	341.784	354.202	370.740	390.447	5,3%	19.707
§3	Børn og ung	273.243	256.354	276.077	289.786	5,0%	13.709
§4	Undirvísing	59.564	57.753	61.468	67.313	9,5%	5.845
§5	Mentan og frítíð	84.772	81.001	83.728	87.779	4,8%	4.051
§6	Teknisk mál	171.758	167.051	173.734	181.345	4,4%	7.611
§7	Kommunal virkir TK	102.855	102.084	104.921	110.309	5,1%	5.388
	Rakstur íalt uttan TH	**1.143.174**	**1.125.365**	**1.183.682**	**1.247.696**	**5,4%**	**64.014**
§7	Kommunal virkir TH	-48.266	-36.985	-37.975	-37.680	-0,8%	295
	Rakstur íalt	**1.094.908**	**1.088.380**	**1.145.707**	**1.210.016**	**5,6%**	**64.309**
Aðrar útreiðslur							
20101	Stuðul til rentuútreiðslur	33.650	30.000	30.000	30.000	0,0%	0
20910	Aðrar inntøkur	961	2.000	2.000	2.000	0,0%	0
	Aðrar útreiðslur íalt	**34.611**	**32.000**	**32.000**	**32.000**	**0,0%**	**0**
	Úrslit áðrenn rentur	**381.818**	**306.301**	**343.749**	**364.184**	**5,9%**	**20.435**
Rentur							
20301	Rentuútreiðslur TK	11.148	10.962	8.867	8.195	-7,6%	-672
20301	Rentuútreiðslur TH		5.037	7.250	7.808	7,7%	558
20401	Rentuinntøkur TK	0	0	0	0	0,0%	0
20401	Rentuinntøkur TH		0	0	0	0,0%	
	Rentur íalt	**11.148**	**15.999**	**16.117**	**16.003**	**-0,7%**	**-114**
	Úrslit av rakstri TK/TH	**370.670**	**290.303**	**327.632**	**348.181**	**6,3%**	**20.549**
	Avdráttir TK	**15.900**	**22.733**	**20.003**	**20.219**	1,1%	216
	Avdráttir TH	**14.484**	**15.874**	**15.873**	**20.672**	30,2%	4.799
	Úrslit av rakstri TK/TH	**340.286**	**251.696**	**291.756**	**307.290**	**5,3%**	**15.533**
	Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*	**306.504**	**235.622**	**276.904**	**298.090**	**7,7%**	**21.185**

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

Inntøkumeting
Inntøkumetingin er gjørd av nýggjum í september, men hetta hevur ikki broytt metingina frá fyrr í ár.

Kommunuskattur
Við støði í teimum upplýsingum og ta vitan, sum var tøk í september 2026, verður kommunuskatturin mettur at hækka 5,3 % frá 2026 til 2027. Kommunuskatturin hækkar sostatt úr 1.158.566 t.kr. í FÆ-2026 upp í 1.220.000 t.kr. í hesum uppskotinum.

Húsaleiguskattur
Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026, sum er tað sama sum í FÆ-2026.

Felagsskattur
Mett verður at felagsskatturin í 2027 verður 60 mió. kr. Inntøkurnar frá felagsskattinum hevur sveiggja frá ári til ár, í FÆ26 var mett at felagsskatturin var 58 mió. kr.

Skattur av eftirlønargjøldum
Skatturin av eftirlønargjøldum er mett at hækka úr 265.000 t.kr. upp í 285.000 t.kr., sum er ein hækking á 7,5 %.

Veiðugjald
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av veiðugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 800 t. kr. í veiðugjaldi.

Tøkugjald
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av tøkugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 200 t. kr. í tøkugjaldi.

DIS, FAS og frádráttir
Inntøkurnar á hesi kontuni verða mettar at verða tær somu, sum mett var í 2026, t.e. 34.000 t.kr.

Samlaðu inntøkurnar
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu 5,6% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2026.

Rakstrarútreiðlsur
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,6%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 5,6%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2026 til 2027. Hetta er fyrst og fremst orsakað av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá skulu nýggir sáttmálar gerast.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2027.

§ 1 Kommunal fyrisiting:
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 6,8%, svarandi til góðar 7,7 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum, men eisini dýrkandi útreiðslur til kunningartøkni og KT-trygdarskipanir.

§ 2 Almanna- og heilsumál:
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,3%, svarandi til 19,7 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir og samtyktar virksemisbroytingar eru lagdar afturat.

Sosiala deild er tillagað. Virknisfremjandi tiltøk eru sett í verk, so deildin brúkar minni av uttanhýsis fyriskipanum, sæst hetta aftur í fíggjarætlanini fyri 2027, ið bert hevur ein lítlan vøkstur. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men sambært kunngerð er vistarhald til forsturforeldur hækkað við 625 túsund kr.

§ 3 Børn og ung:
Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,0%, Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Nógv størsti parturin av hækkingini er lønir, sum hækka við 9.450 mió. kr. Ein annar

partur, ið ávirkar, er at vøggustovugjaldið hækkar bert 1 %, svarandi til 169 kr. fyri hvørt barn í vøggustovu. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønarstig.

§ 4 Undirvísing:
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 9,5%. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Trøðni til heildagstilboðið.

Aftrat hesum eru tað serliga tvey økir, sum gera, at raksturin á skúlunum hækkar. Allir skúlaskrivarar eru umflokkaðir, haraftrat er KT útbúnaður vorðin munandi dýrari og gjald fyri KT trygd. Eisini er sáttmálin við Nám fyri undirvísingartilfar dagførdur.

§ 5: Mentan og frítíð:
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 4,8%. Á Musikkskúlanum hækkar raksturin góðar 700 tús. kr., sum er afturberingin til landið vegna økt tímatal.

Inntøkugrundarlagið hjá Ítróttarannlegg er nærum burtur. Tað eru tvinnar orsøkir til tað. Onnur er, at býráðið hevur samtykt at eingi tiltøk skulu verða í hallinum og hin, at øll ítróttarfeløg í Tórshavnar kommunu skulu fáa ókeypis hallartímar. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað.

§ 6: Teknisk mál:
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,4%, svarandi til uml. 7,6 mió. kr. Har av eru uml. 3,5 mió. kr. vegna øktar lønir.

Viðmerkjast skal, at moldgoymslurnar, sum áður hava verið undir konto 7110 Renovatión nú eru komin undir grein 6.

Í 2027 eru tað serliga og stóru útstykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum, sum hava virksemisbroytingar við sær. Í 2026 blivu virksemisbroytingarnar frá Havnarvegnum við íbindingum og Húsareynstunlinum býttar í 2 til 4, soleiðis at summar av hesum virksemisbroytingunum koma inn í 2027 eisini, og aðrar koma inn í 2027-2029.

Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa. Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 var 3,6 mió. kr. og fyri 2027 verður hetta uml. 3 mió kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum eru í 2019-2026 øktar 36%. Tó hava lønarvøkstur og øktir tilfarskostnaðir merkt, at neyðugt er við 16% aftrat í øktari játtan, um støði frá 2020 skal haldast. Hetta kann ikki koma undir virksemisbroyting, men ynski verður sett fram um, at játtanin kann økjast tilsvarandi, møguliga yvir eitt 2 ára skeið.

Útreiðslur til Fríðkan og viðlíkahald og røkt av kirkjugørðum økjast við 7,4%, svarandi til 1,4 mió kr., men tað er íroknað, at raksturin av moldplássunum í kommununi fer inn undir hetta økið frá grein 7. Um henda flyting ikki verður roknað við, er talan um eina netto øking á undir 4%.

§ 7: Kommunal virkir:
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,1%, svarandi til uml. 5,4 mió. kr., tá er Tórshavnar havn ikki við.

Mett verður, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 0,3 mió kr. hægri í 2027 enn tær vóru í 2026, svarandi til 0,8%. Væntað netto úrslit er 37,7 mió kr.

Kommunala brennistøðin fer at kosta Tórshavnar kommunu 4,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta er mest vegna lønarhækkingar og at nýggjur sáttmáli um ruskinnheintan kemur í gildið í oktober 2026. Hetta er eisini íroknað, at raksturin av moldplássunum er farin undir grein 6.

Brandstøðin fer at kosta 10,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta yvirskipað vegna øktar útreiðslur til leigu av nýggjum sløkkibili, og vegna øktan kostnað til tilfar og útgerð.

Bussleiðin fer at kosta 3,3% meira í 2027 enn 2026, og er hetta mest vegna útreiðslur í samband við indeksregulering av sáttmálanum við veitaran.

Skattafíggjaðar íløgur
Í hesum uppskotinum eru góðar 298 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna byggir nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, undirvísing og mentan. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

Tilmæli:
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 17. september 2026: Framlagt.

Byggi- og býarskipanarnevndin 28. september 2026: Framlagt.

Tekniska nevnd 28. september 2026: Tikið av skrá orsakað av vantandi upplýsingum í fíggjarpostum fyri tekniska økið á íløgusíðuni.

Vinnunevndin 28. september 2026: Framlagt.

Náttúru- og umhvørvisnevndin 28. september 2026: Framlagt.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við framløgdu fíggjarætlan.

Havnanevndin 29. september 2026: Framlagt.

Mentamálanevndin 30. september 2026: Framlagt.

Bergur Robert Dam Jensen ger vart við at vantandi hølisviðurskiftini við vøggustovuna í Kollafirði, er ynskiligt at neyðuga fíggingin finst í fíggjarætlanini.

Annfinn Brekkstein ynskir vindverju í vøggustovuni á Velbastað.

Tilbúgvingarnevndin 30. september 2026: Framlagt.

Trivnaðarnevndin 01. oktober 2026: Framlagt.

Heilsu- og eldranevndin 01. oktober 2026: Framlagt.

Tekniska nevnd 05. oktober 2026: Framlagt.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Uppskot til íløguyvirlit varð lagt fram.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til fyrstu viðgerð.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, tekur støðu á seinni fundi.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint til aðru viðgerð.

Ískoyti:
Eftir at uppskotið til fíggjarætlan varð lagt fram til 1. viðgerð í býráðnum tann 17. september 2026 hevur uppskotið verið til politiska viðgerð í øllum faknevndunum í býráðnum.

Rakstrarúrslitið verður nú mett til 373 mió.kr. í hesum uppskotinum, ið verður sent til 2. viðgerð samanborið við 364 mió.kr. í uppskotinum, sum varð lagt fram til 1. viðgerð tann 17. september 2026.

	Fíggjarætlan 2027 - Uppskot						
		Roknskapur	Ætlan	Ætlan	Ætlan	Broyting 2026/2027	
1.000 kr.		2025	2025	2026	2027	pct.	kr.
Inntøkur							
20501	Kommunuskattur	1.153.244	1.099.983	1.158.556	1.220.000	5,30%	61.444
20601	Felagsskattur	71.666	58.000	58.000	65.000	12,07%	7.000
20502	Húsaleiguskattur	1.268	1.000	2.000	2.000	0,0%	0
20801	Skattur af eftirlønarinngjøldum	248.847	231.376	265.000	291.000	9,8%	26.000
20802	DIS, FAS og frádráttir	35.322	35.322	34.000	38.000	11,8%	4.000
20804	Kommunanna partur av Veiðigjaldi	697	800	800	800	0,0%	0
20805	Kommunanna partur av Tøkugjaldi	294	200	200	200	0,0%	0
20806	Tænastugjald á tóm býli	0	0	2.900	4.200	44,8%	1.300
	Inntøkur íalt	**1.511.338**	**1.426.681**	**1.521.456**	**1.621.200**	**6,6%**	**99.744**
Rakstur							
§1	Kommunal fyrisiting	109.199	106.920	113.025	122.568	8,4%	9.542
§2	Almanna- og heilsumál	341.784	354.202	370.740	390.067	5,2%	19.327
§3	Børn og ung	273.243	256.354	276.077	295.186	6,9%	19.109
§4	Undirvísing	59.564	57.753	61.468	68.413	11,3%	6.945
§5	Mentan og frítíð	84.772	81.001	83.728	86.369	3,2%	2.641
§6	Teknisk mál	171.758	167.051	173.734	177.881	2,4%	4.147
§7	Kommunal virkir TK	102.855	102.084	104.921	113.194	7,9%	8.273
	Rakstur íalt uttan TH	**1.143.174**	**1.125.365**	**1.183.682**	**1.253.677**	**5,9%**	**69.995**
§7	Kommunal virkir TH	-48.266	-36.985	-37.975	-37.680	-0,8%	295
	Rakstur íalt	**1.094.908**	**1.088.380**	**1.145.707**	**1.215.997**	**6,1%**	**70.290**
Aðrar útreiðslur							
20101	Stuðul til rentuútreiðslur	33.650	30.000	30.000	30.000	0,0%	0
20910	Aðrar inntøkur	961	2.000	2.000	2.000	0,0%	0
	Aðrar útreiðslur íalt	**34.611**	**32.000**	**32.000**	**32.000**	**0,0%**	**0**
	Úrslit áðrenn rentur	**381.818**	**306.301**	**343.749**	**373.203**	**8,6%**	**29.454**
Rentur							
20301	Rentuútreiðslur TK	11.148	10.962	8.867	8.532	-3,8%	-335
20301	Rentuútreiðslur TH		5.037	7.250	7.808	7,7%	558
20401	Rentuinntøkur TK	0	0	0	0	0,0%	0
20401	Rentuinntøkur TH		0	0	0	0,0%	
	Rentur íalt	**11.148**	**15.999**	**16.117**	**16.340**	**1,4%**	**223**
	Úrslit av rakstri TK/TH	**370.670**	**290.303**	**327.632**	**356.863**	**8,9%**	**29.231**
	Avdráttir TK	**15.900**	**22.733**	**20.003**	**20.219**	1,1%	216
	Avdráttir TH	**14.484**	**15.874**	**15.873**	**20.672**	30,2%	4.799
	Úrslit av rakstri TK/TH	**340.286**	**251.696**	**291.756**	**315.972**	**8,3%**	**24.215**
	Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*	**306.504**	**235.622**	**276.904**	**306.772**	**10,8%**	**29.867**

Dagførda inntøkumetingin er soljóðandi.

§ 20 Inntøkur

Dagførda inntøkumetingin í uppskotinum til 2. viðgerð verður uppskrivað við 15.000 tús. kr. samanborin við inntøkumetingina í upprunaliga uppskotinum til fíggjarætlan. Tað eru felagsskatturin, skatturin av eftirlønargjøldum og flytingarnar frá landinum fyri DIS, FAS og frádráttum, ið verða uppskrivað við ávikavist 5.000 tús.kr, 6.000 tús.kr og 4.000 í nýggjastu inntøkumetingini til 2. viðgerð av uppskotinum til fíggjarætlan 2027.

Broytingarnar av rakstrarútreiðslunum eru soljóðandi.

§ 1 Kommunal fyrisiting (rakstur)

Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verður kommunal fyrisiting upprøfest við tilsamans 1.850 t.kr. Her fara 500 t.kr. til meirkostnaðin til eitt samskiftisfólk afturat til stjórnarskrivstovuna. 500 t.kr. fara til at gera eina dagførda visión fyri Tórshavnar kommunu. 200 t.kr. fara til meirkostnaðin til ein fíggjarfulltrúa til trivnaðarfyrisitingina. 200 t.kr. fara til meirkostnað til eitt starvsfólk afturat til byggimálsviðgerð. KT-trygdin verður upprøfest við 550 t.kr. og á umboðanar- og tiltakskontuni verða spardar 100 t.kr.

§ 2 Almanna- og heilsumál (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til almenna- og heilsumál minkaðar við 380 t.kr. Her eru tað serliga útreiðslurnar til barnaverndar- og fosturfamiljuøkini, sum vera mettar at kunna minka við ávikavist 2.000 og 2.500 t.kr. Av tí at tilboðið til frontaldemens ikki kemur at virka heilt í 2027 verður játtanin til frontaldemens somuleiðis minkað við 500 t.kr.

Í hesum broytingaruppskotinum verður lagt upp til at fáa 330 t.kr. meira í hægri brúkaragjøldum fyri matartænastu, reingerðartænastu, virkisvenjingarstovu og rehabilitering.

Tað eru eisini uppraðfestingar í hesum uppskotinum. Heimatænustarnar verða uppraðfestar við fleiri rutum svarandi til 1.500 t.kr. 1.200 t.kr. fara til nýtt leigumál hjá sosialu deild. Miðstovan á Lágargarði er blivin til demensdeild og verður tí uppraðfest til demensnormering 1.150 t.kr. Fyri at tryggja og betra visitatiónina verður visitatiónin uppraðfest við 700 t.kr. Stuðul til Headspace á 300 t.kr. og øktur stuðul til hitastovuna á Herberginum við 100 t.kr.

§ 3 Børn og ung (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til barna- og ungdómsøkini uppraðfestar við 5.400 t.kr. Hetta er serliga til lønarframskrivingar á tilsamans 3.900 t.kr. á økjum, har lønarjáttanin ikki hevur verið dagførd, og tí hava hesi øki koyrt við stórum framfluttum hallum í fleiri ár. Harumframt fara 2.000 t.kr. til nýggja serstovu og 500 t.kr. verða spardar við at bjóða vørur og tænastur út á barnaansingarøkinum.

§ 4 Undirvísing (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til undirvísingarøkið uppraðfestar við 1.100 t.kr. Her verður ein nýggj matarskipan uppraðfest við 2.000 t.kr. umframt 100 t.kr. til leigu av báti til NámX. Ætlanin er eisini at spara 500 t.kr. við at bjóða vørur og tænastur út á skúlaøkinum, og játtanin til aðrar útreiðslur á skúlaøkinum verður minkað við aðrar 500 t.kr.

§ 5 Mentan og frítíð (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til mentan og frítíð minkaðar við 1.410 t.kr. Hjá Tórshavnar kvøldskúla verða 1.500 t.kr. fluttar frá rakstri til íløgur og 63 t.kr. koma inn við hægri brúkaragjøldum. Høli í Hoydølum verða ikki leigað í 2027 og tí verður játtanin til Mentanarhøli í miðbýnum minkað við 510 t.kr. Útboð av reingerð og sápu fer væntandi at minka nettoútreiðslurnar á mentanar- og frítíðarøkinum við 500 t.kr. Í svimjihøllini verður miðað eftir at fáa fleiri vitjandi. Hetta fer væntandi at geva 521 t.kr. í meirinntøkum í hesum uppskotinum samanborið við uppskotið, ið varð lagt fram til 1. viðgerð. Hægri brúkaragjøld á musikkskúlanum og á býarbókasavninum fara at geva tilsamans 66 t.kr.

Tað eru eisini uppraðfestingar til mentan og frítíð í hesum uppskotinum, ið verður lagt fram til 2. viðgerð. Rakstrarstuðulin til ítrótt og Føroya Symfoniorkestur hækka við ávikavist 1.000 t.kr. og 150 t.kr. Verkætlanarstuðulin til mentan hækkar 200 t.kr., 200 t.kr. fara til at seta ein savnsvørð til Tórshavnar býarsavn umframt 200 t.kr., sum fara til mentanarvikuna.

§ 6 Teknisk mál (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til teknisk mál minkaðar við 3.464 t.kr. Hægri íbindngargjøld fyri vatnveiting og kloakk fara væntandi at geva ávikavist 300 t.kr. og 1.800 t.kr. 1.500 t.kr. verða fluttar asfaltskontuni yvir á íløgur. Leigan av traðum og urtagarðsstykkjum verður hækkað og hetta fer væntandi at geva 414 t.kr. í meirinntøkum.

Fyri at basa hóttanina av innræsnum plantum verður játtanin til hetta endamálið hækkað við 150 t.kr. samstundis sum 400 t.kr. verða lagdar afturat til fríðkan í hesum uppskotinum samanborið við uppskotið, ið varð lagt fram til 1. viðgerð.

§ 7 Kommunal virki (rakstur)
Í broytingaruppskotinum til 2. viðgerð verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar til kommunal virki uppraðfestar við 2.885 t.kr. Bussleiðin fær 2.500 t.kr. meira til fleiri kvøldtúrar. Játtanirnar til vinnutiltøk, Hugskotið og Visit Tórshavn hækka við ávikavist 250 t.kr., 100 t.kr. og 185 t.kr. Ætlanin er at fáa 150 t.kr. í

meirinntøkum við hækka gjøldini fyri parkeringsloyvi í hesum uppskotinum samanborið við uppskotið, ið varð lagt fram til 1. viðgerð.

Tá rentur og avdráttir eru drignar frá rakstrarúrslitinum verða 307 mió.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2027. Og tær verða raðfestar soleiðis:

Íløguætlan 2027		
Deild		**2027**
		F
§2	**Almanna- og heilsumál**	**165.000**
2375	Tannlæknamiðstøð	2.000
2775	Nýtt røktarheim við røktaríbúðum	156.000
2775	Eldradepil í Kollafirði	4.000
2775	Dagføringar, eldraøki	3.000
§3	**Børn og ung**	**15.500**
3175	Tillagingar á dagstovnaøkinum	4.000
3175	Frítíðarskúlin við Eysturskúlan	7.000
3175	Dagstovnur og frítíðarskúli, Kaldbak	1.000
3175	Dagføring av spæliplássum	3.500
§4	**Undirvísing**	**30.500**
4175	Heildarumvæling av Argja skúla	21.000
4175	Hoyvíkar skuli, høvuðsumvæling og dagføring	5.500
4175	Dagføring av skúlum og spæliplássum	4.000
§5	**Mentan og frítíð**	**18.800**
5175	Musikkskúlin	1.500
5275	Kvøldskúlin	2.500
5775	Frælsur ítróttur, høli	800
5775	FC Hoyvík og 3.-6. flokstilboð	4.000
5775	Oyggjaleikir 2027	5.000
5775	Ítróttaranlegg, ovari vøllur	5.000
§6	**Teknisk mál**	**64.000**
6175	Høvuðsumvøling Steinatún	3.000
6177	Íløgur í orku og umhvørvisátøk	20.000
6275	Lendisgøtur	3.500
6275	Torg á Argjum	3.000
6275	Miðstaður Nólsoy	1.500
6275	Fríðkan av býnum, Hoyvík	3.000
6275	Vesi í Mylnugøtu	2.000
6275	Býarlist	1.000
6875	Kloakkir og spillvatnsætlan	18.000
8175	Gongu- og súkklubreytir og atkoma	3.000
8175	Vegagerð Gerðisbreyt Velbastað	1.000
8175	Parkering	1.000
8175	Vegaverkætlanir	4.000
§7	**Kommunal virki**	**13.000**
7175	Renovatión	13.000
	Samanlagt TK	**306.800**
7475	Tórshavnar havn	18.600
	Samanlagt	**325.400**

§ 2 Almanna- og heilsumál (løgur)

Í 2027 fer størsti parturin av løgujáttanum til almanna- og heilsumál. 156.000 t.kr. eru settar av til framhaldandi bygging av røktarheiminum á Stórubrekku, sum væntandi verður liðugt tíðliga í 2028. 4.000 t.kr. eru settar av til fyrireika eldradepil í Kollafirði, byggiskrá og projektering, meðan 3.000 t.kr. skulu brúkast til dagføringar á eldraøkinum m.a. tilmælir, sum eldraráðið hevur gjørt, umframt ábøtur á eldrastovnum, har tørvur er á dagføringum. 2.000 t.kr. eru settar av til at fyrireika nýggja tannlæknamiðstøð til barnatannrøktina.

§ 3 Børn og ung (løgur)
Tilsamans 15.500 t.kr. eru settar av til íløgur á barna- og ungdómsøkinum í 2027. Næstan helmingurin fer til Frítíðarskúlin við Eysturskúlan. Síðan koma tillagingar á dagstovnaøkinum við 4.000 t.kr. og 3.500 t.kr. til dagføringar av spæliplássinum á dagstovnaøkinum. 1.000 t.kr. eru settar av til dagstovnin og frítíðarskúlan í Kaldbak.

§ 4 Undirvísing (løgur)
Á undirvísingarøkinum eru 21.000 t.kr. settar av til framhaldandi heildarumvæling av Argja Skúla. 9.000 t.kr. settar av til dagføringar av skúlum og spæliplássum í 2027. Av hesum fara 5.500 t.kr. til høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla.

§ 5 Mentan og frítíð (løgur)
Í 2027 eru tilsamans 18.800 t.kr. settar av til íløgur á mentanar- og frítíðarøkinum. Oyggjaleikir og ovari vøllur fáa hvør sínar 5.000 t.kr. 4.000 t.kr. fer til hølisumstøðurnar hjá FC Hoyvík umframt 3.-6. flokstilboð í somu hølum. Kvøldskúlin fær 2.500 t.kr., musikkskúlin fær 1.500 t.kr. og 800 t.kr. fara til høll til frælsan ítrótt.

§ 6 Teknisk mál (løgur)
Tilsamans 62.000 t.kr. eru settar av til teknisk mál í 2027. Av hesum fara 20.000 t.kr. til orku og umhvørvisátøk. Hildið verður fram við at leggja kommunalar bygningar um til grønar orkukeldur. Har hetta fellur saman við dagføringar av somu bygningum, verður samstundis bjálving o.a., sum minkar um orkutørvin framt.

Átøk, har kommunan kann gera íløgur fyri at minka um CO_2 útlátið í sínum dagliga virksemi kann heilt ella lutvíst fíggjast av hesum 20.000 t.kr. Átøk, ið verða mett, at fremja umhvørvispolitikkin hjá kommununi kunnu somuleiðis heilt ella lutvíst, fíggjast av hesum 20.000 t.kr.

Kloakk- og spillvatnsætlanin fer við 18.000 t.kr. í 2027. Arbeiðið at fremja spillvatnsætlanina heldur fram. Havleiðingar í Havn verða longdar út á streymasjógv.
Átøk verða gjørd til at minka um trýstið á eldri leiðingar í miðbýnum umframt umleggingar til aðrar leiðir.

Tilsamans 11.000 t.kr. eru settar av til fríðkan av kommununi í 2027. 3.500 t. kr. fer til lendisgøtur. Upphæddin skal nýtast til at gera nýggjar lendisgøtur ella til at endurbyggja gøtur, ið eru ov illa farnar av áarføri. 1.500 t.kr. fara til miðstaðarøki í Nólsoy. 3.000 t.kr. er sett av til Torg á Argjum. Torg og uppihaldsøki verður staðsett og planlagt á Argjum. Verkætlanin skal standa klár til 200 ára hátíðarhaldið 9. mai 2028. 3.000 t.kr. fara til Karlamagnusarbreyt í Hoyvík umframt savningarstað við Mylnutjørn. 2.000 t.kr. fara til vesi í Mylnugøtu.

Tilsamans 9.000 t.kr. fara til vegakervið. 1.000 t.kr. fara til at bøta um parkeringsviðurskiftini í miðbýnum. 4.000 t.kr. fara til nýgerðir á veganetinum. 3.000 t.kr. fara til gongu- og súkklubreytir umframt atkomu. Vegamót skulu tillagast til ábæra ferðslu og ferðandi við skerdum førleikum. Umstøður hjá ábæru ferðsluni skal skipast betri og tryggari. Tað skal vera betri samanhangandi undirstøðukervi til ábæru ferðsluna og greiðari skilnaður skal ver millum hørðu ferðsluna og ábæru ferðsluna. 1.000 t.kr. skulu brúkast til at gera Gerðisbreyt í Velbastað lidna.

§ 7 Kommunal virki
Tilsamans 13.000 t.kr. eru settar av til Kommunal virki í 2027. Henda játtanin fer til framhaldandi dagføring og endurgerð av brennistøðini, endurnýtsluni, tangatømingini og jarnplássinum. Harumframt verður endurnýtsluplássið í Hesti dagført.

Fíggjarnevndin 17. november 2026: Samtykt at beina málið í býráðið til aðru viðgerð.

298/26 Eykajáttan av meirinntøkum 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	17.11.2026	240/26	26/08169-1
2 Býráðsfundur	19.11.2026	298/26	26/08169-1

Upprunin til málið
Umsitingin ger á hvørjum ári dagførda inntøkumeting, sum verður løgd fyri býráðið við uppskoti um at raðfesta partar av møguligu meirinntøkunum til ymsar kontur, ið mettar vera at enda við meirnýstslu, sum ikki kann fíggjast á annan hátt, tá ið árið er úti.

Lýsing av málinum
Dagførda inntøkumetingin í november 2026, vísir, at samlaðu meirinntøkunar hjá Tórshavnar kommunu í 2026 íroknað reguleringina frá Taks vera góðar 88 mió. kr. hægri enn mett var í upprunaligu fíggjarætlanini hjá kommununi, sum varð gjørd í november 2025.

Mettu meirinntøkurnar í 2026 stava serliga frá hægri kommunuskatti, hægri felagsskatti og hægri skatti av eftirlønargjøldum.

Av meirinntøkunum á góðar 88 mió. kr. er býráðið samt um at brúka tilsamans 79,6 mió. kr. av meirinntøkunum sum víst í talvuni niðanfyri.

Grein	Íløgur:	t.kr.
4	Skúlin á Argjahamri	6.500
5	Knørrur	5.500
5	Stuðul til høli hjá ítróttarfeløgum	3.000
6	Vegaverkætlanir	6.200
6	Keyp og søla	7.500
6	Eldrabústaðir	7.000
6	Bústaðir, Heimbýli	3.500
6	Kirkjugarðar	2.000
6	Rakstrargøgn	8.000
6	Lendisætlan	1.000
2	Nýggj kommunulæknahøli	3.000
2	Høli til AA	3.000
2	Berin	2.000
3	Vøggustova í Kollafirði	2.800
5	Tjóðpallurin	1.500
5	Dagføring av svimjihøllini	4.500
5	Oyggjaleikir-fjallasúklubreyt	2.000
6	Vatnleiðingar	1.750
	Íløgur íalt	**70.750**
Grein	**Rakstur:**	
1	Val og valnevndir	506
1	Alment innkeyp	700
2	Tannlæknaútgerð	700
3	Systkinaavsláttur	1.000
3	Serstovur	1.000
5	Svimjihøllin	959
5	Ítróttarannlegg	1.144
5	Bygda- og býarsøgur	1.000
6	Umsiting av bygningum	1.000
7	Brandstøðin	800
	Rakstur íalt	**8.809**
	Íløgur + rakstur	**79.559**

Íløgur
Pengar eru brúktir av løgukontuni hjá Skúlanum á Argjahamri til at útvega lonir til Skúlan á Fløtum. Henda upphæddin, svarandi til 6.500 t.kr., verður nú flutt aftur á løgukontuna hjá Skúlanum á Argjahamri.

Tórshavnar kommuna samtykti í 2025 at veita kappróðrarfelaganum Knørrur íløgustuðul til eitt nýtt kappróðrarneyst í Álakeri. Mælt verður til at játta 5.500 t.kr. av meirinntøkunum til stuðul at byggja nýtt neyst. Somuleiðis verður mælt til at játta 3.000 t.kr. til ítróttarfeløg, ið hava serliga høgar rakstrarútreiðslur av at eiga og reka egin høli.

Vegakontan legði fyrr í ár 6.200 t.kr. út fyri at keypa grót frá tunnilsfelagnum. Avtalan var, at upphæddin skuldi flytast aftur á vegakontuna seinni í árinum, sí mál nr. 25/10813.

Á keyp og sølu kontuni verða keyp og søla av fastari ogn skásett, so hvørt tey framd. Tórshavnar kommuna hevur keypt og selt ymsar ognir hesa seinastu tíðina. Nevnast kunnu t.d. søla av húsi Hornabø, keyp av ogn í Djóna í Geil gøtu umframt ætlanir um at selja grundstykki og lendiskeyp á Signabø og í Kollafirði. Fyri at fremja allar hesar ætlanir verður mett neyðugt, at flyta 7.000 t.kr. á keyp

og sølu kontuna. Her er eisini íroknað, at kommunan ætlar at keypa eina trøð fyri 7.000 t.kr. í vesturbýnum til eldrabústaðir.

Ætlanin er at seta 3.500 t.kr. afturat í Bústaðarfelagið Heimbýli, sum Tórshavnar kommuna eigur saman við Bústøðum. Hetta er í sambandi við bygging av leigubústøðum við Villingardalsvegin.

Mælt verður til at játta 2.000 t.kr. av meirinntøkunum til kirkjugarðarnar. Upphæddin skal brúkast til at umvæla og drena nýggja økið í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin av nýggjum. Mælt verður til at flyta 8.000 t.kr. av meirinntøkunum til rakstargøgn, har 4.500 t.kr. skulu brúkast til ein nýggjan rottangabil og 3.500 t.kr. til ein nýggjan sløkkiliðsbil. Harumframt fer 1.000 t.kr. av meirinntøkunum til lendisætlanina.

Tilsamans 20.550 t.kr. av tilmælinum til íløgur av meirinntøkunum fara til dagføringar av bygningum og aðrar dagføringar á løguøkinum hjá kommununi. 3.000 t.kr. fara til dagføra gomlu kommunulæknaviðtaluhølini á Frúutrøð. Ávikavist 3.000 t.kr. og 2.000 t.kr. fara til AA og Beran. 2.800 t.kr. 1.500 t. kr. fara til WC til rørslutarnað á Tjóðpallinum. Tilsamans 4.500 t.kr. fara til dagføringar av svimjihøllini, 1.500 t.kr. til heitan hyl og 3.200 til atkomu. 2.000 t.kr. fara til fjallasúkklubreyt til oyggjaleikirnar og 1.750 t.kr. fara til umleggingar av vánaligu vatnleiðingunum í kommununi.

Rakstur
Mælt verður til at brúka tilsamans 8.809 t.kr. av meirinntøkunum til hesi endamál á rakstrarøkinum: 506 t.kr. til at rætta hallið á kontuni fyri val og valnevndir yvir tvey ár. 700 t.kr. til verkætlanarfólk til alment innkeyp. 700 t.kr. til at dagføra tannlæknaútgerð á skúlatannlæknastovuni. Tilsamans 2.000 t.kr. til at rætta hallið á kontunum fyri systkinaavsláttur og serstovur yvir tvey ár. Somuleiðis 1.144 t.kr. til at rætta hallið hjá ítróttaranleggum yvir tvey ár. 959 t.kr. og 800 t.kr. fara til at fáa rakstrarhallið hjá ávikavist svimjihøllini og brandstøðini burtur yvir 3 ár. 1.000 t.kr. fer til umsiting av bygningum og 1.000 t.kr. Argja Søgu og Hoyvíkar søgu umframt talgilding av Havnar søgu.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
		Navn	Deild	Verkætlan	Navn	Nýggj verkætlan	Upphædd
		Meirinntøkur 2026	4175	Skúlin á Argjahamri			6.500.000
		Meirinntøkur 2026	5365	Bygda og býarsøgur			3.000.000
		Meirinntøkur 2026	5370	Knørrur			5.500.000
		Meirinntøkur 2026	8175	Vegaverkætlanir			6.200.000
		Meirinntøkur 2026	6175	Keyp og søla			7.500.000
		Meirinntøkur 2026	6175	Eldrabústaðir			7.000.000
		Meirinntøkur 2026	6175	Bústaðir, Heimbýli			3.500.000
		Meirinntøkur 2026	6575	Kirkjugarðar			2.000.000
		Meirinntøkur 2026	8375	Rakstrargøgn			8.000.000
		Meirinntøkur 2026	6275	Lendisætlan			1.000.000
		Meirinntøkur 2026	2275	Kommunulæknahøli			3.000.000
		Meirinntøkur 2026	2575	Høli til AA			3.000.000
		Meirinntøkur 2026	2575	Berin			2.000.000
		Meirinntøkur 2026	3175	Vøggustova í Kollafirði			2.800.000
		Meirinntøkur 2026	5475	Tjóðpallurin			1.500.000
		Meirinntøkur 2026	5775	Svimjihøllin			4.500.000
		Meirinntøkur 2026	5775	Oyggjaleikir			2.000.000
		Meirinntøkur 2026	6775	Vatnleiðing			1.750.000
		Meirinntøkur 2026	1210	Val og valnevndir			506.000
		Meirinntøkur 2026	1311	Alment innkeyp			700.000
		Meirinntøkur 2026	2310	Tannlæknaútgerð			700.000
		Meirinntøkur 2026	3213	Systkinaavsláttur			1.000.000
		Meirinntøkur 2026	3218	Serstovur			1.000.000
		Meirinntøkur 2026	5510	Bygda- og býarsøvn			1.000.000
		Meirinntøkur 2026	5610	Svimjihøllin			959.000
		Meirinntøkur 2026	5717	Ítróttaranlegg			1.144.000
		Meirinntøkur 2026	6109	Umsiting av bygningum			1.000.000
		Meirinntøkur 2026	7210	Brandstøðin			800.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	
Áður játtað	Upphædd:	
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	

Tilmæli:
Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi uppskoti til eykajáttan og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Fíggjarnevndin 17. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ískoyti:
Í tekstinum omanfyri stendur soleiðis: “Hetta er í sambandi við bygging av leigubústøðum við Villingardalsvegin.” Rætti teksturin skal vera: “Hetta er í sambandi við bygging av leigubústøðum í Kollafirði.” Somuleiðis verður kontan fyri “Stuðul til feløg, ið eiga egin høli” rættað til konto 5365 Stuðul til ítrótt- og frítíðarvirksemi í yvirlitinum omanfyri.

Stuðulin til feløg, ið eiga og reka egin høli verður býttur soleiðis:

Bóltfelagið B36 fær 1,2 mió. kr.
Havnar Bóltfelag fær 1,2 mió. kr.
Argja Bóltfelag fær 0,3 mió. kr.
Kappróðarfeløg 0,3 mió. kr.

299/26 Dagføring av játtanarreglum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	07.10.2026	203/26	26/07503-1
10 Heilsu- og eldranevndin	05.11.2026	28/26	26/07503-1
11 Havnanevndin	10.11.2026	56/26	26/07503-1
12 Fíggjarnevndin	11.11.2026	230/26	26/07503-1
13 Byggi- og býarskipanarnevndin			26/07503-1
14 Býráðsfundur	19.11.2026	299/26	26/07503-1
2 Býráðsfundur	22.10.2026	287/26	26/07503-1
3 Fíggjarnevndin	30.10.2026	209/26	26/07503-1
4 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	218/26	26/07503-1
5 Tekniska nevnd	02.11.2026	100/26	26/07503-1
6 Náttúru- og umhvørvisnevndin	02.11.2026	62/26	26/07503-1
7 Mentamálanevndin	04.11.2026	128/26	26/07503-1
8 Vinnunevndin	04.11.2026	34/26	26/07503-1
9 Trivnaðarnevndin	05.11.2026	47/26	26/07503-1

Upprunin til málið
Hetta málið snýr seg um at dagføra verandi játtanarreglur, soleiðis at teksturin verður greiðari og onkrar nýggjar og neyðugar ásetingar koma í játtanarreglurnar.

Lýsing av málinum
Mælt verður til at seta soljóðandi nýggjar ásetingar í játtanarreglurnar:

Punkt 4: Stuðulsjáttanir. Stuðulsjáttanir eru játtanir, sum býráði hevur samtykt til stuðul til ymisk endamál, ið verður útgoldin sambært ásettum reglum til viðkomandi endamál.

Eingin lýsing er av stuðulsjáttanum í verandi játtanarreglum.

Punkt 7: Útlegg og meirinntøkur. Tað er bert kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin, ið kunnu vera tilmælandi at leggja mál fyri fíggjarnevndina, sum ætlanin er at fíggja við útleggum ella av meirinntøkum.

Tað kemur javnan fyri, at umbønir um eykajáttan koma úr faknevndum í fíggjarnevndina, har málsviðgerar mæla til, at eykajáttan verður fíggjað við útleggi ella av meirinntøkum. Málsviðgerar hava vanliga ikki havt heimild til at mæla til at fíggja meirútreiðslur við útleggum ella av meirinntøkum, tí verður nú greitt ásett í játtanarreglunum, at tað bert er kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin, ið kunnu vera tilmælandi at leggja mál fyri fíggjarnevndina, sum ætlanin er at fíggja við útleggum ella av meirinntøkum.

Punkt 9: Tulkingarrættur. Fíggjardeildin hevur endaliga tulkingarrættin, um ivamál stinga seg upp, hvussu játtanarreglurnar skulu skiljast.

Fíggjardeildin umsitur og samskipar fíggjarætlanartilgongdina og fíggjarætlanararbeiði, men tað kemur fyri, at fólk í fyrisitingini og umsitingini ikki eru samd við fíggjardeildini, hvussu ásetingar í játtanarreglunum skulu skiljast. Tí verður mett neyðugt, at tað verður ásett í játtanarreglunum, at tað er fíggjardeildin, ið hevur endaliga tulkingarrættin, tá ið ivamál stinga seg upp, hvussu játtanarreglunar skulu skiljast.

Umframt hesar nýggju ásetingarnar, so eru ymsar orðingar í verandi játtanarreglum skrivaðar øðrvísi, soleiðis at tær eru lættari at skilja.

Lógir, ásetingar o.a.
-

Upplýsingar frá umsitingini
-

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
-

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
-

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
-Játtanarreglur (galdandi)
-Játtanarreglur (dagførdar oktober 2026)

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli: Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við hesum tilmæli, og beina málið víðari í býráðið til tvær viðgerðir.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum, við teirri viðmerking, at ein nágreina lýsing av keyp og sølu konto skal gerast.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Ískoyti:
Sambært viðmerking frá fíggjarnevndini verður keyp og sølu kontan nágreina soleiðis í dagførdu játtanarreglunum:

6175 Umsiting og røkt av fastari ogn

Alt keyp og øll søla av fastari ogn vera avgreidd umvegis hesa kontuna. Kontan verður tí eisini vanliga nevnd keyp og sølu kontan. Tað er bert kommunustjórin, ið kann vera tilmælandi at leggja mál fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina, sum ætlanin er at fíggja umvegis hesa kontuna.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Samtykt uttan avkvøðugreiðslu at beina málið beint aftur í fíggjarnevndina.

Ískoyti:
Eftir at býráðið beindi málið aftur í fíggjarnevndina er orðingin um at fíggjardeildin hevur tulkingarrættin broytt til, at tað er kommunustjórin, sum skal hava tulkingarrættin. Orðingin um tulkingarrættin verður tí soljóðandi:

9. Tulkingarrættur
Kommunustjórin hevur endaliga tulkingarrættin, um ivamál stinga seg upp, hvussu játtanarreglurnar skulu skiljast.

Fíggjarnevndin 30. oktober 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, samtykti at taka undir við tilmælinum og broyting í punkt 9 og beina málið aftur í fíggjarnevndina, umvegis faknevndirnar til kunningar.

Ein minniluti Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á seinni fundi.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Kunnað varð um málið.

Tekniska nevnd 02. november 2026: Kunnað varð um málið. Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

Anja Weyhe tekur kunningina til eftirtektar.

Náttúru- og umhvørvisnevndin 02. november 2026: Kunnað varð um málið. Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, tekur kunningina til eftirtektar.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Mentamálanevndin 04. november 2026: Kunnað varð um málið. Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó tekur ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen og Heðin Mortensen, ikki undir við punkt 9.

Vinnunevndin 04. november 2026: Kunnað varð um málið.

Trivnaðarnevndin 05. november 2026: Kunnað varð um málið.

Heilsu- og eldranevndin 05. november 2026: Kunnað varð um málið. Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

Havnanevndin 10. november 2026:
Kunnað varð um málið.
Ein meiriluti: Birgir Nielsen, Guttormur í Skála og Anja Weyhe tekur kunningina til eftirtektar.
Ein minniluti: Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

Ein minniluti Heðin Mortensen tekur ikki undir við punkt 9.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum, men at punkt 9 verður tikið úr.

Tróndur Sigurðsson tekur undir við tilmælinum, men at tulkingarrætturin verður umsitin av miðfyrisitingarstjóranum.

Høgni Vilhelmsen atkvøður blankt.

300/26 Umbøn um eykajáttan til konto 3212 "Tímar vegna serligan tørv"

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Býráðsfundur	19.11.2026	300/26	26/07063-8

Upprunin til málið

Fíggjarstøðan á konto 3212 og Játtanarreglur í Tórshavnar kommunu

Lýsing av málinum
Sambært játtanarreglunum kann í mesta lagi 5 % av meirnýtsluni flytast fram til næsta fíggjarár. Meirnýtslan skal vera burtur innan trý ár.

Ein meting av nýtsluni á konto 3212 fram til desember 2026 vísir at nýtslan verður 18.000.000 kr. í 2026. Sostatt verður neyðugt við á 13.171.000 kr. fyri at kontan kemur á slætt aftur.

Fíggjarstøðan á konto 3212 “Tímar vegna serligan tørv”:

3212 Tímar vegna serligan tørv			
	2026	2025	2024
Upprunalig FÆ	9.000.000 kr	10.000.000 kr	10.000.000 kr
Eykajáttan		3.500.000 kr	2.000.000 kr
Framflutt	- 4.171.000 kr	- 594.000 kr	63.000 kr
Játtan	4.829.000 kr	12.906.000 kr	12.063.000 kr
Nýtsla	18.000.000 kr	17.077.369 kr	12.657.133 kr

Nýtslan á 3212 hevur hvørt ár frá 2019 til 2026 verið hægri enn játtanin. Umsitingin hevur gjørt vart við støðuna í nøkur ár, og m.a. víst á, at konto 3212 ikki fylgir lønarvøkstrinum og at barnatalið í kommununi er vaksið.

Harumframt eru tað fleiri nýggir málbólkar, sum eru á dagstovnum í dag. Hesi eru m.a.:
- Útlendsk børn (minst eitt foreldur sum ikki hevur føroyskt sum móðirmál), sum fáa 15 % av tímunum. Tað svarar til umleið 3,3 mió. kr.
- Børn við stofskiftissjúku, sum fáa játta 3,5 % av tímunum. Tað svarar til umleið 0,6 mió. kr.
- Børn í forskúla, sum 2025 fingu 1 mió. kr. og í 2026 0,6 mió. kr.

Avleiðing av at játtanin ikki fylgir lønarvøkstrinum
Sum nevnt fylgir játtanin til 3212 ikki lønarvøkstrinum, sum hevur verið stórur seinastu árini við lønarlyftið o.t. Ein meting vísir at frá 2019 til dags dato, so burdi játtanin á 10 mió. kr. verið reglulerað við 3-4 mió. kr.

Kortini hevur játtanin staðið í stað.

Í 2024 og 2025 var stuðulsøki, sum er Tímar vegna serligan tørv (kt. 3212), Serstovur (kt. 3218), Námsfrøðilig ráðgeving og dygdarmenning (kt. 3211) eftirmett.

Hesi átøk sett í verk fyri at tálma útreiðslum á 3212:
- Eftirmeting av Tímagrunninum, Serstovum og námsfrøðiligu ráðgevingini, 2024-2025
- Førleikamenning raðfest (meritútbúgving v.m.), 2024
- Námsfrøðilig arbeiðsplássmeting, 2025
- Betra ljóðviðurskifti (akustikk) á stovnunum, 2025-2026
- Frá 2025 rindar Tímagrunninum ein fastan sats pr. tíma (lønarstig 3) til starvsfólkaútreiðslur

- Viðgerðin av umsóknum til námsfrøðilig tiltøk hevur við sær, at stovnsleiðarar og eindarleiðarar saman við deildarleiðara eftirkannað um avlop er á eindarkontoini, áðrenn tímar verða játtaðir úr Tímagrunninum.
- Játtan til dygdarmennara, 2026
- Minni barnabólkar, september 2026

Umsitingin metir, at hetta kann hava ávirkan á støðugt vaksandi eftirspurningin eftir stuðulstímum.

Umbønin um eykajáttan er ein liður í at fáa kontuna aftur á beint. Smb. játtanarreglunum so skal ein meirnýtsla vera burtur innan trý ár. Fyri at fáa kontuna aftur á beint, so verður lagt upp til at brúka inniverandi ár og komandi ár, fyri síðan at koma aftur á beint í 2028, so vit halda okkum til játtanarreglurnar.

Tað vera bert játtaðir tímar í heilt serligum førum. Vit hava sett tiltøk í verk fyri at tálma nýtsluni, fyri ikki at koma inn í 2027 við somu nýtslu, sum nýtslan hevur verið í 2026.
Játtanin fyri 2027 eigur at hækka nakað á fíggjarætlanini, samstundis sum ein upphædd eigur at setast av til at dekka meirnýtsluna.
Væntandi verður eitt samlað avlop á 2 mió. á §3 sum kann sum kann flytast á 3212 “Tímar vegna serligan tørv” í samband við framflytingarnar á vári 2027.

Orsøkirnar til minninýtslu á kontunum;
2512 “Integratión” hevur verið minninýtsla í lønum í 2026
2613 “Børn sett heiman í fosturfamilju” og 2617 “Brúkaragjøld, Serstovnar” hevur minninýtslu vegna færri børn eru til fosturs og á serstovnum, enn tá fíggjarætlanin fyri 2026 varð løgd í 2025.
3217 “Dygdarmenning” hevur somuleiðis minninýtslu, tí tað hevur drigið út at fáa sett í størvini av ymiskum orsøkum.

Lógir, ásetingar o.a.

- § 5 í Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018 (Dagstovnalógin)
- Barnarættindasáttmálin
- Breksáttmálin

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
- 24/01238 Fíggjarstøða 2024, konta 3212 Tímar vegna serligan tørv
- 23/03087 Fíggjarstøða konta 3212, tímar vegna serliga tørv

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar			x	
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar	x			

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
2512		Integratión					500
2613		Børn sett heiman í fosturfamilju					3.200
2617		Brúkaragjøld, serstovnar					1.200
3217		Dygdarmenning	3212		Tímar vegna serligan tørv		1.750

Tilmæli: Trivnaðarstjórin mælir til at samtykkja at:

Játtaðar verða 6.650 kr. sum eykajáttan á 3212 “Tímar vegna serligan tørv” játtað av fylgjandi kontum.

- 500 tús. kr. av 2512 “Integratión” at flyta á 3212 “Tímar vegna serligan tørv”
- 3,2 mió. kr. av 2613 “Børn sett heiman í fosturfamilju” at flyta á 3212 “Tímar vegna serligan tørv”
- 1,2 mió. kr. av 2617 “Brúkaragjøld, serstovnar” at flyta á 3212 “Tímar vegna serligan tørv”
- 1,75 mió. kr. av 3217 “Dygdarmenning” til 3212 at flyta á “Tímar vegna serligan tørv”

- at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin 16. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 17. november 2026: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

301/26 Flyta sosialu deild í leiga hølir Yviri við Strond

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	07.10.2026	202/26	26/07552-3
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	217/26	26/07552-3
3 Býráðsfundur	19.11.2026	301/26	26/07552-3

Upprunin til málið
Sosialu deild / Barnaverndartænastan heldur í dag til í gamla posthúsbygninginum á Vaglinum / Tórsgøtu. Í takt við at deildin er vaksin nógv seinastu árini, veksur plásstørvurin samsvarandi.

Í samstarvið við Bygningsdeildina eru í fleiri umførum gjørdar tillagingar í verandi hølum og starvsfólk eru sett tættari saman. Ásannandi at karmarnir eru ov trongir, hevur samstundis verði leita eftir hóskandi størri hølum aðrastaðni í býnum.

Tá útlit eru fyri at tænastan fer at veksa enn meir, ikki minst orsakað av at Tórshavnar Kommuna átekur sær tænastur fyri aðrar kommunur, eru hølini Yviri við Strond áhugaverd, bæði í mun til stødd og staðseting.

Lýsing av málinum
Hølistørvur
Viðfest er fylgiskjal 1 “Hølistørvur hjá Sosialu deild / Barnaverndartænastuni í Tórshavnar Kommunu, sep. 2026”

Nøktandi hølir er fortreyt fyri at kjarnuuppgávurnar kunnu loysast á ein góðan hátt. Av tí at kjarnuuppgávurnar eru viðkvæmar, bæði tí at familjurnar og børnini al oftast eru í sárbærum støðum í lívinum, so krevur lóggávan á økinum sera nógv skrivligt arbeiðið, sum skal skrásetast osv. Umframt samrøður við borgarar, bæði fundarvirksemi og telefonsamrøður.

Samanbering av verandi hølum og hølunum Yviri við Strond 17
Skrivstovufólk skulu sambært lóg hava rúmd – t.e. fermetrar og rúmmetrar til sítt dagliga arbeiði, lógliga arbeiðsumhvørvið til skrivstovur umfatar eisini hóskandi matarstað, toilett og eina brunatrygga innrætting. Harafturat koma fundarhølir og onnur hølir sum stuðla undir virksemið á skrivstovuni.

Lyklatal fyri samlaðan plásstørv til hvørt starvsfólki liggur onkrastaðni millum 20 og 30 fermetur, tá er felags matarstað (kantina) ikki íroknað.

Bygningsdeildin hevur samanborið verandi hølir í gamla posthúsbygninginum við tríggjar hæddir í bygninginum Yviri við strond 17. Viðfest er fylgiskjal 2 “Samanbering av hølum”

Verandi hølir í posthúsbygninginum eru 594 fermetrar til støddar. Býta vit hetta millum 35 starvsfólk, er í miðal einans 17 kvm í part. Tørvur er sostatt á eini 280 fermetrum afturat, ella 874 fermetrum.

Hølini á 1,2 og 3 hædd í bygninginum Yviri við strond 17 eru 882 fermetrar til støddar. Hølini eru í sera góðum standi, hetta tí tey eru nýliga umvæld til nýtsluna hjá Landsverk. Millum annað er opið trappusamband ímillum allar fýra hæddir. Trappan er í stórum miðrúmi, har felagsøkir hjá starvsfólkum virka sum eitt gott bindilið fyri stovnin.

Hóast hølini eru í sera góðum standi verður neyðugt at gera smærri broytingar í innrættingi, sum hóska til virksemi hjá Sosialu deild / Barnaverndartænastuni. Eisini eru útreiðslur tengdar at sjálvari flytingini.

Møguligur sáttmáli við Landsverk um leigu av bygningi
Umsitingin hevur havt fleiri fundir við Landsverk um møguleikan at leiga. Landsverk heldur í dag til á fýra hæddum í nr. 17. Harumframt er kantinan hjá Landsverk á 2. Hædd í nr. 15, sum er fast í nr. 17 við høgari

millumgong. Landsverk hevur sáttmála við eigara av nr. 15 & 17. Landsverk vil helst framleiga alt teirra leigumál, talan er um 2.226 fermetrar.

Í øðrum lagi ynskir Landsverk at framleiða allar fýra hæddir í nr. 17, svarandi til leigumál á 1.282,6 m2. Umframt leigugjald skal Landsverk hava serstakt gjald fyri umvælingarnar, sum Landsverk fíggjar við lánið. Landsverk hevur gjørt útrokning har TK tilsamans rindar kr. 2.206.640,13. um ári ella kr. 1.720 pr. fermetur. Tá 10 ár eru farin er lánið útgoldið og leigugjaldi verður kr.1.953.669,15 um ári ella 1.523 pr. fermetur. Sí fylgiskjal 3 “Teldupostur frá Landsverk, dagfestur 18.09.2026”. Landsverk viðmerkir at hetta eru ca. tøl, sum endaliga mugu avtalast við útleigara.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Sosialudeild og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til at umsitingin fær heimild til at samráðast Landsverk um ein møguligan sáttmála, at leiga tríggjar ella fýra hæddir í bygninginum Yviri við Strond nr. 17 fyri ein hóskandi fermetraprís.

Um samráðingarnar bera á mál, so koma aftur í fíggjarnevndina við við einum evt. leigusáttmála til støðutakan.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Ískoyti:
Yvirtøka av leigumálinum í Yviri við Strond 17

Tórshavnar kommuna og Landsverk hava í fleiri umførum verið í samráðingum um eina evt. yvirtøku av leigumálinum hjá Landsverk Yviri við Strond 17.

Tað sum partarnir eru samdir um er ein árligan leigu kostnað, sum er roknaður út soleiðis;

1.487,95 kr. fyri fermetur um árið. Árliga leigan fyri nr. 17 verður sostatt:
1.195,15 m² × 1,08 × 1.487,95 kr. = **1.920.589 kr**. um árið.

Landsverk leigar í dag hølini í Yviri við Strond 15–17 frá Sp/f frá 25. September 1978 sambært leigusáttmála sum er galdandi frá 1. februar 2023. Sáttmálin er hjálagdur
Vit skjóta upp, at ein avtala um yvirtøku tekur støði í hesum:

Høli og leiga
Hølini í nr. 17 eru uppgjørd til tilsamans 1.195,15 m², íroknað brúnna á 22 m². Sambært verandi leigusáttmála gjalda allir leigarar eitt ískoyti á ca. 8 % fyri felags millumgongd.
Galdandi leiga pr. 1. januar 2026 er 1.487,95 kr. fyri fermetur um árið. Árliga leigan fyri nr. 17 verður sostatt:
1.195,15 m² × 1,08 × 1.487,95 kr. = **1.920.589 kr**. um árið. Leigan verður goldin av 2612 “Barnavernd”

Legg til merkis, at hølini eru ikki heilt neyvt uppmáld. Árliga leigan kr. 1.920.589 kr., er galdandi, eisini um ein neyvari uppmáting seinni vísir eitt hægri ella lægri fermetratal.

Avtala við útleigaran
Útgangsstøðið er, at kommunan yvirtekur leigumálið í nr. 17 á somu treytum sum í verandi leigusáttmála, eitt nú viðvíkjandi leigu, leigubroytingum, rakstrarútreiðslum og viðlíkahaldi.

Hvussu yvirtøkan verður skipað í verki, skal avtalast nærri millum Landsverk, kommununa og útleigaran.

Innbúgv
Kommunan yvirtekur tað innbúgvið, sum er keypt serliga til hølini í nr. 17. Hetta fevnir eitt nú um gardinur, skáp, the-køkar, talvur og skíggjar á veggjunum og annað innbúgv, sum partarnir semjast um. Gjørt verður serstakt yvirlit yvir tað, sum verður yvirtikið. Prísurin fyri hetta verður avtalaður fyri seg millum Landsverk og kommununa.

Endalig avtala
Ein endalig avtala er treytað av góðkenning frá Vinnumálaráðnum, Tórshavnar kommunu og útleigaranum

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				

Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar	**x**			

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin, leiðarin á bygningsdeildini og leiðarin á sosialu deild, mæla fíggjarnevndini til at samtykkja fylgjandi:

- At samtykkja at Sosiala deild yvirtekur verandi leigusáttmála frá Landsverk av bygninginum Yviri við Strond 17 galdandi fram til 1. februar 2033, við teimum tillagingunum sum eru nevndar omanfyri

- At beina málið í býráðið

- At leggja fyri fíggjarnevndina aftur til kunningar, tá ískoytissáttmálin er góðkendur av øllum pørtum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum, vegna høgan leigukostnað, men mælir til at sosiala deild fær góðar umstøður í einum bygningi sum kommunan eigur og um tað ikki ber til, so at kommunan byggir virðilig hølir beinanvegin.

302/26 Sethúsaútstykking í Kirkjubø - 24/01748

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin	22.09.2025	16/25	25/08465-1
10 Býráðsfundur	19.11.2026	302/26	25/08465-1
11 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin			25/08465-1
2 Byggi- og býarskipanarnevndin	21.11.2025	184/25	25/08465-1
3 Býráðsfundur	11.12.2025	276/25	25/08465-1
4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin	03.03.2026	2/26	25/08465-1
5 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin	11.06.2026	6/26	25/08465-1
6 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin	07.09.2026	18/26	25/08465-1
7 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	224/26	25/08465-1
8 Tekniska nevnd	02.11.2026	113/26	25/08465-1
9 Fíggjarnevndin	11.11.2026	218/26	25/08465-1

Upprunin til málið
Staðbundna nevndin fyri Velbastað og Kirkjubø heitir á kommununa um at fáa sett á skrá sethúsaútstykking í Kirkjubø. Víst verður til upprunaligu málslýsingina fyri málið j. nr. 25/08465-2, *"Uppruna málslýsing_Sethúsaútstykking í Kirkjubø_24_01748"*.

Lýsing av málinum
Tað er samtykt í Byggi- og býarskipanarnevndini 03.06.2024, at umsitingin ger yvirskipað uppskot til hvussu útstykking kann skipast á matr. nr. 201a. Men grundað á manglandi tilfeingi,
so hevur umsitingin ikki havt neyðugu orkuna at lyfta málið enn, tí aðrar uppgávur hava verið raðfestar.

Lógir, ásetingar o.a.
Matr. nr. 201a liggur í byggisamtyktini fyri Kirkjubø sum B-øki, sum er ætlað bústaðarbygging.

Upplýsingar frá umsitingini
Mál nr. 25/01100, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590, hevur ligið til hoyringar í tíðarskeiðinum 22. november 2024 til 29. januar 2025. Kommunan hevur móttikið fleiri viðmerkingar/mótmælir, og er viðgerðin av innkomnu viðmerkingunum enn ikki endaliga liðug, men verður málið lagt fyri staðbundnu nevndina til kunningar, tá viðgerðin er liðug.

Á borgarafundi í Kirkjubø, í samb. við hoyring av byggisamtyktini, gjørdu borgarar í Kirkjubø vart við, at teir ynskja at størri partur av haganum fram við Ovara vegi verður lagdur av til bústaðarlendi. Hetta somuleiðis við tí endamálið at stykkja út til fleiri sethúsastykkir.

Á borgarafundinum kom somuleiðis týðuliga fram, at tað ikki er semja millum borgarnar hvørs teir ynskja fleiri sethúsaútstykkingar ella ikki.
Tó kann vísast til mál nr. 25/04052, Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø, sum er mál, har stabundan nevndin fyri Kirkjubø vísir á týdningin av at raðfesta fleiri sethúsastykkir í Kirkjubø. Sí j.nr. 25/04052-1, *"Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø".*

Umsitingin ynskir at raðfesta málið, so skjótt stundir er til tess.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
24/01748 Sethúsaútstykking í Kirkjubø
25/04052 Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐

Skjøl

j.nr. 25/04052-1, *"Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø"*
j.nr. 25/08465-2, *"Uppruna málslýsing_Sethúsaútstykking í Kirkjubø_24_01748"*

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Kunnað verður um málið.

Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 22. september 2025: Kunnað varð um málið. Arbeitt verður víðari við broyting av byggisamtyktini.

Ískoyti:
Umsitingin hevur gjørt uppskot til, hvar byggjast kunnu fleiri sethús í bygdini.
Sí j.nr. 25/08465-4, *"Sethúsaútstykking í Kirkjubø"*

Økið í Geilini verður mett at vera væl egnað til útstykking. Frammanundan er lagdur breiður vegur í sambandi við undanfarnu útstykking omanvfyri vegin, og tí verður mett, at tað er skilagott at útbyggja á óbygda økið niðan fyri vegin. Talan er um eitt øki á um 2.464 m², sum rúmar sambært tekningini 5 grundstykkjum á uml. 435 m². Á tílíkum stykkjum kunnu byggjast hús á uml. 130 m² í grundarvídd.

Økið í Lágabø verður somuleiðis mett væl egnað til útstykking. Í hesum økinum verður mælt til, at leingja verandi veg, soleiðis at pláss fæst til seks "ella fleiri" grundstykkir á uml. 435 m² hvørt framvið vegnum. Grundstykkjavíddin loyvir húsum á uml. 130 m² í grundarvídd. Framvið verandi vegi er somuleiðis møguligt at gera tvey grundstykkir, eitt niðanfyri vegin og eitt omanfyri vegin.

Omanfyri Ovaraveg er somuleiðis møguligt at útstykkja eini seks grundstykkir á uml. 414 m² við húsi á uml. 130 m² í grundarvídd. Samlaða víddin er 4.160 m². í hesum økinum verður tó mælt til, at verandi vegur verður breiðkaður, soleiðis at hann gerst betur atkomuligur.

Sí viðhefta skjalið: j.nr. 25/08465-4, *"Sethúsaútstykking í Kirkjubø"*

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin skal vísa á, at eingi av nevndu lendum eru kommunal, og tískil verður neyðugt at fara undir samráðingar við Búnaðarstovuna, um støða verður tikin til at fara undir at útstykkja í Kirkjubø.

Einasti festari, sum er hoyrdur í hesum málinum, er Dorthea Winther, sum varðar av matr. nr. 21a (Økið í Geilini). Sonur hennara, sum eftir ætlan skal yvirtaka festi frá mammuni, hevur víst á ynski at byggja bóndahús á økinum.
Sambært galdandi byggisamtykt liggur økið í økisásetingini B, sum er ætlað sethúsum. Hetta merkir, at sambært verandi byggisamtykt, er ikki loyvt at byggja bóndahús á økinum.

Grundin til, at allir festarar ikki eru hoyrdir í hesum málinum er, at hetta einans er uppskot til møguligar sethúsaútstykkingar. Staðsetingarnar eru valdar út frá einum býarskipanarligum vinkli, og við tí í huga, hvar tað gevur bestu meining at útstykkja til fleiri sethús í bygdini.

Alt eftir hvat politiski viljin er í mun til at útstykkja til fleiri sethús, so verða Búnaðarstovan og festarin tikin við í tilgongdina.

Skjøl
j.nr. 25/04052-1, *"Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø"*
j.nr. 25/08465-4, *"Sethúsaútstykking í Kirkjubø"*

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til,
- at støða verður tikin til, um farast skal víðari við ætlanini at útstykkja til fleiri sethús í Kirkjubø,
- og um tað verður samtykt at fara víðari við málinum, at tikið verður undir við at byrjað verður við økinum í Geilini.
- og at málið verður beint í staðbundnu nevndina fyri Velbastað og Kirkjubø til kunningar.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið beinleiðis í býráðið.

Býráðsfundur 11. desember 2025: Kári Johansen legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd. Broytingaruppskotið fall við átta atkvøðum ímóti og fimm atkvøðum fyri.

Atkvøddu fyri: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

Atkvøddu ímóti: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið, nágreinandi at økið, ið útstykkingin fevnir um, er á síðu 5 í fylgiskjali 3. Málið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 03. mars 2026: Kunnað varð málið.

Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 11. juni 2026: Kunnað varð um málið og at arbeitt verður víðari við verkætlanini við sethúsaútstykking í Geilini.

Ískoyti:
Tilfeingi er ikki sett av til verkætlanina, og bíðað verður somuleiðis eftir byggisamtyktarmálinum.

Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 07. september 2026: Kunnað varð um málið.

Ískoyti
Býráðið samtykti 11. desember 2025, at arbeiðast skuldi víðari við eini útstykking í Geilini.

Fyri at fara víðari við útstykkingini, verður neyðugt at avgreiða ymisk viðurskifti, harímillum:
- fara í samráðingar við festaran og Búnaðarstovuna um keyp av lendinum til bústaðarbygging
- fáa útstykkingina prosjekterað og síðani bjóða hana út.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Tá ið nýggj bústaðarbygging í Kirkjubø verður løgd til rættis, eigur varðveitsla av bygdarmyndini at vera ein grundleggjandi fortreyt. Kirkjubøur hevur eina serstøðu í føroyskari søgu og mentan, og sambandið millum fornu bygningarnar, búsetingina, landbúnaðin og landslagið er ein týðandi partur av hesum virði. Tí má framtíðar menning byggja á eina heildarmeting av, hvussu nýggj hús og neyðug undirstøðukervi kunnu fáa pláss, uttan at søguligi og landslagsligi samanhangurin viknar.

Byggingin í bygdini vísir, hvussu tilfar, snið og staðseting kunnu laga seg eftir umhvørvinum. Flagtekjur, grundir úr gróti og málaður ella tjøruborin timburklædningur eru eyðkenni, ið hava stóran týdning fyri heildardámin. Hesi eyðkenni eiga eisini at vera leiðbeinandi fyri nýggja bygging. Tað merkir ikki, at nýggj hús skulu vera eftirgerðir av eldri húsum, men at tey í stødd, útsjónd og tilfarsvali skulu hava eitt greitt samband við staðbundna byggisiðin.

Ynskið um at skapa fleiri bústaðir og geva fleiri fólkum møguleika at seta búgv í Kirkjubø eigur somuleiðis at verða vigað upp ímóti teimum broytingum og avleiðingum, sum nýggj bygging kann hava við sær. T.d hevði íbúðarbygging broytt bústaðarmynstrið munandi. Størri húsakroppar og øktur byggitættleiki kunnu ávirka bæði útsýni, rúmlig viðurskifti og sambandið millum húsini og landslagið. Ynskið um at fáa fleiri tilflytarar til bygdina er tí ikki í sjálvum sær eitt nøktandi grundarlag fyri at velja hesa bygging.

Ein víðfevnd bústaðarbygging hevði eisini sett nýggj krøv til almennar tænastur og undirstøðukervi. Fleiri íbúgvar økja tørvin á skúla- og dagstovnaplássum og krevja broytingar í atkomu, ferðslu og parkering. Somuleiðis ávirkar ein víðfevnd bústaðarbygging í bygdini bygdina sum landbúnaðarbygd, og tí er tað eisini av alstórun týdningi, at landbúnaðurin ikki missir sítt grundarlag, hóast fleiri bústaðir verða bygdir.

Lendisviðurskiftini eiga at vera avgerandi fyri, hvussu útstykking verður skipað. Hús og vegir skulu staðsetast soleiðis, at tørvurin á grevstri, uppfylling og øðrum lendisbroytingum verður so lítil sum gjørligt. Samstundis skulu grøn og óbygd øki hava eina greiða støðu í ætlanini, bæði sum frílendi og sum partur av samanhanginum millum byggingina og landslagið.

Umsitingin hevur havt fund við festaran um møguliga bygging í Geilini.
Festarin hevur víst áhugað fyri at selja ein part av jørðini til bústaðarbygging, men eru ongar ítøkiligar samráðingar framdar í núverandi støðu.

Í eini nýggjari útstykking í Geilini verður mælt til, at grundstykkini verða umleið 300 m², og sostatt munandi minni enn onnur grundstykki í Kirkjubø. Tilmælið byggir á eina meting um, at lendisnýtslan eigur at avmarkast mest møguligt, tí tøkt lendi er avmarkað, og jørðin er serliga góð og virðismikil fyri festararnar í bygdini. Harumframt verður mett, at grøna og vakra umhvørvið í Kirkjubø minkar um tørvin á stórum privatum havum kring einstøku bústaðirnar.

Verandi sethús í Geilini eru harumframt góð dømi um, hvussu nútímans bústaðir kunnu lagast til bygdarmyndina. Flagtekjur, grundir úr gróti ella betongi, sprossavindeygu og myrkur timburklædningur geva húsunum eina útsjónd, sum fellur væl inn í umhvørvið. Við støði í hesum verður mett, at hóvlig sethúsabygging er mest hóskandi framhald av verandi búseting í økinum.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei
Fyri at fara undir at prosjektera eina nýggja sethúsaútstykking í Geilini, verður mælt til, at játtaðar verða kr. 600.000 til keyp av lendi, prosjektering fram til útboð, verkætlanarleiðslu osfr.

Játtan:

Vanlig játtan	☒
Eykajáttan	☐
Loka verkætlan	☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	Verk-ætlan	Navn	Deild	Verk-ætlan	Navn	Nýggj verkætlan	Upphædd

6275	LK62998	Fríðkan, bygdir og økir	6475	Byggibúning bústaðir (íløgur)		Útstykking í Geilini í Kirkjubø	600.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	-
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2027-2029
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	-

Tilmæli
Tekniski stjóri, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at:

- verkætlanarleiðari verður settur at stýra verkætlanini.
- umsitingini verður heimilað at fara í samráðingar við festaran og Búnaðarstovuna um keyp av lendinum, partur av matr. nr. 21a, og tá semja er millum partarnar, at keypið verður avgreitt.
- útstykkingin verður boðin ráðgeva at prosjektera fram til útboð, og prosjekteringin verður sett í verk.
- játtaðar verða kr. 600.000 av kt. 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur), løgukarmi LK62998, Fríðkan, bygdir og økir, á nýggja verkætlan "Útstykking í Geilini í Kirkjubø" undir kt. 6475 Byggibúning bústaðir (íløgur).
- málið verður beint í teknisku nevnd og staðbundnu nevndina fyri Kirkjubø/Velbastað til kunningar.
- málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen ger vart við, at viðmerkingar frá staðbundnu nevndini vanta í málinum.

Tekniska nevnd 02. november 2026: Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, fyrr enn festarin fyrst verður hoyrdur, áðrenn farið verður í holt við at nýta pening til verkætlanina.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, fyrr enn festarin fyrst verður hoyrdur, áðrenn farið verður í holt við at nýta pening til verkætlanina.

303/26 Vegatkoma til útstykking í Innibø, Kollafjørður

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	219/26	26/08162-1
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	219/26	26/08162-1
3 Býráðsfundur	19.11.2026	303/26	26/08162-1

Upprunin til málið
Í sambandi við at politiskt ynski er um at raðfesta bústaðarbygging í Kollafirði, so varð avtala millum festara í Innibø og kommununa undirskrivað í 2023, har kommunan yvirtók part av matr. nr. 107a omanfyri ítróttarhøllina til bústaðarbygging. Sí avtaluna í skjal nr. *23/02421-16, Fyribilsavtala millum Gunnvør D. Jensen og TK ísv. Sjóvarhaga - undirskrivað 19-12-2023*.

Lýsing av málinum
Ynski er at raðfesta fleiri bústaðarøkir í Kollafirði, og fyri at fáa atkomu til yvirtikna økið oman fyri ítróttarhøllina í Kollafirði, matr. nr. 107a, er neyðugt at keypa part av matr. nr. 156a, Kollafjørður, sum er privat ogn.

Stjórnarskrivstovan hevur verið í sambandi við eigaran av matr. nr. 156a, sum er sinnað at selja kommununi lendi til atkomuveg til ætlaðu útstykkingina í Innibø. Stjórnarskrivstovan hevur sent eigaranum eitt treytað skeyti um keyp av umleið 1472 fermetrum av lendi til vegatkomu, sum skal frábýtast høvuðsognini matr. nr. 156a, Kollafjørður. Sí skjal 25/07197-30 "*Treytað skeyti um keyp av parti av matr.nr. 156a, Kollafjørður*".

Lógir, ásetingar o.a.
Matr. nr. 51-107a liggur í almennu byggisamtyktini fyri Kollafjørð í umráðispartinum A1, sum ásetur:

> *1. Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.*
>
> *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*
> *2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu*

Matr. nr. 51-156a liggur í almennu byggisamtyktini fyri Kollafjørð í umráðispartinum 4. grundumráðið, sum ásetur:

> *1. 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*
> *2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt trøða- og jarðarbrúk at gera.*

Upplýsingar frá umsitingini
Neyðugt verður at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at alt økið liggur í sama umráðisparti í almennu byggisamtyktini. Sostatt verður mælt til, at matr. nr. 51-107a omanfyri ítróttarhøllina og matr. nr. 51-156a verða broyttir til umráðispart A4 í almennu byggisamtyktini fyri Kollafjørð.

Ásetingarnar fyri A4 í 3. grundumráðið eru soljóðani:
1 Umráðisparturin verður lagdur til opna/lága bústaðabygging.
Byggivaldið kann geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyrir býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2 Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Við hesi áseting kann byggjast meiri fjølbroytt, bæði sethús, íbúðir og raðhús, sum í vavi eru at líkna sethúsabygging.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
23/02421: "*Framtíðar byggilendi í Kollafirði*"
25/06231: "*Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624*"

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Stjórnarskrivstovan
Stjórnarskrivstovan hevur verið í sambandi við eigaran at matr. nr. 156a, sum er sinnað at selja kommununi lendi til atkomuveg til ætlaðu útstykkingina í Innibøi. Stjórnarskrivstovan hevur sent eigaranum eitt treytað skeyti um keyp av umleið 1472 fermetrum av lendi til vegatkomu, sum skal frábýtast høvuðsognini matr. nr. 156a, Kollafjørður.

Kommunan hevur arbeitt við at útvega lendi til bústaðarætlanir í Kollafirði, í hesum føri ávikavist í Norðreki og í Innibø. Ein avbjóðing við hesum keypum og ein grundleggjandi fortreyt fyri at fremja slíkar ætlanir er, at ein nøktandi vegatkoma er til staðar til ætlaðu bústaðarbyggingina, og at kostnaðurin av henni verður tikin við í samlaðu fíggjarligu metingina.

Í sambandi við ætlaðu útstykkingina í Innibø hevur kommunan verið í samráðingum við eigaran av matr. nr. 156a, Kollafjørður, um keyp av lendi til atkomuveg.

Í hesum føri er tørvur á at fáa atkomu til útstykkingina umvegis privata ogn, ið eisini hevur avmarkað samráðingarmøguleikarnar hjá kommununi.

Viðvíkjandi matr. nr. 156a hevur kommunan umbiðið eina virðismeting frá ognarmeklara, ið vísir ein fermetrakostnað á kr. 650 pr fermeturin. Viðmerkjast skal, at metingin fevnir um eitt størri lendisøki enn sjálvan ætlaða vegateigin og má nýtast við hesum fyrivarni.

Eigarin er sinnaður at selja neyðugt lendi til veg fyri kr. 750 fyri fermeturin. Hesin prísurin er umleið 15 prosent hægri enn miðalfermetraprísurin í virðismetingini.

Í málinum um útstykkingarøkið við matr. nr. 203c í Kollafirði er lendi keypt frá grannaognunum matr. nr. 308 og 309 við støði í einum fermetraprísi á 350 kr. Hetta er viðkomandi sum samanberingargrundarlag, men staðfestir tó ikki í sjálvum sær marknaðarvirðið á matr. nr. 156a. Viðmerkjast skal eisini, at munur er á staðseting, byggimøguleikum, og atkomu, men prísmunurin er tó viðkomandi at fáa lýst í hesum høpi.

Orsøk er til varsemi við at góðkenna ein keypspris, sum liggur oman fyri virðismetingina.

Um tað er ov trupult at tryggja atkomu til eitthvørt lendi, í hesum føri lendi í Innibø, eigur býráðið at sýna varsemi við at taka undir við einum lendiskeypi, har keypsprísurin liggur munandi oman fyri marknaðarvirðið, tí ein slík avgerð kann skapa óheppin fordømi, og harvið veikja samráðingarstøðuna hjá kommununi í framtíðini í Kollafirði viðvíkjandi lendiskeypi.

Eitt slíkt keyp kann ávirka prísvæntanirnar hjá øðrum jarðareigarum.

Hetta er ein møguligur marknaðar- og samráðingarvandi, sum eigur at verða tikin við í metingini.

Samstundis eigur avgerðin at byggja á samlaða kostnaðin og nyttuna av verkætlanini. Ein lægri fermetraprísur aðrastaðni er bert ein fyrimunur, um lendið eisini er tøkt, hóskar til endamálið, og kann fáa nøktandi atkomu og byggibúning á fíggjarliga ráðiligum grundarlagi.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐

Skjøl
23/02421-16: "*Fyribilsavtala millum Gunnvør D. Jensen og TK ísv. Sjóvarhaga - undirskrivað 19-12-2023*"

25/06231-53: "*20/26 Samtykt Kollafjarðarnevndin, 27.10.2026 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624*"
25/07197-10: "*Fundur við Connie Lassen tann 7. mai 2026- Um keyp av lendi til vegaatkomu*"
25/07197-20: "*Virðismeting frá Meklarinum*"
25/07197-24: "*Uppskot til lendiskeyp til atkomuveg til møguliga útstykking í Kollafirði - mál hjá TK 25/07197*"
25/07197-24: "*Atkomuvegur við gongubreyt á 2,0m*"
25/07197-25: "*Um TK hevur áhuga at keypa lendi til atkomuveg verður hetta fyri fyri kr. 1.973.000*"
25/07197-29: "*Fundur við Connie Lassen. Møguligt keyp av lendi til atkomuveg. Matr.nr. 156a, Kollafjørður.*"
25/07197-30: "*Treytað skeyti um keyp av parti av matr.nr. 156a, Kollafjørður*"
25/07197-33: "*Tillaga kort. Vegaloysn. Matr.nr. 156a. Connie Lassen.*"

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Deild**	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**	**Upphædd**
6175		Keyp og søla					Kr. 1.500.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	1.500.000
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026/2027
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	0

Tilmæli
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, fíggjarleiðarin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- at endalig keypsavtala verður gjørd við eigaran av matr. nr. 51-156a til gerð av atkomuvegi til útstykking í Innibø, Kollafjørður.
- at játtaðar verða kr. 1.500.000 av kt. 6175 *keyp og søla*, til lendiskeypið.
- at byggisamtyktin fyri matr. nr. 51-107a *(omanfyri ítróttarhøllina)* og matr. nr. 51-156a verður broytta til A4, opin/lág bústaðarbygging í Almennu byggisamtyktini fyri Kollafjørð.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
- at málið verður beint í staðbundnu nevndina á fyrst komandi fundi til kunningar

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við málinum.

Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Málið verður sent til staðbundnu nevndina við skrivligari kunning.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, mælir til at beina málið í staðbundnu nevndina og teknisku nevnd.

304/26 Trivnaðarøki í Kollafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Kollafjarðarnevndin	20.05.2025	13/25	25/03667-1
10 Fíggjarnevndin	11.11.2026	223/26	25/03667-1
11 Býráðsfundur	19.11.2026	304/26	25/03667-1
12 Kollafjarðarnevndin			25/03667-1
2 Kollafjarðarnevndin	13.11.2025	22/25	25/03667-1
3 Byggi- og býarskipanarnevndin	13.04.2026	95/26	25/03667-1
4 Byggi- og býarskipanarnevndin	01.06.2026	133/26	25/03667-1
5 Kollafjarðarnevndin	09.06.2026	9/26	25/03667-1
6 Fíggjarnevndin	10.06.2026	140/26	25/03667-1
7 Býráðsfundur	18.06.2026	202/26	25/03667-1
8 Býráðsfundur	17.09.2026	255/26	25/03667-1
9 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	229/26	25/03667-1

Upprunin til málið
Staðbundna nevndin í Kollafirði ynskir trivnaðarøki í Kollafirði og eitt borgarahús.

Staðbundna nevndin sigur:
Fyri at samla bygdirnar og økja um trivnaðin í økinum, manglar ein miðdepil – eitt torg og eitt borgarahús, sum stendur í sama stað. Hetta málið hevur undanfarna nevnd arbeitt nógv við og eru vit sera nøgd við miðstaðarætlannina, sum var løgd fram fyri nevndina seint í seinastu setu. Vit ynskja at arbeiðið skal fara í gongd beinanvegin.

Umsitingin kunnar um málið.

Kollafjarðarnevndin 20. mai 2025: Umrøtt. Nevndin mælir til, at kommunan ognar sær neyðugt øki í sambandi við miðstaðarætlanina fyri Kollafjørð.

Ískoyti
Kommunan er í samráðingum við eigararnar av lendinum.

Kunnað verður um málið.

Kollafjarðarnevndin 13. november 2025: Kunnað varð um málið.

Ískoyti:
Politiskt er ynski at koma í gongd við at menna eitt miðsavnandi uppihaldsøki í miðstaðnum í Kollafirði.

Ein heildarætlan fyri miðstaðin í Kollafirði er gjørd. Sí skjal nr. *25/03667, Heildarætlan Kollafjørður_mál nr. 25_02604.*

Miðsavningarøkið:
Á síðu 8 og 9 í Heildarætlanini verður miðsavningarøkið lýst. Ætlanin er, at gera eitt miðsavningarøki á grøna økinum beint vestan fyri grótbrúnna um Botnánna. Økið er kommunalt, og er áleið 1.835 m^2 til støddar og kann tískil rúma fleiri endamálum.

Her er talan um slættan, sum er á tí norðara áarbakkanum niðan móti fleiri almennum bygningum í bygdini. Mælt verður til, at økið verður skipað sum ein fløttur, so tað kann inntakast til alskyns felagstiltøk og hátíðarhald í bygdini.

Møguleikin er somuleiðis at skipa økið við eitt nú bálplássi, møguleikanum til konsertir o.a.

Lagt verður upp til, at Ormurin Langi frá gitna kvæðnum hjá Sjóvarbóndanum verður tema í økinum.

Harumframt skal lendisgøta gerast í økinum, soleiðis at økið kemur at hanga saman við kringliggjandi økjum, og soleiðis at økið kann brúkast til at ganga túrar í osfr.

Kommunan yvirtók lendið fyri nógvum árum síðani, men av tí at vetrarbitið ikki varð endaliga avgreitt, so verður neyðugt at fáa hetta avgreitt, samstundis sum økið verður planlagt, og áðrenn verkætlanin verður framd í verki.

Felagsveltan:
Á síðu 12 verður økið eystan fyri Vegin við Sjógv, partur av matr. nr. 107a, og innan fyri landsvegin, lýst sum eitt øki til felagsveltu, uppihald, nýtslu av ánni og gøtusamband inn undir brúnna og út á sandin.

Fyrr hevur hetta økið verið eitt virkið stað til eplavelting, har bøndur dyrkaðu eplir, ið vóru ein partur av okkara landbúnaðarligu siðmentan. Heildarætlanin leggur upp til, at økið skal gagnnýtast til felagsveltu, har fólk kunnu dyrka grønmeti og frukt. Við evt. at byggja felags vakstrarhús og gagnnýta jarðhitan frá hitakeldu í Kollafirði, kann tað gerast møguligt at dyrka serligar fruktir og grønmeti.

Felagsveltan hevur til høvuðsendamál at skapa samanhald millum borgararnar í bygdini, og skal felagsveltan røkka sínum deilendamáli um at fáa dyrkað jørðina aftur, so er tað týdningarmikið at virksemið er sjálvrikið. Tískil er týdningarmikið at fáa savnað fólk til veltuvirksemið, áðrenn bygging av vakstrarhúsum osfr. verður sett á breddan.

Heildarætlanin leggur somuleiðis upp til, at ein demningur verður gjørdur tvørtur um ánna, soleiðis áin gerst djúpari, og kann geva børnum møguleika at nýta hana til leik, sum til dømis við at byggja flaka ella nýta gummibát.

Hetta kann umframt at skapa gleði og ítróttarligt virksemi, eisini veita børnunum djúpari samband til náttúruna.

Økið er partur av festinum Sjóvarhagi, og tí skal avtala gerast við festaran, samstundis sum økið verður planlagt, og áðrenn nakað kann serast í verk á økinum.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Avtala má gerast við avvaraðandi partar, sum varða av lendunum. Inntil endalig avtala er fingin í lag við partarnar, verður lagt upp til, at økini verða planløgd, soleiðis at tað er púra greitt, hvat skal gerast á økjunum, tá endaligar avtalur er fingnar við avvarðandi partar.

Stjórnarstovan varðar av samráðingum við lendisánararnar, meðan Býarskipanardeildin varðar av planleggingini av økjunum.

Skjøl:
Skjal nr. 25/03667-4, Heildarætlan Kollafjørður_mál nr. 25_02604.

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	Verk-ætlan	Navn	Deild	Verk-ætlan	Navn	Nýggj verkætlan	Upphædd

6275	LK62060	Trivnaðarøki í Kollafirði	6275	L62060		Trivnaðarøki í Kollafirði	500.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	500.000
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	Kemur seinni

Tilmæli:
Kommunustjórin, teknisku stjóri og býararkitekturin mæla til:

- At taka upp samráðingar við avvarðandi partar, sum varða av lendunum, sum ætlanin er at inntaka til trivnað í bygdini.
- At miðsavningarøkið verður boðið út í sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi.
- At játtaðar verða kr. 500.000 til sniðkapping og eftirfylgjandi gerð av útboðstilfari av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til nýggja verkætlan undir kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026: Samtykt við tí nágreingin, at punkt eitt má avgreiðast, áðrenn farast kann víðari við málinum, og at tá punkt eitt er avgreitt, verður málið lagt fyri nevndina aftur.

Ískoyti:
Á seinasta fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini varð samtykt, at punkt 1 mátti avgreiðast, áðrenn farast kundi víðari við málinum, og at tá punkt 1 var avgreitt, skuldi málið leggjast fyri nevndina aftur.

Viðv. økinum vestan fyri grótbrúnna um Botnánna, partur av matr. nr. 107o.
Økið er kommunalt, og er áleið 1.835 m^2 til støddar. Kommunan hevur yvirtikið økið frá Sjóvarhaga í 1996, og kommunan er tískil eigari av lendinum, men hevur Ognarmørkin rætt til bit á hesum lendi. Ognarmørkin skal tískil endurgjaldast fyri missin av hesum biti, og hevur fundur verið við Ognarmørkina hesum viðvíkjandi. Enn er eingin endalig semja funnin, men hevur Ognarmørkin játtað, at kommunan kann fara undir sniðkapping av økinum.

Tó Ognarmørkin hevur rætt til bit á lendinum, so kann Ognarmørkin ikki nokta kommununi at gera nýtslu av sínum ognarrætti á hesum matrikli. Mælt verður tí til, eisini hóast endalig semja um endurgjaldið enn ikki er avgreitt, at kommunan útskrivar sniðkapping av økinum.

Ein sniðkapping um, hvussu økið skal háttast, merkir ikki, at kommunan kemur at gera inntriv í økið. Fyrst skal fyriskipast ein sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi. Tað vil siga, at áðrenn nakað kann setast í verk í økinum, so verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir upp til fleiri ferðir. Ætlanin er at samráðast við Ognarmørkina, meðan sniðkappingin verður skipað, soleiðis at tá semja er viðv. endurgjaldinum fyri vetrarbit, so kann verkætlanin bjóðast út í heildararbeiðstøku.

Viðv. økinum eystan fyri Vegin við Sjógv, partur av matr. nr. 107a.
Økið er partur av sjóvarhaga festinum, og festarin er bjóðaður til fundar. Enn hevur fundurin ikki verið, hóast kommunan í fleiri umførum hevur sent fundarboð. Somuleiðis hevur Búnaðarstovan sent festaranum hoyringsvar um ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan frættir aftur frá Búnaðarstovuni, tá hoyringssvarið frá festaranum er komið.

Av tí at lendisviðurskiftini ikki eru endaliga avgreidd við festaran enn, so verður hesin parturin av heildarætlanini ikki settur í verk í núverandi løtu.

Hóast hesin parturin av heildarætlanini ikki verður settur í verk í núverandi støðu, so verður mælt til, at gonguleiðir út á Ósan verða raðfestar, tvs. at ein gonguleið undir landsvegin og út í Ósan og ein gonguleið um brimgarðin, soleiðis at gerst lættari hjá borgarum at koma til økið og gera gagn av tí.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
6275	LK62060	Trivnaðarøki í Kollafirði

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
6275	L62060		Trivnaðarøki í Kollafirði

Upphædd
500.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	500.000
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	Kemur seinni

Tilmæli:
Kommunustjórin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til:

- At miðsavningarøkið á matr. nr. 107o verður boðið út í sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi.
- At gonguleiðir verða gjørdar út á Ósan, herundir at arbeiðini verða boðin út og sett í verk
- At játtaðar verða kr. 500.000 til sniðkapping, gerð av útboðstilfari til Trivnaðarøkið og gonguleiðir til Ósan av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til nýggja verkætlan undir kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó skal nágreinast undir punkt 2, at tað er gonguleiðin umvegis brimgarðin.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

Kollafjarðarnevndin 09. juni 2026: Málið varð umrøtt.

Fíggjarnevndin 10. juni 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við byggi- og býarskipananevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

Býráðsfundur 18. juni 2026: Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í nevnd, ið fall við seks atkvøðum fyri, seks ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Heidi Lava Elgeirsdóttir, har skotið verður upp, at tikið verður undir við tilmælinum við teirri broyting, at 300.000 kr. verða játtaðar afturat á løgukontu 6275 til gonguleið undir landsvegin og træbrúgv um Botnánna í samráð við Landsverk, ið varar av lendinum, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi:Heðin Mortensen.

Anja Weyhe luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Ískoyti:
Til kunningar skal upplýsast, at Anja Weyhe luttók ikki í viðgerðini av málinum ella í atkvøðugreiðsluni. Jón Kragesteen luttók í viðgerðini av málinum og í atkvøðugreiðsluni. Av misgáum er navnið hjá Anju Weyhe skrivað í gerðabókina sum luttakandi í atkvøðugreiðsluni, og ikki navnið hjá Jón Kragesteen. Hetta er tíverri ein feilur í gerðabókini, og verður býráðið biðið um taka hesa kunning til eftirtektar.

Býráðsfundur 17. september 2026: Tikið til eftirtektar.

Ískoyti:

Býráðsfundur 17. september 2026: Tikið til eftirtektar.

Ískoyti:
Verkætlan við Ósan:
Í juni varð samtykt, at gonguleiðir verða gjørdar út á Ósan, herundir at arbeiðini verða boðin út og sett í verk. Arbeiðini vórðu boðin alment út 24.09.2026 umvegis útbjóðingarportalin. Tá freistin var farin 05.10.2026 var eittans tilboð móttikið frá fyritøkuni Hjálpirót.

Talan er um eina arbeiðstøku við hesum fylgjandi undirátøkum:

1. Trappa við rekkverki og hondlista upp á grótkastið á innaru síðu í eystasta horninum á bátahylsøkinum.
2. Trapputrin sett inn í grótkastið á ytru síðu við rekkverki og hondlista.
3. Ljósseting á gonguleið yvir um grótkastið.
4. Ljóssett smoga norður um bingjurnar á vælveruøkinum.
5. Ljóðdoyvandi runnavøkstur undir høvuðsvegnum við vælveruøkið.
6. Niðurgrivin el-kaðal frá SEV skápinum við undirkoyringarbrúnna, og yvir til gonguleiðina upp um grótkastið við vælveruøkið.
7. Stoypt gonguleið í Botnánni undir vegin við ósan á Botnánni við rekkverki og hondlista

Tilboðið var áljóðandi **kr. 715.991,43** u/mvg.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við tilboðsveitaran fyri at lækka prísin nakað, og eru partarnir vornir samdir um at skipa verkætlanina soleiðis, at skjótast gjørdu átøkini (1-6) verða gjørd fyrst niðri í bátahylsøkinum. Hetta veri seg átøk, sum kunnu setast í gongd í næstum.

Kostnaðarmiklasti parturin av hesi ætlanini er pkt. 7. – (Gonguleiðin í sjálvari ánni undir høvuðsvegnum). Her skal prosjekterast nakað fyri at finna eina haldbara loysn, sum kann byggjast á ein fíggjarliga skynsaman hátt.

Landsverk, sum eigur høvuðsvegin, hevur harumframt sett treytir til, hvussu byggjast kann undir vegnum, umframt at náttúrufriðingarnevndin eisini skal góðkenna loysnina.

Sostatt skal hesin parturin leggjast væl til rættis, og verður hann tískil seinasta punktið á arbeiðsætlanini.

Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðstøkuna, eftir ymsar tillagingar, er nú mettur til kr. **615.991,43** u/mvg.

Samanlagt vil arbeiðstøkan kosta kommununi áleið kr. 720.000 svarandi til tilboðskostnað íroknað kommunalt mvg og 10% óvæntaðar útreiðslur. Arbeiðstøkan verður goldin av áður játtaðu játtan á L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.

Hjálpirót fer undir arbeiðið í seinastu viku í oktober, og verður arbeiðið eftir ætlan liðugt um mánaðarskiftið mars/apríl 2027.

Verkætlan við miðsavningarøkið, matr. nr. 107o:
Í juni varð somuleiðis samtykt, at miðsavningarøkið á matr. nr. 107o verður boðið út í sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi.

Sniðkappingin íroknað prosjektering, fram til útboð varð boðin út til tvær ráðgevarafyritøkur 12.10.2026. Tá freistin 23.10.2026 var farin, høvdu báðar ráðgevarafyritøkurnar bjóðað upp á arbeiðið, og lægsta tilboðið fyri arbeiðið var áljóðandi kr. 244.000 u/mvg.
Samanlagt vil ráðgevingin kosta kommununi áleið kr. 325.000 svarandi til tilboðskostnað íroknað kommunalt mvg og 25 % óvæntaðar útreiðslur.

Tað var ráðgevarafyritøkan EYA, sum vann útboðið, og verður eftir ætlan nú farið undir at sniðgeva miðsavningarøkið endaliga, umframt at gera ítøkiligt útbjóðingartilfar til heildararbeiðstøku. Útbjóðingartilfarið til heildararbeiðstøkuna verður eftir ætlan liðugt 23. januar, og verður endaliga uppskotið til skipan av økinum tá lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina til endaliga støðutakan. Síðani verður arbeiðstøkan boðin út í heildararbeiðstøku.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Upplýsast skal, at Náttúrufriðingarmyndugleikarnir eru kunnaðir um báðar verkætlanirnar, og verða umsóknirnar sostatt viðgjørdar í hesum døgum.

Viðv. avtalu um lendið:
Samráðingar hava verið við avvarandi partar, sum hava boðað frá, at teir hava krøv, sum ikki eru avgreidd í samband við mist vetrarbit vegna kommununnar keyp av matr 107o. Hesar samráðingar eru enn ikki komnar á mál. Mett verður ikki, at samráðingarnar koma á mál í næstum, uttan at farið verður víðari við málinum um rættarskipanina.
Av tí at tað er mótparturin, sum ikki vil góðtaka uppskotið frá Tórshavnar kommunu um avgreiðslu av viðurskiftunum, og tí at viðurskifti í samband við avgreiðslu av endurgjaldi fyri mist vetrarbit ikki hava ávirkan á ognar- og nýtslurættin hjá kommuni av matrikli 107o, verður mett, at Býráðið eigur at sleppa áður gjørdum samtyktum um at hesi viðurskifti skulu avgreiðast áðrenn kommunan kann fara undir at fremja arbeiði á matriklinum. Mett verður ikki, at hetta broytir støðuna hjá mótpartinum í mun til at fáa troytt galdandi møguleikar fyri at fáa aðrar loysnir fyri endurgjaldi fyri mist vetrarbit.

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei
Í juni játtaði býráðið kr. 800.000 til arbeiðini.

Í mun til at fáa sett ferð á at nágreina og fremja ætlanirnar at gera trivnaðarøkið á matrikkul nr. 107o verður mett, at av tí at heildarætlan longu er gjørd og samtykt fyri økið kann býráðið innanfyri verandi íløgukarm áljóðandi 8.200.000 kr heimilað Byggi- og býarskipanarnevndini at góðkenna verkætlanina og ítøkiligu átøkini, sum verða bjóðað út sum úrslit av sniðarbeiðinum, og at nevndin í hesum sambandi fær heimild at heimila umsitingini at gera sáttmála ella sáttmálar í samband við at fáa framt verkætlanirnar.

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:		
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**
6275	LK62060	Trivnaðarøkið í Kollafirði

Játtast á:			
Deild	**Verk-ætlan**	**Navn**	**Nýggj verkætlan**
6275	L62060	Trivnaðarøkið í Kollafirði	

Upphædd
325.000

6275	LK62060	Trivnaðarøkið í Kollafirði	6275	L62060	Trivnaðarøkið í Kollafirði		7.875.000

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	9.000.000
Áður játtað	Upphædd:	800.000
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026-2027
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	500.000

Tilmæli:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til:

- at heimila umsitingini at gera sáttmála við EYA Arkitektar um sniðgeving íroknað prosjektering fram til útboð av trivnaðarøkinum á matr. nr. 107o, og at játtaðar verða 325.000 kr til ráðgevingina av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- at byggi- og býarskipanarnevndin verður heimilað endaliga at heimila umsitingini at gera sáttmálar við arbeiðstakarar um innkomin tilboð í samband við útboð av arbeiðum á økinum og í hesum sambandi at leysgeva kr 7.875.000 av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- at heimilað verður, at arbeitt verður á matr. 107o í Kollafirði uttan mun til óavgreidd viðurskifti við yvirliggjandi haga í sambandi við mist vetrarbit.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
- málið verður beint í staðbundnu nevndina til kunningar.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen ger vart við, at óloysta vetrarbitið hevur fíggjarligan áhuga fyri móttakaran, tískil vísir hann á gegnisspurningin hjá forkvinnuni, men tekur undir við at fáa trivnaðarøkið sett í verk skjótast gjørligt, og tekur undir við tilmælinum.

Anja Weyhe ger vart við, at Bergur hevur fingið í boði, at nevndin kann atkvøða um ógegnið.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

305/26 Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 5.2

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	221/26	26/04091-1
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	220/26	26/04091-1
3 Býráðsfundur	19.11.2026	305/26	26/04091-1

Upprunin til málið
Útstykkingin oman fyri Argjahamar er liðug, og skulu lendini lutast út til bygging. Útstykkingin fylgir heildarætlanini, sum varð gjørd fyri útstykkingina, sí skjal nr. *26/04091-3, Verkætlanarlýsing ÚOA - 11apr2025_compressed (1).pdf* og *26/04091-4, UOA Yvirlitskort matriklar 110526.pdf*.

26. januar 2023 samtykti býráðið í máli nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging*, at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging.

Síðani eru fleiri øki boðin út og verkætlanir settar í gongd. Talan er m.a. um øki til raðhús, íbúðir, almennan bústovn og leiguíbúðir. Í sambandi við framhaldandi menningina av útstykkingini er ynskiligt at fara undir at fyrireika írestandi øki til útbjóðing til bygging av vinnuhølum og bústøðum.

Lýsing av málinum
Hetta málið snýr seg um at fáa heimild til at bjóða øki 5.2 út til bygging av raðhúsum. Sí skjal nr. *26/04091-2, Kort*, sum vísir økið 5.2.

Økið er ætlað til bygging av raðhúsum.
Við hesum verður miðað eftir at skapa fjølbroyttar bústaðarmøguleikar í økinum og at stuðla undir eina góða og samanhangandi bústaðarútbygging oman fyri Argjahamar.

Lógir, ásetingar o.a.
Øki 5.2 er fevnt av ásetingunum fyri øki E í serstøku byggisamtyktini fyri Argjahamar. Økið verður lagt av til:

- raðhúsabygging,
- raðhúsastykkir, sum skulu vera í minsta lagi 200 m² til støddar,
- bygging, sum skal verða sett samsvarandi einari góðkendari heildarætlan fyri økispartin,
- eitt mest loyvt byggistig á 0,35,
- eitt mest loyvt nýtslustig á 1,05,
- bygging í mesta lagi í 3 hæddum,
- bygging við mønutekju, sum er javnfjar við vegin, har niðasta hædd skal vera undir veghædd,
- eina mest loyvda hædd á 9 m til hægsta punkt við útvegg og 10,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd,
- og aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging, sum skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Harumframt skulu vegir, parkering og byggisnið skipast sambært ásetingunum í serstøku byggisamtyktini og í samráð við byggimyndugleikan.

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin ger vart við, at dentur verður lagdur á, at bústaðirnir koma teimum til góðar, sum hava veruligan tørv á bústaði.

Í hesum sambandi verður útbjóðingin skipað soleiðis, at mennari í tilboðnum skal upplýsa endakostnaðin á bústaðareindunum, og Tórshavnar kommuna samskipar útlutan av bústaðareindunum sambært reglugerð fyri útlutan av raðhúsum, sí skjal nr. *26/04091-5, Reglugerð fyri útlutan av raðhusum*. Endamálið við at bjóða byggingina út við ynski um ein endakostnað á bústaðareindunum er at tryggja, at bústaðirnir verða tillutaðir borgarum uttan kappbjóðing, sum er við til at hækka endakostnaðin. Harumframt er endamálið og ynski, at mennari byggir bústaðareindirnar fyri so lágan byggikostnað sum møguligt, tó uttan at góðskan verður niðurraðfest á eitt ónøktandi støði.

Harumframt verður bústaðarskylda ásett á byggingina, soleiðis at bústaðirnir verða nýttir til bústaðarendamál. Bústaðarskyldan verður tinglýst sum byrða á skeytið fyri ognina.

Tilboðini skulu lúka krøvini í útbjóðingartilfarinum. Við meting av tilboðunum verður dentur lagdur á hesar tríggjar metingartættir. Raðfylgjan vísir ikki eina raðfesting:

- Prísstøðið fevnir um endaligan søluprís fyri hvørja bústaðareind.
- Byggilist og økisskipan fevnir um byggilistarliga dygd og byggilistarligt fjølbroytni, tillaging til staðbundin viðurskifti og nærumhvørvi og skipan av bygningum og fríøkjum.
- Bústaðarskipan fevnir um støddd og samanseting av bústaðareindunum umframt býtið millum eigaraviðurskifti á bústøðunum.

Umsitingin hjá kommununi stendur fyri at gera heildarmeting av innkomnu tilboðunum og leggur tilmæli fyri býráðið um, hvørjum tilboði mælt verður til at taka av.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Mál nr. 22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Umsitingin hevur sent avvarðandi deildum í Teknisku fyrisiting málið til ummælis, og verða møguligar viðmerkingar tiknar við í framhaldandi tilgongdina.

Tekniska deild og Byggimálsdeildini hava somuleiðis fingið sendandi ítøkiligan fyrispurning um heimildina til at seta treytir um regnvatnsseinking og bilfría túnagøtu, og um hvussu tryggjast kann, at treytirnar í útboðstilfarinum verða fylgdar í byggimálsviðgerðini.

Søguliga hevur kommunan í fleiri førum ásett byggiregulerandi ásetingar sum tinglýstar byrður. Síðani byggisamtyktirnar komu í 1970'unum, hevur kommunan so líðandi í størri mun brúkt byggisamtyktir heldur enn tinglýstar byrður sum høvuðsamboð til byggiregulerandi ásetingar.

Byggimálsdeildin viðmælir, at byggiregulerandi ásetingar sum heild verða ásettar í byggisamtykt. Hetta fyri at tryggja, at byggiregulerandi ásetinagr sum heild verða savnaðar á einum almennum stað (í byggisamtykt), heldur enn at verða partvíst í byggisamtykt og partvís aðrastaðni (t.d. í tinglýstum skjølum).

Har talen er um kommunalt lendi og broytan av byggisamtykt ikki er skynsom, kunnu byggiregulerandi ásetingar ásetast sum tinglýstar byrður á ognina. Hetta kann t.d. hugsast at vera viðkomandi, tá talan er um teknisk viðurskiftir, ella um viðurskiftir, sum koma til kunnleika seint í verkætlanartilgongdini.

Um tað er ynskiligt at gera byggiregulerandi ásetingar um t.d. regnvatnsseinking og bilfría túnagøtu í kommunalum útstykkingum Oman Argjahamar, og um tað ikki verður mett skynsamt at broyta byggisamtyktina, mælir byggimálsdeildin til, at slíkar ásetingar verða lýstar í eini deklaratión, sum verður tinglýst á ognirnar, áðrenn ognirnar verða seldar. Upprit til deklaratión kann verða partur av útboðstilfarinum, soleiðis at tilboðsgevarar verða kunnaðir um væntandi byggiregulerandi ásetingarnar.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
26/04091-2 Kort
26/04091-3 Verkætlanarlýsing ÚOA - 11apr2025_compressed (1).pdf
26/04091-4 UOA Yvirlitskort matriklar 110526.pdf
26/04091-5 Reglugerð fyri útlutan av raðhusum

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Tekniski stóri og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini:

- at fyrireika og fremja útbjóðing av øki 5.2 oman fyri Argjahamar.
- at lýsa ásetingar, sum ikki eru í byggisamtyktini sum deklaratión, sum verður tinglýst á øki 5.2
- at leggja upprit av deklaratiónini við sum part av útboðstilfarinum

- at fara í samráðingar við vinnandi tilboðsveitarar um endaligar avtalu- og byggitreytir.
- at málið verður lagt fyri nevnd aftur, tá vinnandi tilboðsveitarin er funnin.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ískoyti:
Politiskt hevur spurnartekin verið sett til hvussu innkomnu tilboðini fara at verða mett. Niðanfyri sæst, hvussu umsitingin mælir til at tilboðini verða mett:

Meting av tilboðum
Tilboð verða mett út frá einari samlaðari meting, har dentur verður lagdur á bæði prísstøði, heildarmeting av verkætlanini og bústaðarskipan.

Treyt	**Vekt**
Miðal fermetraprísur fyri búeindirnar uttan MVG	50%
Heildarmeting av verkætlan	35%
Bústaðarskipan	15%

- **Miðal fermetraprísur fyri hvørja búeind telur 50 %**. Metingin tekur støði í miðal fermetraprísinum uttan MVG fyri allar búeindirnar í tilboðnum. Tilboðið við lægsta miðalprísinum fær hægsta stigatal. Onnur tilboð verða stigsett lutfalsliga, í mun til lægsta fermetraprís.

- **Heildarmeting av verkætlanini telur 35 %.** Dentur verður lagdur á arkitektoniska góðsku, tillaging til landslag og nærumhvørvi, sólar- og skuggaviðurskifti og eina góða skipan av bygging, atkomu, parkering og fríøkjum.

- **Bústaðarskipan telur 15 %.** Dentur verður lagdur á fjølbroytni í bústaðarstøddum og bústaðarsløgum, góðar og væl gagnnýttar innrættingar og loysnir, sum hóska til ymiskar aldursbólkar og húsarhaldsstøddir. Tað verður mett positivt, um partur av bústøðunum er rørslu- og eldravinarligur.

Tilmæli:
Víst verður til tilmæli, sum varð lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina 2. nov. 2026.

306/26 Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 6.0

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	222/26	26/04092-1
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	221/26	26/04092-1
3 Býráðsfundur	19.11.2026	306/26	26/04092-1

Upprunin til málið
Útstykkingin oman fyri Argjahamar er liðug, og skulu lendini lutast út til bygging. Útstykkingin fylgir heildarætlanini, sum varð gjørd fyri útstykkingina, sí skjal nr. *26/04092-3, Verkætlanarlýsing ÚOA - 11apr2025_compressed (1).pdf* og *26/04092-4, UOA Yvirlitskort matriklar 110526.pdf*.

26. januar 2023 samtykti býráðið í mál nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging*, at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging.

Síðani eru fleiri øki boðin út og verkætlanir settar í gongd. Talan er m.a. um øki til raðhús, íbúðir, almennan bústovn og leiguíbúðir. Í sambandi við framhaldandi menningina av útstykkingini er ynskiligt at fara undir at fyrireika írestandi øki til útbjóðing til bygging av vinnuhølum og bústøðum.

Lýsing av málinum
Hetta málið snýr seg um at fáa heimild til at bjóða øki 6.0 út til bygging av raðhúsum. Sí skjal nr. *26/04092-2, Kort*, sum vísir økið 6.0.

Øki 6.0 er ætlað til bygging av raðhúsum.
Við hesum verður miðað eftir at skapa fjølbroyttar bústaðarmøguleikar í økinum og at stuðla undir eina góða og samanhangandi bústaðarútbygging oman fyri Argjahamar.

Lógir, ásetingar o.a.
Øki 6.0 er fevnt av ásetingunum fyri øki E í serstøku byggisamtyktini fyri Argjahamar. Økið verður lagt av til:

- raðhúsabygging,
- raðhúsastykkir, sum skulu vera í minsta lagi 200 m² til støddar,
- bygging, sum skal verða sett samsvarandi einari góðkendari heildarætlan fyri økispartin,
- eitt mest loyvt byggistig á 0,35,
- eitt mest loyvt nýtslustig á 1,05,
- bygging í mesta lagi í 3 hæddum,
- bygging við mønutekju, sum er javnfjar við vegin, har niðasta hædd skal vera undir veghædd,
- eina mest loyvda hædd á 9 m til hægsta punkt við útvegg og 10,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd,
- og aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging, sum skulu vera í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Harumframt skulu vegir, parkering og byggisnið skipast sambært ásetingunum í serstøku byggisamtyktini og í samráð við byggimyndugleikan.

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin ger vart við, at dentur verður lagdur á, at bústaðirnir koma teimum til góðar, sum hava veruligan tørv á bústaði.

Í hesum sambandi verður útbjóðingin skipað soleiðis, at mennari í tilboðnum skal upplýsa endakostnaðin á bústaðareindunum, og Tórshavnar kommuna samskipar útlutan av bústaðareindunum sambært reglugerð fyri útlutan av raðhúsum, sí skjal nr. *26/04092-5, Reglugerð fyri útlutan av raðhusum*. Endamálið við at bjóða byggingina út við ynski um ein endakostnað á bústaðareindunum er at tryggja, at bústaðirnir verða tillutaðir borgarum uttan kappbjóðing, sum er við til at hækka endakostnaðin. Harumframt er endamálið og ynski, at mennari byggir bústaðareindirnar fyri so lágan byggikostnað sum møguligt, tó uttan at góðskan verður niðurraðfest á eitt ónøktandi støði.

Harumframt verður bústaðarskylda ásett á byggingina, soleiðis at bústaðirnir verða nýttir til bústaðarendamál. Bústaðarskyldan verður tinglýst sum byrða á skeytið fyri ognina.

Tilboðini skulu lúka krøvini í útbjóðingartilfarinum. Við meting av tilboðunum verður dentur lagdur á hesar tríggjar metingartættir. Raðfylgjan vísir ikki eina raðfesting:

- Prísstøði fevnir um endaligan søluprís fyri hvørja bústaðareind.
- Byggilist og økisskipan fevnir um byggilistarliga dygd og byggilistarligt fjølbroytni, tillaging til staðbundin viðurskifti og nærumhvørvið og skipan av bygningum og fríøkjum.
- Bústaðarskipan fevnir um støddd og samanseting av bústaðareindunum umframt býtið millum eigaraviðurskifti á bústøðunum.

Umsitingin hjá kommununi stendur fyri at gera heildarmeting av innkomnu tilboðunum og leggur tilmæli fyri býráðið um, hvørjum tilboði mælt verður til at taka av.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Mál nr. 22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Umsitingin hevur sent avvarðandi deildum í Teknisku fyrisiting málið til ummælis, og verða møguligar viðmerkingar tiknar við í framhaldandi tilgongdina.

Tekniska deild og Byggimálsdeildini hava somuleiðis fingið sendandi ítøkiligan fyrispurning um heimildina til at seta treytir um regnvatnsseinking og bilfría túnagøtu, og um hvussu tryggjast kann, at treytirnar í útboðstilfarinum verða fylgdar í byggimálsviðgerðini.

Søguliga hevur kommunan í fleiri førum ásett byggiregulerandi ásetingar sum tinglýstar byrður. Síðani byggisamtyktirnar komu í 1970'unum, hevur kommunan so líðandi í størri mun brúkt byggisamtyktir heldur enn tinglýstar byrður sum høvuðsamboð til byggiregulerandi ásetingar.

Byggimálsdeildin viðmælir, at byggiregulerandi ásetingar sum heild verða ásettar í byggisamtykt. Hetta fyri at tryggja, at byggiregulerandi ásetinagr sum heild verða savnaðar á einum almennum stað (í byggisamtykt), heldur enn at verða partvíst í byggisamtykt og partvís aðrastaðni (t.d. í tinglýstum skjølum).

Har talen er um kommunalt lendi og broytan av byggisamtykt ikki er skynsom, kunnu byggiregulerandi ásetingar ásetast sum tinglýstar byrður á ognina. Hetta kann t.d. hugsast at vera viðkomandi, tá talan er um teknisk viðurskiftir, ella um viðurskiftir, sum koma til kunnleika seint í verkætlanartilgongdini.

Um tað er ynskiligt at gera byggiregulerandi ásetingar um t.d. regnvatnsseinking og bilfría túnagøtu í kommunalum útstykkingum Oman Argjahamar, og um tað ikki verður mett skynsamt at broyta byggisamtyktina, mælir byggimálsdeildin til, at slíkar ásetingar verða lýstar í eini deklaratión, sum verður tinglýst á ognirnar, áðrenn ognirnar verða seldar. Upprit til deklaratión kann verða partur av útboðstilfarinum, soleiðis at tilboðsgevarar verða kunnaðir um væntandi byggiregulerandi ásetingarnar.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
26/04092-02 Kort
26/04092-03 Verkætlanarlýsing ÚOA - 11apr2025_compressed (1).pdf
26/04092-04 UOA Yvirlitskort matriklar 110526.pdf
26/04092-05 Reglugerð fyri útlutan av raðhusum

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Tekniski stóri og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini:

- at fyrireika og fremja útbjóðing av øki 6.0 oman fyri Argjahamar.
- at lýsa ásetingar, sum ikki eru í byggisamtyktini sum deklaratión, sum verður tinglýst á øki 6.0
- at leggja upprit av deklaratiónini við sum part av útboðstilfarinum

- at fara í samráðingar við vinnandi tilboðsveitarar um endaligar avtalu- og byggitreytir.
- at málið verður lagt fyri nevnd aftur, tá vinnandi tilboðsveitarin er funnin.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ískoyti:
Politiskt hevur spurnartekin verið sett til hvussu innkomnu tilboðini fara at verða mett. Niðanfyri sæst, hvussu umsitingin mælir til at tilboðini verða mett:

Meting av tilboðum
Tilboð verða mett út frá einari samlaðari meting, har dentur verður lagdur á bæði prísstøði, heildarmeting av verkætlanini og bústaðarskipan.

Treyt	**Vekt**
Miðal fermetraprísur fyri búeindirnar uttan MVG	50%
Heildarmeting av verkætlan	35%
Bústaðarskipan	15%

• **Miðal fermetraprísur fyri hvørja búeind telur 50 %**. Metingin tekur støði í miðal fermetraprísinum uttan MVG fyri allar búeindirnar í tilboðnum. Tilboðið við lægsta miðalprísinum fær hægsta stigatal. Onnur tilboð verða stigsett lutfalsliga, í mun til lægsta fermetraprís.

• **Heildarmeting av verkætlanini telur 35 %.** Dentur verður lagdur á arkitektoniska góðsku, tillaging til landslag og nærumhvørvi, sólar- og skuggaviðurskifti og eina góða skipan av bygging, atkomu, parkering og fríøkjum.

• **Bústaðarskipan telur 15 %.** Dentur verður lagdur á fjølbroytni í bústaðarstøddum og bústaðarsløgum, góðar og væl gagnnýttar innrættingar og loysnir, sum hóska til ymiskar aldursbólkar og húsarhaldsstøddir. Tað verður mett positivt, um partur av bústøðunum er rørslu- og eldravinarligur.

Tilmæli
Víst verður til tilmæli, sum varð lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina 2. nov. 2026.

307/26 Útstykking oman fyri Argjahamar - øki 7

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	223/26	26/04093-1
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	222/26	26/04093-1
3 Býráðsfundur	19.11.2026	307/26	26/04093-1

Upprunin til málið
Útstykkingin oman fyri Argjahamar er liðug, og skulu lendini lutast út til bygging. Útstykkingin fylgir heildarætlanini, sum varð gjørd fyri útstykkingina, sí skjal nr. *26/04093-3, Verkætlanarlýsing ÚOA - 11apr2025_compressed (1).pdf* og *26/04093-4, UOA Yvirlitskort matriklar 110526.pdf*.

26. januar 2023 samtykti býráðið í máli nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging*, at heimila umsitingini at fara undir at bjóða part av matr.nr. 256 út til bygging.

Síðani eru fleiri øki boðin út og verkætlanir settar í gongd. Talan er m.a. um øki til raðhús, íbúðir, almennan bústovn og leiguíbúðir. Í sambandi við framhaldandi menningina av útstykkingini er ynskiligt at fara undir at fyrireika írestandi øki til útbjóðing til bygging av vinnuhølum og bústøðum.

Lýsing av málinum
Hetta málið snýr seg um at fáa heimild til at bjóða øki 7.0 út til bygging av raðhúsum. Sí skjal nr. *26/04093-2, Kort*, sum vísir økið 7.0.

Øki 7.0 er ætlað til bygging av raðhúsum.
Við hesum verður miðað eftir at skapa fjølbroyttar bústaðarmøguleikar í økinum og at stuðla undir eina góða og samanhangandi bústaðarútbygging oman fyri Argjahamar.

Lógir, ásetingar o.a.
Øki 7 er fevnt av ásetingunum fyri øki F í serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar. Økið verður lagt av til:

- raðhúsabygging,
- raðhúsastykkir, sum skulu vera í minsta lagi 200 m² til støddar,
- bygging, sum skal verða sett samsvarandi einari góðkendari heildarætlan fyri økispartin,
- eitt mest loyvt byggistig á 0,35,
- eitt mest loyvt nýtslustig á 1,05,
- bygging í mesta lagi í 3 hæddum við mønutekju, sum er javnfjar við vegin,
- eina mest loyvda hædd á 9 m til hægsta punkt við útvegg og 10,5 m til mønuna, mált frá planeringshædd,
- og aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging, sum skulu vera í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Harumframt skulu vegir, parkering og byggisnið skipast sambært ásetingunum í serstøku byggisamtyktini og í samráð við byggimyndugleikan.

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin ger vart við, at dentur verður lagdur á, at bústaðirnir koma teimum til góðar, sum hava veruligan tørv á bústaði.

Í hesum sambandi verður útbjóðingin skipað soleiðis, at mennari í tilboðnum skal upplýsa endakostnaðin á bústaðareindunum, og Tórshavnar kommuna samskipar útlutan av bústaðareindunum sambært reglugerð fyri útlutan av raðhúsum, sí skjal nr. *26/04093-5, Reglugerð fyri útlutan av raðhusum*. Endamálið við at bjóða byggingina út við ynski um ein endakostnað á bústaðareindunum er at tryggja, at bústaðirnir verða tillutaðir borgarum uttan kappbjóðing, sum er við til at hækka endakostnaðin. Harumframt er endamálið og ynski, at mennari byggir bústaðareindirnar fyri so lágan byggikostnað sum møguligt, tó uttan at góðskan verður niðurraðfest á eitt ónøktandi støði.

Harumframt verður bústaðarskylda ásett á byggingina, soleiðis at bústaðirnir verða nýttir til bústaðarendamál. Bústaðarskyldan verður tinglýst sum byrða á skeytið fyri ognina.

Tilboðini skulu lúka krøvini í útbjóðingartilfarinum. Við meting av tilboðunum verður dentur lagdur á hesar tríggjar metingartættir. Raðfylgjan vísir ikki eina raðfesting:

- Prísstøði fevnir um endaligan søluprís fyri hvørja bústaðareind.
- Byggilist og økisskipan fevnir um byggilistarliga dygd og byggilistarligt fjølbroytni, tillaging til staðbundin viðurskifti og nærumhvørvið og skipan av bygningum og fríøkjum.
- Bústaðarskipan fevnir um støddd og samanseting av bústaðareindunum umframt býtið millum eigaraviðurskifti á bústøðunum.

Umsitingin hjá kommununi stendur fyri at gera heildarmeting av innkomnu tilboðunum og leggur tilmæli fyri býráðið um, hvørjum tilboði mælt verður til at taka av.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
Mál nr. 22/07223, Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Umsitingin hevur sent avvarðandi deildum í Teknisku fyrisiting málið til ummælis, og verða møguligar viðmerkingar tiknar við í framhaldandi tilgongdina.

Tekniska deild og Byggimálsdeildini hava somuleiðis fingið sendandi ítøkiligan fyrispurning um heimildina til at seta treytir um regnvatnsseinking og bilfría túnagøtu, og um hvussu tryggjast kann, at treytirnar í útboðstilfarinum verða fylgdar í byggimálsviðgerðini.

Søguliga hevur kommunan í fleiri førum ásett byggiregulerandi ásetingar sum tinglýstar byrður. Síðani byggisamtyktirnar komu í 1970'unum, hevur kommunan so líðandi í størri mun brúkt byggisamtyktir heldur enn tinglýstar byrður sum høvuðsamboð til byggiregulerandi ásetingar.

Byggimálsdeildin viðmælir, at byggiregulerandi ásetingar sum heild verða ásettar í byggisamtykt. Hetta fyri at tryggja, at byggiregulerandi ásetinagr sum heild verða savnaðar á einum almennum stað (í byggisamtykt), heldur enn at verða partvíst í byggisamtykt og partvís aðrastaðni (t.d. í tinglýstum skjølum).

Har talen er um kommunalt lendi og broytan av byggisamtykt ikki er skynsom, kunnu byggiregulerandi ásetingar ásetast sum tinglýstar byrður á ognina. Hetta kann t.d. hugsast at vera viðkomandi, tá talan er um teknisk viðurskiftir, ella um viðurskiftir, sum koma til kunnleika seint í verkætlanartilgongdini.

Um tað er ynskiligt at gera byggiregulerandi ásetingar um t.d. regnvatnsseinking og bilfría túnagøtu í kommunalum útstykkingum Oman Argjahamar, og um tað ikki verður mett skynsamt at broyta byggisamtyktina, mælir byggimálsdeildin til, at slíkar ásetingar verða lýstar í eini deklaratión, sum verður tinglýst á ognirnar, áðrenn ognirnar verða seldar. Upprit til deklaratión kann verða partur av útboðstilfarinum, soleiðis at tilboðsgevarar verða kunnaðir um væntandi byggiregulerandi ásetingarnar.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
26/04093-2 Kort
26/04093-3 Verkætlanarlýsing ÚOA - 11apr2025_compressed (1).pdf
26/04093-4 UOA Yvirlitskort matriklar 110526.pdf
26/04093-5 Reglugerð fyri útlutan av raðhusum

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Tekniski stóri og býararkitekturin mæla nevndini til, at heimila umsitingini:

- at fyrireika og fremja útbjóðing av øki 7 oman fyri Argjahamar.
- at lýsa ásetingar, sum ikki eru í byggisamtyktini sum deklaratión, sum verður tinglýst á øki 7.0.
- at leggja upprit av deklaratiónini við sum part av útboðstilfarinum.

- at fara í samráðingar við vinnandi tilboðsveitarar um endaligar avtalu- og byggitreytir.
- at málið verður lagt fyri nevnd aftur, tá vinnandi tilboðsveitarin er funnin.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ískoyti:
Politiskt hevur spurnartekin verið sett til hvussu innkomnu tilboðini fara at verða mett. Niðanfyri sæst, hvussu umsitingin mælir til at tilboðini verða mett:

Meting av tilboðum
Tilboð verða mett út frá einari samlaðari meting, har dentur verður lagdur á bæði prísstøði, heildarmeting av verkætlanini og bústaðarskipan.

Treyt	**Vekt**
Miðal fermetraprísur fyri búeindirnar uttan MVG	50%
Heildarmeting av verkætlan	35%
Bústaðarskipan	15%

- **Miðal fermetraprísur fyri hvørja búeind telur 50 %**. Metingin tekur støði í miðal fermetraprísinum uttan MVG fyri allar búeindirnar í tilboðnum. Tilboðið við lægsta miðalprísinum fær hægsta stigatal. Onnur tilboð verða stigsett lutfalsliga, í mun til lægsta fermetraprís.

- **Heildarmeting av verkætlanini telur 35 %.** Dentur verður lagdur á arkitektoniska góðsku, tillaging til landslag og nærumhvørvi, sólar- og skuggaviðurskifti og eina góða skipan av bygging, atkomu, parkering og fríøkjum.

- **Bústaðarskipan telur 15 %.** Dentur verður lagdur á fjølbroytni í bústaðarstøddum og bústaðarsløgum, góðar og væl gagnnýttar innrættingar og loysnir, sum hóska til ymiskar aldursbólkar og húsarhaldsstøddir. Tað verður mett positivt, um partur av bústøðunum er rørslu- og eldravinarligur.

Tilmæli
Víst verður til tilmæli, sum varð lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina 2. nov. 2026

308/26 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	31.03.2025	58/25	25/00954-1
10 Býráðsfundur	19.11.2026	308/26	25/00954-1
2 Fíggjarnevndin	09.04.2025	71/25	25/00954-1
3 Fíggjarnevndin	14.05.2025	93/25	25/00954-1
4 Býráðsfundur	22.05.2025	131/25	25/00954-1
5 Byggi- og býarskipanarnevndin	13.04.2026	89/26	25/00954-1
6 Býráðsfundur	30.04.2026	126/26	25/00954-1
7 Býráðsfundur	05.05.2026	160/26	25/00954-1
8 Býráðsfundur	04.06.2026	183/26	25/00954-1
9 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	225/26	25/00954-1

Samanumtøka av málinum
Hetta málið er eitt framhald av mál nr 24/03527.
Í 2006 varð skráseting gjørd av bygningum, sum eru bygdir áðrenn 1958. Bygningarnir fingu ásett varðveitingarvirði, og arbeiðið er skjalfest í Tórshavnar Býaratlassi. Býaratlassið verður brúkt sum eitt vegleiðandi býarskipanarligt amboð, men virkar ikki sum ítøkilig heimild í viðgerðini av t.d. byggimálum, har ætlanin er at broyta bygningar móti tilmælunum í Býaratlassinum. Til tess at varðveita býarumhvørvið tørvar Tórshavnar kommunu amboð, ið kunnu nýtast til at verja serstøku byggilistina, býarskipanina og mentunarsøguligu virðini í kommununi, áðrenn ov seint er.

12. desembur 2022 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin, at umsitingin arbeiðir við at skráseta og raðfesta varðveitingarverd øki við at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi (sí mál nr. 22/06945). Í sama máli nevnir umsitingin fleiri økir í býnum, har varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd, av tí at hesi økini hava serstakt byggilistarligt, býarskipanarligt og søguligt virði. Ovarlaga á listanum er Rabarbukvarterið.

Tá ið matr.nr 828 varð keyptur í 2023, og nýggi eigarin hevði ynski um at sundurmatrikulera, soleiðis at umleið 315 m^2 stóri matrikulin á Tvørgøtu í framtíðini kundi rúma tveimum ognum, lat hetta seg ikki gera, tí galdandi byggisamtykt fyri økið, krevur grundstykkjavídd á minst 500 m^2 fyri stakhús (sí mál nr. 23/04734). Í býlinginum, sum upprunaliga varð útstykkjaður í 1920'unum, eru stórt sæð allar grundstykkjavíddirnar undir 500 m^2. Umsitingin metir, at galdandi ásetingar eru óhóskandi, og at varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd fyri Rabarbukvarterið. Í hesum sambandi bjóðaði eigarin av matr.nr 828 sær til at gera uppskot um eina varðveitandi serstaka byggisamtykt.

Lýsing av málinum
26. juni 2024 móttók umsitingin uppskotið til varðveitandi byggisamtykt, og hevur eftirfylgjandi tillagað tilfarið, við íblástri frá bæði útlendskum byggisamtyktum, serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn, og í góðum og tøttum samstarvi við Tjóðsavnið. Uppskotið, skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25,* hevur hesar týðandi broytingar við sær:

- Heimild verður fyri lutfalsliga smáum grundstykkjavíddum, og hóskandi ásetingar verða nágreinaðar fyri mest loyvdu hædd og byggi- og nýtslustig, við støði í siðbundnu húsunum í økinum.
- Krav verður um at varðveita garðar og byggilinjur, til tess at varðveita eyðkenda býarprofilin.
- Krøv verða sett til tilfarsnýtslu, snið og litir, sum samstundis tryggja, at húsaeigarar kunnu seta neyðugt viðlíkahald í verk og tillaga ognir til broyttar tørvir.
- Umsitingin mælir til stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur.

Lógir, ásetingar o.a.
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað Bústaðarbygging, har ásetingarnar eru:

§ 5. Ásetingar fyri umráðispart A1 í 3. grundumráði

1) Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2) Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3) Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m^2 fyri stakhús og 300 m^2 fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m^2 fyri hvørt grundstykki.

4) Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.

5) Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.

6) Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 m^2 ella minni, fara upp til helvtina hægri, og fyri stykkir millum 200 m^2 og 500 m^2 verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 3 vísir.

7) Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

8) Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

9) Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.

10) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

11) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt, at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 m^2, tó í minsta lagi 400 m^2.

12) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9.

Samsvar er ikki millum § 5, stk. 11 í galdandi almennu byggisamtyktini, ið ásetir at grundstykki ikki kunnu vera minni enn 400 m^2, og § 4, stk. 2 í uppskotinum til nýggja serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið, ið sigur, at grundstykki í økinum skulu vera millum 150 og 250 m^2 til víddar. Fyri at fremja rætta dámin í hesum, og í líknandi økjum, er tískil neyðugt at broyta § 5, stk. 11 í almennu byggisamtyktini, soleiðis at tað gerst gjørligt, at hava grundstykkir, ið eru minni 400 m^2. Tað hevur tó týdning at tryggja, at henda ásetingin einans kann nýtast í verandi økjum, har tað er neyðugt fyri at tryggja dámin í økinum.

Tískil verður mælt til, at nýtt stk. 12 verður sett inn í § 5 í almennu byggisamtyktina, ið er soljóðandi:

“Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað býarumhvørvi, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 m^2, hetta fyri at varðveita dámin í økinum.”

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin hevur afturvendandi mál, sum snúgva seg um, hvussu ávís økir í kommununi kunnu mennast uttan at missa søgulig og byggilistarlig virðir. Ætlanin við hesi byggisamtyktini er, at hon kann virka sum ein fyrimynd, tá líknandi byggisamtyktir skulu orðast aðrastaðni í býnum.

Av øðrum býarpørtum, har varðveitandi byggisamtykt kann verða gjørd, eru til dømis Jóannesar Paturssonargøta, Tinghúsvegurin, Tórsbyrgi, Tróndargøta/Bøgøta, Kilarakanalin, søguligir býlingar í bygdunum osfr.

Eitt annað skjal, ið er gjørt í sambandi við ynskið um at varðveita ávís býarøki í kommununi, er vegleiðingin "Heimbýlið títt", sí skjal *Heimbýlið títt*. Hetta er ein vegleiðing til, hvussu farast skal fram, tá støða skal takast til umvælingar, umbyggingar og/ella nýbyggingar í økjum, ið eru varðveitingarverd. Í vegleiðingini er ein yvirskipað lýsing og frágreiðing um, hví vit varðveita, hvat vit skulu leggja til merkis, tá vit umvæla ella umbyggja og tílíkt. Harumframt verður komið nærri inn á ymisku húsasniðini í teimum ymisku varðveitingarverdu økjunum, og frágreiðing er um, hvat er serstakt við ymisku húsasniðunum. Í fyrsta umfari eru tey trý húsasniðini, sum í størstan mun myndað økið í Rabarbukvarterinum, traðarmannahús, skiparahús og stoypt hús, lýst, men ætlanin er, at vegleiðingin verður víðkað og húsasnið verða løgd afturat, so hvørt sum varðveitandi byggisamtyktir verða gjørdar fyri onnur varðveitingarverd øki í kommununi. Ynskið er, at vegleiðingin við tíðini fer at hava frágreiðing um øll tey ymisku húsasniðini, sum eru í kommununi.

Í serstøku byggisamtyktini fyri Rabarbukvarterið verður víst til vegleiðingina "Heimbýlið títt" og lýsingin av teimum viðkomandi húsasniðunum verður lagt sum fylgiskjal til serstøku byggisamtyktina. Vegleiðingin og lýsingin av teimum trimum húsasniðunum "traðarmannahús", "skiparahús" og "stoypt hús" er ikki endaliga liðug, men verður klár áðrenn býráðsfundin 24. apríl 2025 og áðrenn uppskotið til serstaka byggisamtykt verður lagt til almenna og grannahoyring.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
- *Varðveitingarverd øki og bygningar í kommununi,* journal nr. 22/06945.
- *Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 929. Tvørgøta 4. Tórshavntil ummælis,* Journal nr. 23/04734.
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvaterið,* journal nr. 24/03527

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Uppskotið til serstaka byggisamtykt verður sent eigarum av ognunum í økinum til hoyringar.

Vegleiðingin "Heimbýlið títt" er gjørd í samstarvi við Tjóðsavnið.

Skjøl
- *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini,* journal nr. 25/00954-2.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvaterið 21.03.25,* journal nr. 25/00954-4.
- *Heimbýlið títt,* journal nr. 25/00954-3.

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	**Fyri ávís økir í kommununi**	**Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**	**Fyri vinnuna**
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar	**X**			

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Mælt verður til at stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur, somuleiðis verður gjørd fyri økið, sum serstaka byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið er galdandi fyri.

Ilt er at meta um, júst hvussu stórar fíggjarligar avleiðingar ein tílík skipan fer at hava, av tí at hetta velst um, nær – og hvussu stórar umvælingar eigarar av ognunum fara undir í framtíðini.

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið sambært skjalinum "*Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25*." Fylgiskjølini "Traðarmannahús", "Skiparahús" og "Stoypt hús" verða endaliga liðug áðrenn býráðsfundin.
- at samtykkja uppskotið til nýggja áseting í almennu byggisamtyktini, ið við serstakari byggisamtykt loyvir, at grundstykki kunnu vera minni enn 500 m^2, hetta fyri at varðveita ein ávísan dám, sí skjal *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini*.
- at líknandi stuðulsskipan, sum er galdandi fyri Tinganes og Reyn, eisini verður galdandi fyri økið, sum varðveitandi byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið fevnir um, soleiðis at kommunan fær heimild at lata eigarum stuðul, svarandi til 35 % av upphæddini fyri tilfarskostnað, ið lýkur treytir fyri nýggj krøv um siðbundið tilfar, og at *konta 6211 Aðrar útreiðslur*, í hesum sambandi verður tillagað, til at eisini at umfata Rabarbukvarterið umframt Tinganes og Reyn.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 09. apríl 2025: Málið útsett.

Fíggjarnevndin 14. mai 2025: Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini við tí nágreining, at stuðul á 35% verður veittur fyri kostnaðarmunin ímillum siðbundið tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við at beina málið til hoyringar, men tekur ikki undir við at seta stuðulsskipanina í verk.

Býráðsfundur 22. mai 2025: Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting viðvíkjani stuðulsskipanini:

Stuðul á 35% verður veittur til kostnaðarmunin ímillum vanligt tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum.
Stuðulin verður avtikin stigvíst yvir 15 ár soleiðis:
- 5 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 25%.
- 10 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 15%.
- 15 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin avtikin.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson

Ongin atkvøða var blonk.

Uppskotið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Ískoyti
Í sambandi við almennu hoyringina av serstøku byggisamtyktini fyri Rabarbukvarterið, sum var 1. oktober til 12. november, komu fimm viðmerkingar – allar frá íbúgvum í økinum, sí skjøl *Viðmerking – Anfinn Frederiksen, Viðmerking – Hannes Gislason, Viðmerking – Kristjan Eiriksson, Viðmerking – Sigurd*

Christiansen og *Viðmerking - Spf Petri*. Fleiri av viðmerkingunum snúgva seg um somu viðurskifti, og tískil eru viðmerkingarnar niðanfyri bólkaðar eftir evni, og eru viðmerkingarnar hesar:

1. Varðveita økið

- Taka yvirskipað undir við, at mest møguligt verður gjørt fyri at varðveita hetta serliga økið.
- Orsøkin til hesa byggisamtyktina er, at eigarin av matr. nr. 828 ynskir at sundurmatrikulera ogn sína, soleiðis at byggjast kunnu tvey smærri hús, heldur enn tað frammanundan større húsið, ið frammanundan stendur á ognini. Hetta er ikki í samsvari við § 1, stk. 2a um at varðveita søguliga umhvørvið. Hetta er ei heldur í samsvari við § 7, stk. 6 um at endurbyggjast skal og byggjast skal við somu umvídd sum niðurtikin hús. Verandi hús standa við skjøldri javnfjart markalinju, og væl møguligt er at byggja við somu umvídd og á sama stað, sum tey niðurtiknu húsini.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Tað er eitt politiskt ynski at varðveita nøkur av eldru grannaløgunum í býnum, og varð tað samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 12. desember 2022, at umsitining skuldi skráseta og raðfesta varðveitngarverd øki í býnum fyri at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi, sí mál *22/06945, Varðveitngarverd øki og bygningar í kommununi*. Serstaka byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið er tann fyrsta í røðini.
- Serstaka byggisamtyktin viðger ikki ítøkilig byggimál, men skapar karmarnar fyri tað, ið mett verður hóskar seg til økið – t.d. grundstykki, ið eru millum 150 og 250 m^2 til víddar og um ummatrikuleringar skulu/kunnu gerast, skal tað verða í samsvari við fylgiskjal 2 í serstøku byggisamtyktini. Ummatrikuleringar kunnu einans gerast, um byggingin eftir ummatrikulering rúmast á ognini, tað merkir t.d., at byggistig og nýtslustig framvegis er undir tí, ið loyvt er.

2. Ferðsla og parkering:

- Ringt at finna parkeringspláss.
- Mælir til at steingja Sjúrðargøtu uppi við Heygsbreyt, so eingin gjøgnumkoring verður, og hava innkoyring til Heygsbreyt frá Dalavegnum, og innkoyring til Brekkugøtu og Tvørgøtu verður frá Tróndargøtu inn í Sjúrðargøtu, sum tað er í dag. So kunnu íbúgvar parkera í gøtunum og gøturnar kunnu pyntast við blomsturkassum og spæliplássum v.m.
- Eigur at verða møguligt hjá fólki at fáa sær bilpláss á stykkinum.
- Parkeringsviðurskiftini eru ótíðarhóskandi og ótrygg. Parkeraðir bilar fram við gonguteigunum gera økið ótrygt. Tí er avgerandi, at byggisamtyktin framvegis loyvir einum parkeringsplássi á grundstykkjum, har tað er møguligt, at grundstykki ikki missa byggirætt grundað á hetta, og at kommunan skipar smærri felags parkeringsøki, t.d. við gomlu brandstøðina.
- Fer at vera munur á byggirætti og møguleikum hjá íbúgvum innan fyri sama kvarter. Øll skulu hava somu møguleikar til smærri útbygging og parkeringsloysnir. Nú verður tað tey, ið bygdu út áðrenn og eftir serstøku byggisamtyktina.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Ásetingin um, at parkeringspláss ikki skulu vera inni á ognunum, er gjørd grundað á ynskið um at varðveita grøna dámin í økinum. Tá grundstykkini eru so lítil, og parkeringspláss skulu gerast, er ikki nógv rúm fyri vøkstri. Umsitingin metir tó, at loyvi kann gevast til 1 parkeringsplássi inni á ognini, um so er at tey kunnu vísa, at § 6, stk. 1 um, at í minsta lagi 50% av óbygda økinum á ognini ikki er álagt hátún, verður hildið.
- Ongar ætlanir eru um at broyta ferðslumynstrið í Rabarbukvarterinum. Um Sjúðrargøta uppi við Heygsvegin verður stongd, broytir tað munandi um ferðslumynstrið, og mugu neyðugar kanningar gerast, áðrenn ein tílík avgerð kann takast.

3. Vinnuligt virksemi í økinum:

- Rabarbukvarterið var eitt arbeiðarakvarter – ikki eitt urtagarðskvarter. Hetta eigur at verða varðveitt í byggisamtyktini.
- Spurnartekin verður sett til, um endamálið at varðveita siðsøguligu virðini í økinum verður rokkið, tá forboð verður sett fyri virksemi, sum hevur verið partur av økinum í eina góða øld – helst líka frá byrjan.
- § 3 og § 5 eiga at verða broyttar, soleiðis at parkeringsøki á privatum matrikli og virkir í umhvørvisflokki 1 og 2 framhaldandi verða loyvd í økinum, í samsvari við ásetingarnar í

Almennu byggisamtyktini. Hetta tryggjar, at gjørdar íløgur í verandi vinnubygningar og parkeringsøki ikki missa virði, og at økið heldur fram at vera virkið og livandi.
- Verandi uppskot setur forboð fyri næstan øllum vinnuvirksemi og privatari parkering í økinum.
- Verandi uppskot fer at taka burtur møguleikan at nýta verandi vinnubygningar, um fyritøkan flytur ella eigarin broytist. Óvissa verður fyri framtíðar íløgur og avmarkar vilja at betra um atkomu, t.d. hjá fólki við skerdum førleikum.

Viðmerkingar frá umsitingini
- Tikið verður undir við at broyta ásetingarnar fyri vinnuligt virksemi í økinum, soleiðis at tær verða tær somu sum tær vóru áðrenn, og í vanligum sethúsaøkjum, A1 økjum, annars.
  "Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
  Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu."
- Viðvíkjandi viðmerking um parkering verður mælt til, at hildið verður fast í, at einans 1 parkeringspláss kann skipast á hvørjari ogn sambært nýggja uppskotinum til § 6, stk. 2, hetta fyri at tryggja grøna dámin í økinum.

4. Reinhaldið
- Skapa ójavnvág, tí kommunan sjálv rekur vinnu á matr. nr. 808d (gamla brandstøðin), ið er tikið burtur úr samtyktini, hóast virksemið har hevur hægri umhvørvisávirkan (flokkur 3-5).
- Gamla Brandstøðin og økið hjá Reinhaldinum eiga at verða fevnd av byggisamtyktini. Virksemið virkar sera illa saman við gamla býliginum við illa ljóðisoleraðum húsum. Fyrr lógu bústaðir út til vegin.
- Virksemið hjá Reinhaldinum elvir til stóran larm, støv, sápulukt og óreinleika. Kundið verið flutt t.d. til Vestaru bryggju, og harvið betrað munandi um fagurfrøðiligu heildarmyndina av Rabarbukvarterinum.
- Gamla brandstøðin eigur at verða umvæld til bústaðarendamál, ella møguliga parkeringsøki, um ætlanin er at avmarka tann møguleikan hjá íbúgvunum í økinum.

Viðmerkingar frá umsitingini
- Henda serstaka byggisamtyktin snýr seg fyrst og fremst um at skipa sethúsabyggingina í Rabarbukvarterinum við traðarmannahúsunum, fiskimannahúsunum og stoyptu húsunum. Mett verður ikki, at gamla brandstøðin er partur av tí økinum.

5. Matriklar, byggi- og nýtslustig
- Tað, at tað ber til at deila summi grundstykki í tvey (fylgiskjal 2) ger, at byggistig fyri verandi hús á hesum grundøkjum verður hækkað munandi.
- Ætlanin leggur upp til sersømdir ella undantaksloyvir fyri sera fáar eigarar í Rabarbukvarterinum, fyri at kunna gjøgnumføra lýstu ætlanina um sundurbýting av grundøkjum smb. § 4, stk. 3 og fylgiskjali 2.
- Broytingar eiga at vera gjørdar í mest loyvda byggistigi, sum gagna øllum í Rabarbukvarterinum, eisini teimum við smáum grundstykkjum. At loyva teimum lítlu húsunum at byggja hús síni eitt sindur størri, fer ikki at broyta dámin á økinum munandi.
- Ynskja byggistig á 0,4.
- Byggisamtyktin nevnir grundstykkjavíddir á 158 m^2 við húsum, ið hava grundvíddir á 60 m^2. Hetta gevur byggistig á 0,38. Fleiri hava eisini munandi hægri byggistig enn 0,4.
- Mett verður ikki, at byggisamtyktin gevur eigarum við smærri húsum á smáum grundøkjum nóg góðar møguleikar at innrætta rímiligar bústaðir.

Viðmerkingar frá umsitingini
- Tað fer einans at bera til at býta sundur grundstykki, um so er, at byggistigið á teimum sundurbýttu grundstykkjunum somuleiðis verður yvirhildið, eftir at sundurbýtið er farið fram. Hetta verður viðgjørt í teimum ítøkiligu málunum.
- Skráseting av bygdum fermetrum í økinum vísir, at flestu ognirnar eru við hægri byggistigi enn 0,3 – av 68 ognum. Um byggistigið verður hækkað til t.d. 0,4, kunnu 42 av ognunum

gera tilbyggingar, og verður mett, at hetta fer at broyta dámin á økinum munandi. Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at varðveita dámin á økinum, og er broyting av byggistiginum so statt ikki í samsvari við endamálið.
- Nevnast kann, at á ognum, sum eru 158 m^2 ber, við einum byggistigi á 0,3, til at byggja 47,4 m^2 í grundvídd. Nýtslustigið á ognum, sum eru 158 m^2 er 0,9, og er tí møguligt at byggja 142,2 m^2 í alt. Hendan støddin verður mett, sum ein rímiligur bústaður til eina vanliga familjustødd.

6. Fíggjarligur stuðul
- Fíggjarligi stuðulin átti ikki at verið avtikin eftir 15 ár, men verið óavmarkaður, eins og úti á Reyni. Annars verður mismunur.

Viðmerkingar frá umsitingini
- At avtaka fíggjarliga stuðulin yvir ár er ein politisk avgerð, og hevur býráðið samtykt, at fíggjarligi stuðulin verður avtikin stigvíst yvir 15 ár soleiðis:
  - 5 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 25%.
  - 10 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 15%.
  - 15 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin avtikin.

7. Ymiskt
- Manglar áseting um mest loyvdu hædd á trøum. Hetta í mun til trygd og sólargang. Ynskja greiðar ásetingar um viðlíkhald av urtagørðum, so trø ikki kunnu vaksa óavmarkað stór.
- Marghátligt, at banna sólpanelum á húsatekjum, sum eru ein skjótt vaksandi partur av grøna orkuskiftinum.

Viðmerkingar frá umsitingini
- Býarksipan og byggisamtyktir eru fevndar av býarskipanarlógini, og í hesari er ikki heimild at áseta mest loyvdu hædd á trøum í byggisamtyktum. Kommunan hevur gjørt vegleiðingina “Plantið eitt træ í góðum grannalag”, sum lýsir, hvussu trø og runnar mest skynsamt verða plantað og hildin í grannaløgum.
- Sólpanel verða loyvd á úthúsum, skúrum og líknandi. Mett verður, at um sólpanel verða løgd á tekjur á meginhúsum, fer hetta at gera seg ov nógv inn á søguliga sniðið, sum serstaka byggisamtyktin roynir at varðveita.

Umframt almennu viðmerkingarnar, hevur umsitingin hesar innanhýsis viðmerkingar.

Stórigarður
Stórigarður gongur fram við norðara marki av byggisamtyktarøkinum og lutvíst vestara marki. Stórigarður er ikki friðaður við lóg, men Tórshavnar kommuna lat í 2018/2019 gera eina støðulýsing og heildarætlan fyri garðin, við tí fyri eyga at varðveita hann, sí mál *18/01974, Stórigarður* . Stórigarður verður ikki umrøddur í áður framlagda uppskotið, og mett verður, at áseting, ið varðveitir Stóragarð, eigur at verða í nýggja uppskotinum, sí § 6, stk. 6 í skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.01.26*.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
- *22/06945, Varðveitngarverd øki og bygningar í kommununi*
- *18/01974, Stórigarður*

Skjøl
- *Viðmerking – Anfinn Frederiksen,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Hannes Gislason,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Kristjan Eirksson,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Sigurd Christiansen,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Spf Petri, journal nr. 25/00954-30*
- *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 05.03.26,* journal nr. 25/00954-32

Tilmæli
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstøku byggisamtyktina fyri Rabarbukvarterið 05.03.26, við m.a. hesum broytingum í mun til áður framlagda uppskot:

- Loyvi til 1 parkeringspláss inni á ognunum, um so er at § 6, stk. 1 verður hildið.
- Loyvi til vinnuligt virksemi í umhvørvisflokki 1-2.
- Áseting, ið verjir Stóragarð.
- Og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026: Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Tikið av skrá.

Býráðsfundur 04. juni 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen

Ískoyti:
Á býráðsfundi 4. juni 2026 vórðu samtyktar nakrar broytingar í uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið. Í sambandi við almennu hoyringina av broytinginum, sum var 10. juni til 22. juli 2026, komu 10 viðmerkingar, sí skjal 25/00954-58, *Viðmerkingar – samlað yvirlit*. Fleiri av viðmerkingunum snúgva seg um somu viðurskifti, og tískil eru viðmerkingarnar niðanfyri bólkaðar eftir evni, og eru viðmerkingarnar hesar:

1. Varðveita økið
- Tikið verður í stóran mun undir við endamálinum um at varðveita serligu byggilistarligu, mentanarligu og siðsøguligu virðini í Rabarbukvarterinum.
- Uppskotið eigur at tryggja eina betri javnvág millum varðveiting og møguleikar til viðlíkahald, dagføring og menning.
- Fleiri av húsunum eru ikki hóskandi við tørvin hjá nútímans familjum. Um Rabarbukvarterið framhaldandi skal megna at draga ungar familjur og barnafamiljur, mugu bústaðirnir kunna tillagast teimum tørvum, sum nútímans familjulív setur.
- Byggisamtyktin eigur at geva møguleikar fyri varnum útbyggingum, altanum, kvistum og øðrum broytingum, serliga á baksíðuni av húsunum, har ávirkanin á gøtumyndina er avmarkað.
- Eigur í størri mun at síggjast aftur í regluverkinum, at talan er um eitt øki, ið er samansett av ymiskari bygging.
- Ognin hjá einum viðmerkjara hevur varðveitingarvirði 2, og vísir viðmerkjari á, at hetta m.a. er tí tey hava hildið húsini væl. Meta tað vera órímiligt, um tey av teirri orsøk verða løgd undir fleiri avmarkingar enn onnur vanlig hús í økinum.

<u>Viðmerkingar frá umsitingini:</u>
- Mett verður, at verandi hús í høvuðsheitum eru nøktandi í støddd, og at tørvur á meira plássi kann nøktast við smærri útbyggingum innan karmarnar í uppskotinum.
- Nevnast kann, at á ognum, sum eru 158 m^2 til støddar ber, við einum byggistigi á 0,3, til at byggja 47,4 m^2 í grundvídd. Nýtslustigið á ognum, sum eru 158 m^2 til støddar er 0,9, og er tí møguligt at byggja 142,2 m^2 í alt. Hendan støddin verður mett, sum ein rímiligur bústaður til eina vanliga familjustødd.
- Verandi ásetingar verða mettar at tryggja eina hóskandi javnvág millum varðveiting og møguleika fyri viðlíkahaldi og dagføringum.

- Talan er um eina varðveitandi byggisamtykt, og tá er natúrligt, at taka serlig atlit til tey virði í økinum, ið eru væl varðveitt. Áseting § 9, stk. 1 sigur, at "serlig atlit skulu takast til hús við varðveitingarvirði 1-3 smb. fylgiskjali 3." Hetta merkir ikki, at einki kann gerast, men at broytingar av útsjóndini á húsunum skal gerast við serliga stórum atlilti. Hetta er við til at tryggja endamálið við serstøku byggisamtyktini, og verður tað mett, at húsini fáa størri virði av hesum.
-

2. Ferðsla og parkering

- Parkeringsviðurskiftini á Heygsbreyt eru sera vánalig og ynskiligt er, at kunna hava bilin inni á egnum grundøki.
- Mæla til, at tað ikki verður loyvt at gera parkeringspláss á privatum matrikli. Tá innkoyring verður gjørd til privat parkeringspláss, kunnu minst tvey almenn parkeringspláss fram við vegnum hvørva, og hesi eru frammanundan avmarkað.

Viðmerkingar frá umsitingini

- § 6, stk. 2, um at parkeringspláss kann gerast inni á ognini, um so er at tað framvegis ber til at yvirhalda § 7, stk. 1, um at í minsta lagi 50% av óbygda økinum á ognini ikki er álagt hátun, verður mett nøktandi í mun til at varðveita grøna urtagarðsdámin í økinum, samstundis sum til ber at gera sær 1 parkeringspláss inni á ognini, hjá teimum ið ynskja at raðfesta hetta framum t.d. hátún.
- Hóast tað inntil nú hevur verið møguligt at gera parkeringspláss inni á ognunum, eru tað ikki mong, ið hava parkeringpláss inni á ognunum. Henda ásetingin verður ikki mett at broyta nógv uppá tey viðurskiftini, og tískil verður tað heldur ikki mett sannlíkt, at ein munandi nøgd av almennum parkeringsplássum hvørva, av tí at fólk fara at gera sær privat parkeringspláss.

3. Reinhaldið

- Víst verður til kæru, sum grannar hava sent Tórshavnar kommunu, um núverandi virksemið hjá Reinhaldinum, mál nr. *26/05277, Kæra um larm, royk, lukt, ristingar og dálkandi virksemi hjá Reinhaldinum á matr. nr. 808d á gomlu brandstøðini*.
- Virksemið, sum er har nú, virkar sera illa saman við býlinginum.
- Reinhaldið hoyrir einum vinnuøki til.
- Gamla brandstøðin kundi ístaðin verið nýtt til m.a. frítíðarskúla ella forskúla hjá Sankta Frans, vøggustovu hjá Sankta Jósef, eldraíbúðir ella brandmuseum.
- Gamla brandstøðin er partur av fagurfrøðiliga úttrykkinum og søguliga Rabarbukvarterinum og átti at verið fevnd av serstøku byggisamtyktini.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Henda serstaka byggisamtyktin snýr seg fyrst og fremst um at skipa sethúsabyggingina í Rabarbukvarterinum við traðarmannahúsunum, fiskimannahúsunum og stoyptu húsunum. Mett verður ikki, at gamla brandstøðin er partur av tí økinum.
- Býarskipanarliga verður mett, at virksemið hjá Reinhaldinum í gomlu brandstøðini er óheppið staðsett, eisini í mun til ynskta dámin í økinum sum heild. Flyting av verandi virksemi í Brandstøðini hevur fleiri ferðir verið viðgjørt, tó uttan at ein haldgóð loysn er funnin. Nærleikin til innara part av býnum hevur avgerandi týdning fyri virksemið hjá Reinhaldinum, og tað er ikki eydnast at finna aðra staðseting til hetta virskemið. Bygningsdeildin hevur í 2025 latið gjørt uppskot um høvuðsumvæling og betran av umstøðunum í Brandstøðini, við m.a. innandura vaskiplássi. Um uppskotið verður framt í verki, hevði tað hjálpt munandi um árinini av virkseminum.

5. Hædd, byggistig og nýtslustig

- Hallandi lendið í økinum ger, at hæddatal og byggihædd í summum førum gevur eina skeiva mynd av, hvussu bygningurin verður upplivdur.
- Ynskir ikki hægri bygningar enn tað, sum stendur í byggisamtyktini nú í Rabarbukvarterinum.
- Mæla til, at verandi sethús í Rabarbukvarterinum sum grundregla ikki kunnu hækkast, men í staðin kunnu útbyggjast í lægru hæddunum ella í kjallarahædd. Víst verður til § 8, stk. 4. Fyri summi av húsunum merkja hæddarásetingarnar í verandi uppskoti, at hesi kunnu hækkast við einari heilari hædd.

- Ynskir greiðar ásetingar um, hvat byggi- og nýtslustig kann loyvast, og hvørjir karmar galda fyri útbygging.
- § 8, stk. 6. Orðið “umvídd” er ógreitt og finst ikki í Sprotanum. Eiga at nýta greiðari orðing.
- Mælir til byggistig á 0,35 ístaðin fyri 0,30. Hetta ger snið og lutfall á fasadum meira proportionalt við verandi gomlu húsini.
- Vanligt er, at verandi grundstykkir á 158 m^2 hava ábygging, ið liggur áleið 0,35, tvs. 55 m^2.
- Nýbygging í dag krevur meira bjálving í tekju, lendisgólv og útvegg, hægri fríhædd og meira innleggingar í skilagólvini. Hetta ger, at húsini sýnast smalri enn tey gomlu húsini.
- Ognin Heygsbreyt 11 er lítil og hevur ongan kjallara. Tí er ætlanin at søkja um byggiloyvi til garasju, havastovu og vaskirúm.
- Ístaðin fyri at loyva hægri og størri bygningum verður mælt til, at kommunan umhugsar at geva størri møguleikar fyri útbygging í kjallarahædd. Ein slík loysn kann geva húsaeigarum fleiri fermetrar og størri nýtslumøguleikar, uttan at tað skerjir sólargang, dagsljós og útsýni hjá grannum.
- Mælt verður til, at tílík bygging ikki telur við í byggi- og nýtslustigið. Terassa kann so gerast omaná kjallarahæddina, treytað av at byggingin ikki fevnir um meira enn 50 % av grundstykkinum.
- Eiga at hava møguleika at geva frávik frá hædd, byggivolumen og sniði, tá ið tað við einari ítøkiligari meting kann staðfestast, at tað er ráðiligt.

Viðmerkingar frá umsitingini:

- Byggireglerandi ásetingarnar í uppskotinum til serstøku byggisamtykina fyri Rabarbukvarterið eru fyrst og fremst gjørdar við støði í mátunum á teimum siðbundnu húsasniðunum.
- Umsitingin metir tað ikki verða skynsamt at broyta hesar ásetingarnar, tí størri byggimøguleikar kunnu broyta samleikan, sum serstaka byggisamtyktin hevur til endamáls at varðveita.
- Tað verður ikki mett vera ein góð loysn, um til ber at gera útbygging í kjallarahædd. Hetta broytir munandi uppá symmetriina í húsunum og gongur beinleiðis ímóti endamálinum við at varðveita dámin í økinum.
- Smb. Bygningskunngerðini 2017, Skjal 1A, stk. 1 ber ikki til at gera undantak frá útrokningarreglum í serstøkum byggisamtyktum, harímillum roknireglum viðv. byggi- og nýtslustigi.
- Smb. § 12, stk. 1 ber til at geva smávegis lættar, um so er, at dámurin í økinum ikki verður broyttur av teirri orsøk. M.a. um vísast kann á, at upprunahús hava verið á matriklunum við ørðvísi útsjónd.
- § 8, stk. 6. Orðið “umvídd” verður broytt til “ummál”.

7. Ymiskt

- Kennir seg illa viðfarnan av skipanini hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við, at viðkomandi ikki metir, at hansara mál verða viðgjørd við somu raðfesting og álvara sum onnur mál hjá borgarum í kommununi. Talan er um tvey byggimál, sum eru eldri enn hetta málið.
- Vatn kemur inn í kjallaran á fleiri av ognunum í Rabarbukvarterinum. Um kommunan í framtíðini fer at endurnýggja gøturnar í økinum, hevði tað verið upplagt at samskipa arbeiðið, soleiðis at drenviðurskiftini samstundis kundu verið bøtt.
- Við betri drenviðurskiftum hevði verið møguligt at gagnnýtt kjallaran á frammanundan lítlu húsunum sum ein veruligan part av bústaðinum.
- Tekur ikki undir við, at sólorkupanelir ikki skulu vera loyvd.
- Eiga at loyva sólfangarum við hóskandi treytum um útsjónd og staðseting.
- Greiðar treytir eiga at verða ásettar um staðseting og vending av hitapumpum, umframt markvirði fyri larmi.

Viðmerkingar frá umsitingini:

- Viðmerkingin um at borgari kennir seg illa viðfarnan, er send røttu viðkomandi deild.
- Sólpanel verða loyvd á úthúsum, skúrum og líknandi. Mett verður, at um sólpanel verða løgd á tekjur á meginhúsum, fer hetta at gera seg ov nógv inn á søguliga sniðið, sum serstaka byggisamtyktin roynir at varðveita.

- Drenviðurskifti eru ikki partur av uppskotinum til serstaka byggisamtykt. Um ynskið er at samskipa dren av privatum ognum við kommunalt arbeiði at endurnýggja gøtur, kann áheitan um hetta sendast kommununi í serskiltari áheitan.
- Tað er í ávísum førum ein avbjóðing, at hitapumpur verða staðsettar heilt út í mark, og soleiðis órógva grannar. Hetta er tó ikki ein avbjóðing, ið eina verður loyst við serstøku byggisamtyktini, men eigur at verða viðgjørt í øðrum máli og meira alment, t.d. í almennu byggisamtyktini.

Í uppskotinum, sum nú liggur til viðgerðar, verður soleiðis tikið undir við viðmerkingini um at § 8, stk. 6. Orðið “umvídd” verður broytt til “ummál”. Harafturat eru nakrar málsligar rættingar í § 8, stk. 7, 8, 9 og 11. Mett verður ikki, at uppskotið skal til nýggja almenna hoyring hóast hetta, av tí at talan einans er um einstøk orð, ið eru rættað málsliga.

Skjøl:
- 25/00954-59, *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið, 22.09.2026*

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið smb. skjali 25/00954-59, *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið, 22.09.2026,* og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdótti, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

309/26 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Kvíggjartún

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	226/26	26/06144-2
2 Býráðsfundur	19.11.2026	309/26	26/06144-2

Upprunin til málið
Ætlanir eru at byggja ein íbúðar- og vinnubygning á matr. nr. 56c, Argir. Grundøkið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini, sum er ætlað miðstaðaendamálum og íbúðum, og verður bygging í økinum einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

Lýsing av málinum
Felagið Sp/f Derma ynskir at byggja ein bygning har veghæddin rúmar umleið 245 m^2 til vinnuligt endamál, umframt tvær hæddir til bústaðarendamál. Sí skjal *Derma_Íbúðar- & vinnubygningur_20260703, j.nr 26/06144-1*. Sambært uppskotinum verður hæddin á nýggja bygninginum 12,5 m frá planeringshædd.

Málið hevur sín uppruna í málinum *25/08970, Fyrispurningur um bygging o.a. á matr. nr. 56cg, Argir*, og hava ivamál verið um ferðslurætt umvegis matr. nr. 56ce, har Effo støðin er. Sáttmáli er skrivaður um ferðslurætt 9. juni 2026, og verður sostatt møguligt at koyra umvegis matr. nr. 56ce til nýggja bygningin, har 8 parkeringspláss eru sambært uppskotinum. Harumframt eru 4 parkeringspláss omanfyri og yvirav nýggja íbúðarbygninginum Kvíggjartún 32, har samband er til íbúðir sambært uppskotinum. Hetta málið snýr seg um at broyta galdandi serstøku byggisamtykt fyri Kvíggjartún, soleiðis at byggisamtyktin verður víðkað til at fevna um matr. nr. 56cg og restina av C3 økinum við Kvíggjartún.

Lógir, ásetingar o.a.
Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru:

1 Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging og íbúðir.

2 Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Henda áseting er ikki galdandi fyri sundurbýti og samanlegging av matriklum, um øki er bygt og um broytingin ikki viðførir stórvegis broytingar fyri nýtsluna í økinum.

3 Byggistigið skal ikki fara upp um 0,4.

4 Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.

5 Loyvd skelting í hesum umráðisparti er sum víst á talvu niðanfyri og sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu

	Tænastu-skelti	Lýsingar-skelti	Vinnu- og stovnsskelting
Aktiv skelting			
Passiv skelting	x		x

Upplýsingar frá umsitingini
Serstøk byggisamtykt er frammanundan galdandi í sama C3 øki við Kvíggjartún á Argjum (sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún.pdf, j.nr. 22/05301-17*). Henda serstaka byggisamtyktin varð upprunaliga gjørd í sambandi við, at almennur stovnur skuldi byggjast á matr. nr. 56cl, og varð serstaka byggisamtyktin í 2023 víðkað til at fevna um matr. nr. 56ch, har íbúðarbygningurin við vinnuhølum nýliga er bygdur.

Uppskotið snýr seg um at víðka serstøku byggisamtyktina fyri Kvíggjartún, soleiðis at hon fevnir um alt C3 øki. Í hesum sambandinum verður almenna byggisamtyktin eisini dagførd, soleiðis at ávís byggisamtyktarmørk millum C3 og kringliggjandi umráðispartar fylgja viðkomandi matrikkulmørkum. Mælt verður til at víðka markið fyri C3 økið til at fevna um matr. nr. 56bp, sum er eitt parkeringspláss við atkomu

umvegis matr. nr. 56cb (Umhvørvisstovuna), sí *Almenn byggisamtykt – áðrenn broyting* og *Almenn byggisamtykt - eftir broyting*.

Undantikið sokallaða Alberthall og bygningin hjá Sp/f Farcod á matr. nr. 56cf, lýsa byggilinjur í fylgiskjali 2 eina møguliga víðkan av bygningum, soleiðis at hesir við tíðini hava møguleika at vaksa. Bygningurin á Kvíggjartúni 1, vanliga nevndur Alberthall, verður mettur at hava byggilistarligan týdning umboðandi tíðarskeiðið, tá ið hann var bygdur. Í hesum sambandi verður áseting skrivað, sum krevur tónaðar ella litaðar framsíður úr glasi. Bygningurin á matr. nr. 56cg er bygdur út um galdandi nýtslu- og byggistig, og eins og fyri Umhvørvisstovuna og bygningarnar á Hóvabrekku 1 og 3 (har Verkstaðið Vón heldur til) verður áseting løgd afturat, sum krevur, at húsamøn skal fylgja Traðagøtu ella tekja við einvegis takhalli skal fylgja lendinum.

Uppskotið um serstaka byggisamtykt fevnir um økini A, B, C og D, og samanumtikið er munurin á teimum hesin:

- Øki A: Ásetingar taka útgangstøði í verandi bygging, har stovnur undir almannaverkinum heldur til.
- Øki B: Ásetingar loyva eini lutfalsliga høga bygging. Hetta loyvir nýggja bygging fyri matr. nr. 56cg.
- Øki C: Ásetingar verja skapið og útsjóndina á Albertshall.
- Øki D: Ásetingar krevja javnfjara tekju ella at takhall fylgir lendinum.

Fyri alt C3 øki verður loyvi at byggja til bústaðir og miðstaðarendamál, t.e. handil, skrivstovur, stovnar, gistingarhús, matstovur, mentanarligar stovnar og tílíkt. Virksemið í økinum skal kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu. Vera bústaðir bygdir skulu minst 4 m^2 av felagshølum vera pr. bústaðareind. Til tess at tryggja fjølbroytt virksemi í økinum, verður kravt miðstaðarvirksemi so sum handil, skrivstovur, stovnar, matstovur, mentanarligir stovnar ella tílíkt fyri part av veghædd, sum vendir móti viðkomandi atkomuvegi (sí *Uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt fyri Kvíggjartún, okt. 2026*.)

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- *25/08970, Fyrispurningur um bygging o.a. á matr. nr. 56cg, Argir*

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Uppskotið hevur verið til innanhýsis hoyring í umsitingini. Av tí byggisamtyktarøkið mestsum er útbygt frammanundan, meta tekniskadeild og umhvørvisdeildin ikki, at ferðsla og undirstøðukervið broytist munandi sambært uppskotinum. Víst verður tó á, at vegir skulu gerast soleiðis, at neyðsendaraakfør, ruskbilar v.m. kunnu koyra inn og venda áðrenn teir koyra út aftur. Viðvíkjandi kloakk og regnvatn, so eigur at verða kannað eftir, um verandi skipan klárar at taka ímóti, ella um tað verður neyðugt við nýggjum rørum oman á sjógv, reinsiverki v.m.

Uppskotið er rættað sambært viðmerkingum frá byggimálsdeildini, ið mælti til at broyta ávísar ásetingar so tær eru einfaldari at umsita, og í samsvari við líknandi byggisamtyktir, tá tað kemur til krøv um parkering og felagshølir pr íbúð.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl

- *Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún, j.nr. 22/05301-17*
- *Derma_Íbúðar- & vinnubygningur_20260703, j.nr. 26/06144-1,*
- *Almenn byggisamtykt - Áðrenn broyting, j.nr. 26/06144-4*
- *Almenn byggisamtykt - Eftir broyting, j.nr. 26/06144-4*
- *Uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt fyri Kvíggjartún, okt. 2026, j.nr. 26/06144-3*

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingina av serstøku byggisamtyktini fyri Kvíggjartún smb. skjalinum *Uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt fyri Kvíggjartún, okt. 2026,* og at góðkenna broytingina í almennu byggisamtyktina fyri C3 øki sambært skjalinum *Almenn byggisamtykt - Eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at minst 50 % av niðastu hædd skal vera útvent virksemi í øki B, C og D.

310/26 Dagføring av sertstøku byggisamtyktini fyri Argjaboða, matr. nr. 43g og 43h, Argir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	05.05.2025	77/25	25/02905-4
2 Býráðsfundur	22.05.2025	137/25	25/02905-4
3 Byggi- og býarskipanarnevndin	10.06.2025	104/25	25/02905-4
4 Býráðsfundur	26.02.2026	43/26	25/02905-4
5 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	228/26	25/02905-4
6 Býráðsfundur	19.11.2026	310/26	25/02905-4

Upprunin til málið
Tórshavnar kommuna móttók 09.03.2022 umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr 43h. Umsóknin lýsir bygning niðanfyri Argjaboðagøtu við 16 íbúðum, og samtykt var at viðmæla umsóknini. Økið liggur innan fyri C3- miðstaðarbygging í almennu byggisamtyktini, og er krav um, at serstøk byggisamtykt verður gjørt fyri økið.

Serstøk byggisamtykt hevur síðani 2021 verið galdandi fyri matr. nr 43h (sí skjalið *SB_Argir_Argjaboði_2018_3_2021)*, ið er omanfyri Argjaboðagøtu, har verkætlan við 30 íbúðum er farin í gongd.

Hetta málið snýr seg um at víðka økið, sum serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, soleiðis at økið eisini fevnir um matr. nr 43h, og ætlanina at byggja 16 íbúðir har (sí skjal, *20240124_Myndugleikaprosjekt.pdf)*.

Lýsing av málinum
Ítøkiliga snýr broytingin seg um at rætta markið (sí *Kort 1 - Áðrenn* og *Kort 1 - Eftir broyting*), og at dagføra fylgiskjal 2 og 3, soleiðis at verandi serstaka byggisamtyktin fyri Argjaboða eisini rúmar íbúðarverkætlanina fyri matr nr. 43h (sí *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum.)*

Umsitingin ásannar, at tað eru býarskipanarligir vansar við at staðaseta íbúðabygging við endan á Argjaboðagøtu, og eru hesir, at vegurin er smalur og í ringum standi, umframt at núverandi busssamband ikki koyrir eftir vegnum. Hinvegin kann økta íbúðarútboðið á Argjaboða tálma bústaðarneyðini og fjøltátta bústaðarviftuna fyri niðara part av Argjum (gomlu bygdina), har stórt sæð øll grundstykkini eru løgd av til sethúsabygging. Somuleiðis er staðsetingin skynsom til tess at økja um íbúðartalið uttan at taka útsýnið frá verandi bygging og uttan at byggja á meira miðskeiðis staði í býnum, har kostnaðarstøði sannlíkt verður munandi hægri.

Lógir, ásetingar o.a.
Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Økisásetingarnar eru:

§ 17. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. grundumráði
1. Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging og íbúðir.
2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,4.
4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.

Upplýsingar frá umsitingini
Umsitingin hevur kannað søguligu gongdina fyri nær økið á Argjaboða varð broytt frá at vera vinnuøki til at gerast miðstaðarøki, sum loyvir íbúðarbygging. Vísandi til mál nr. *2003-1602, Meinhard Dam: Umsókn um broyting av ásetingunum av matr. nr. 43g, Argir – broyting av byggisamtykt á Argjaboða*, so er tað hendan umsóknin sum upprunaliga var við til at fremja broytingina í Almennu byggisamtyktini. Upprunaliga varð søkt um at broyta byggisamtyktina til A1 ella A3, og metti umsitingin, at rætta ásetingin fyri økið var A3, tá tað varð grundgivið við, at tað var tørvur á fleiri bústøðum í kommununi, umframt at tá Argja kommuna var løgd saman við Tórshavnar kommunu, so varð mett, at tað vóru aðrar betri egnaðar

staðsetingar til vinnuligt virksemi. Táverandi Innlendismálaráð metti ikki, at økið kundi broytast til bústaðarøki, tá tað lá so tætt uppat vinnuøkinum. Í 2008 varð økisásetingin fyri matr. nr. 43g broytt til C3, Miðstaðarbygging, sum loyvir íbúðarbygging, meðan restin av økinum framvegis lá sum vinnuøki. Seinni í 2008 varð restin av økinum á Argjaboða broytt til C3, Miðstaðarbygging.

Økið, sum uppskotið um serstaka byggisamtyktin fevnir um, verður økt til umleið 5630 m^2, og loyvir sambært verkætlanunum tilsamans 46 íbúðum við 54 p-plássum. Nýggja útboðið av íbúðum kann vera liður í at bøta um bústaðartørvin í Havnini. Staðsetingin er við endan á Argjaboðavegnum og er omanfyri 800 metrar burturi frá nærmastu bussleið. Tað er týdningarmikið, at nøktandi flytføri verður tryggjað eftir Argjaboðavegnum, soleiðis at tað er trygt at ganga, súkkla og koyra eftir vegnum.

Galdandi serstaka byggisamtykt varð góðkend av landsmyndugleikunum við treyt um, at strekkið fyribils verður regulerað við ljósregulering, áðrenn vegastrekkið verður breiðkað.
Tekniska deild upplýsir, at arbeitt verður við at gera ljósregulering fyri vegastrekkið Argjavegur til Argjaboðagøtu. Harumframt verður upplýst, at arbeitt verður við at nøkta atkomuna út á Argjaboða við at breiðka vegin, men verður vegastrekkið í fyrsta umfarið regulerað við ljósregulering.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
- *Umsókn um prinsipploysi og møguligar viðmerkingar til byggiloysi til íbúðarverkætlan á matr. nr. 43h, Argir*, journal nr. 22/01040
- *Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir,* journal nr 18/03069
- *Meinhard Dam : Umsókn um broyting av ásetingunum av matr nr. 43g, Argir - broyting av byggisamtykt á Argjaboða,* journal nr. 2003-1602

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Í viðgerð av málinum um Umsókn um prinsipploysi og møguligar viðmerkingar til byggiloysi til íbúðarverkætlan á Argjaboða (mál nr: 22/01040) vísa byggimálsdeildin og tekniska deild á, at:
- Uttasti parturin av Argjaboðagøtu er ikki nøktandi til so nógva bygging, sum ætlanin er at gera afturat. Vegurin er uml. 5 m breiður, har eru ongar gongubreytir, onki vendipláss og ongi almenn parkeringspláss.
- Kloakkir og aðrar leiðingar eru heldur ikki nøktandi.
- Roknast má tí við, at kommunan má gera eitt prosjekt fyri at dagføra vegin og leiðingar, og at hetta arbeiði má setast í verk innan ikki alt ov langa tíð.
- Eisini eigur kommunan at umrøða, um kommunala bussleiðin ikki eigur at koyra út til Argjaboða, nú ætlanin er at byggja so nógvar nýggjar íbúðir á staðnum.

Skjøl
- *SB_Argir_Argjaboði_2018_3_2021,* journal nr 25/02905-6
- *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum,* journal nr 25/02905-6
- *Kort 1 - Eftir broyting,* journal nr 25/02905-5
- *Kort 1 - Áðrenn broyting*, journal nr 25/02905-5
- *20240124_Myndugleikaprosjekt.pdf,* journal nr 25/02905-1

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at dagføra serstøku byggisamtyktina fyri Argjaboða sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum*, og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025: Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir taka ikki undir við tilmælinum.

Kári Johansen atkvøður blankt. Birgir Nielsen og Kári Johansen krevja málið fyri býráðið.

Býráðsfundur 22. mai 2025: Einmælt samtykt at beina málið aftur í nevnd.

Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025: Nevndin tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til, at málið verður tikið upp aftur, tá vegatkoman og verandi byggivirksemi eru broytt.

Býráðsfundur 26. februar 2026: Atkvøtt varð um tilmælið frá umsitingini, ið varð samtykt við seks atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Bergur Robert Dam Jensen,.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein.

Ískoyti
Uppskotið lá til almenna hoyring millum 4. mars og 15. apríl 2026. Kommunan móttók 7 hoyringarskriv (sí *Viðmerkingar og broytingaruppskot apríl. 2026).*

Seks av mótmælunum snúgva seg um ferðsluviðurskifti, og verður samanumtikið frámælt at byggja og økja um íbúðartalið á Argjaboða, áðrenn hóskandi vegaloysn er framd. Eitt hoyringarskriv mælir til at víðka markið fyri serstøku byggisamtyktini, so tað fevnir um matr. nr. 43l og 43n, í sama C3-miðstaðarøki.

Í mótmælunum verður grundgivið fyri hesum:
- Fleiri íbúðir fara at økja um ferðsluna. Kommunan kann ikki góðtaka hetta, tá vegurin í støðum er einsporaður.
- Ongar gongu- og ella súkklubreytir eru í støðum, og eru hesi vegastrekkir vandamikil fyri bleytu ferðsluna, íroknað børn, sum dagliga ganga/súkkla til og frá skúla.
- Borgarar á Argjaboða hava fingið lovað, at eingin íbúðarbygningur bleiv bygdur við endan á Argjaboða, fyrr enn vegurin bleiv nútímansgjørdur.
- Býarbussurin átti at tænt Argjaboða. Umsitingin hevur áður frámælt at bussur koyrir vegna vánaliga vegin, og tí tykist tað mótsigandi at loyva fleiri íbúðum.
- Byggisamyktin eigur at víðkast til at fevna um 43l og 43n, av tí at íbúðarøkið við Argjaboða kann væntast at vaksa í framtíðini.

At enda skal leggjast afturat, at áðrenn uppskotið fór til almenna hoyring, hevur advokatur, umboðandi felagið Sp/f FaroeWater (eigari av matr. nr. 43h) víst á, at ferðslan sannlíkt ikki fer at økjast í mun til verandi vinnuliga virksemi, og at tað í øllum førum verður lættari ferðsla, tá ið verandi vinnuvirksemi í framtíðini verður broytt til bústaðarendamál (Sí *Skriv til Tórshavnar kommunu*).

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin metir, at um báðar íbúðarverkætlanirnar við matr. nr. 43g og 43h verða framdar sambært uppskotinum, fer íbúðartalið við 46 eindum og 54 parkeringsplássum at økja ferðslutrýstið munandi. Íbúðirnar kunnu svara til ein fólkavøkstur á omanfyri 80 borgarar á Argjaboða, og er talan tá um eina

tvífaldan av verandi íbúgvaratalinum uttan fyri einsporaða vegastrekkið. Tískil kann væntast ein tvífaldan av verandi bilaferðslu.

Uppskot er gjørt, sum lýsir eina breiðkan av vegnum í støðum, og har gongubreyt er fram við neystunum. Sambært uppskotinum verður vegurin framvegis einsporaður á einum umleið 20 m strekki. Sostatt verður ongin súkklubreyt, sum víst hevur verið á í viðmerkingunum. Umsitingin metir tó, at henda loysnin er hóskandi til væntaða ferðslutrýstið, og tá einsporaða vegastrekkið stundum elvir til bíðistøður, fer hetta samstundis at hava eina ferðslutálmandi ávirkan, til frama fyri ábæra ferðslu. Kring landið finnast dømir um býlingar og bygdir, sum einans kunnu røkkast umvegis einsporað vegastrekki, eitt nú í Sandavági, har helmingurin av bygdini er handan einsporaðar brýr.

Í mun til ynskið um at umleggja bussleiðina verður mælt til, at hetta verður gjørt út frá eini langtíðarheildarmeting, og ikki so hvørt sum íbúðir vera bygdar í ávísum støðum. Nærmasta bussstøðgistað er omanfyri 10 min gangifrástøðu frá Argjaboða, og er hetta ein lutfalsliga long frástøða í Tórshavnar kommunu. Líknandi fjarstøða er við endan við Klingurstjørn.

Í mun til at víðka serstøku byggisamtyktina til at fevna um matr. nr 43l og 43n, verður í hesum førinum mælt frá møguligari íbúðarbygging í hesum økinum, til ferðsluviðurskiftini eru dagførd, og eitt ítøkiligt uppskot fyriliggur, sum lýsir, hvat ætlanin er at byggja á matr. nr. 43l og 43n.

Umsitingin mælir til, at bíðað verður við at byggja íbúðir á matr. nr. 43h til vegaviðurskiftini eru dagførd, og fer tí at mæla til at uppskotið verður sent landsmyndugleikum til endaliga góðkenning, eftir at arbeiði at dagføra vegin er farið í gongd.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- *Dagføring av vegnum Argjavegur / Argjaboðagøta - 19/04645, journal nr. 25/05410,*

Nýggj skjøl

- *Viðmerkingar og broytingaruppskot apríl. 2026, journal nr. 25/02905-24*
- *Skriv til Tórshavnar kommunu, journal nr. 25/02905-13*

Tilmæli

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið um broyting av serstøku byggisamtyktini og beina málið í býráðið, men at uppskotið verður sent landsmyndugleikum til endaliga góðkenning, tá ið dagføringin av vegnum er farin í gongd.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Ein minniluti, Anja Weyhe, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

311/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	21.11.2025	183/25	25/01100-7
2 Býráðsfundur	11.12.2025	275/25	25/01100-7
3 Byggi- og býarskipanarnevndin	08.05.2026	122/26	25/01100-7
4 Býráðsfundur	04.06.2026	185/26	25/01100-7
5 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin	11.06.2026	7/26	25/01100-7
6 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	227/26	25/01100-7
7 Býráðsfundur	19.11.2026	311/26	25/01100-7
8 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin			25/01100-7

Upprunin til málið
Hetta málið snýr seg um at endurskoða byggisamtyktina fyri Kirkjubø og hevur sín uppruna í máli um Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri allar bygdirnar í kommununi, sí *45/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 12.02.2024 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*

Fyri fleiri av bygdunum, harímillum Kirkjubø, eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar í síni heild, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar torskildar og truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Hetta málið er harumframt eitt framhald av málinum *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø,* j.nr. *22/00590,* sum ítøkiliga snýr seg um endurskoðanina fyri byggisamtyktina í Kirkjubø, sí *Upprunalig málslýsing, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22-00590*

Lýsing av málinum
Kirkjubøur er saman við Velbastað fevnt av byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað, ið varð gjørd í 1987. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur og Velbastaður fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar eru samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, eru hesi ymisku økini í bygdini:

- B: Sethús
- C: Vinnuendamál
- C1A: Vinnuendamál
- D: Havnarøki
- D 1: Ferjuhavn
- E: Almennir stovnar
- F: Almenn frítíðarøki
- G: Neyst og bátapláss
- H: Frílendi
- H 1: Friðað øki
- J: Bóndahús
- K: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað færri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø.

- B: Sethúsaøki er broytt til A: Bústaðarøki
- Tey bæði vinnuøkini C: Vinnuendamál og C1A: Vinnuendamál eru broytt til B2: Vinnuøki.
- Tey bæði havnarøkini D: Havnarøki og D 1 : Ferjuhavn, eru broytt til B1: Havnarøki.
- Tey bæði almennu økini E: Almennir stovnar og F: Almenn frítíðarøki eru broytt til D2: Almennir stovnar og mentan.
- G: Neyst og bátaplass er broytt til E: Neyst.
- Tey bæði almennu grønu økini H: Frílendi og H 1 : Friðað øki eru broytt til D1: Frílendi.
- J: Bóndahús er broytt til G: Bóndahús.
- K: Landbúnaður er broytt til 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ítøkiligu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025.*

Lógir, ásetingar o.a.
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

Upplýsingar frá umsitingini
Upprunaliga uppskotið (sí skjal *25/01100-14, Upprunaligt uppskot, 21.11.2024*) varð samtykt í býráðnum 21. mars 2024 og lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum millum 22. november og 29. januar 2025. Kommunan móttók fimm hoyringarskriv (sí *Viðmerkingar og broytingaruppskot)* umboðandi borgarar í Kirkjubø og Tjóðsavnið, og verða allar viðmerkingarnar viðgjørdar niðanfyri.

Samanumtikið snúgva viðmerkingar seg um at verja dámin, og at leggja fleiri økir út til sethúsaøki. Eitt møguligt neystaøki eigur at endurhugsast í øðrum staði. Mótstríðandi sjónarmið eru um miðstaðarøkið í bygdini, har ynskið annaðhvørt er, at økið skal mennast til ferðavinnuendamál, ella nýtast sum nýtt bústaðarøki. Tjóðsavnið vísir á týdningin, at møgulig bygging í Kirkjubø verður framd varliga og í samráð við friðingarmyndugleikar.

- **Øki C og øki G, sambært uppskotinum, skal kunna nýtast sum ferðavinnuligt øki**

Bygningsleivdir o.a. vitjunarvert í økinum skal kunna gagnnýtast av festinum í ferðavinnuligum samanhangi bæði nú og framyvir. Øki C, sambært uppskotinum, er egnað til útbygging og nýbygging av ferðvinnuvirksemi. Víst verður á, at gamla fjósið (í uppskotinum í øki G) ikki longur er egnað til landbúnaðarligt virksemi, og at tað er meira skynsamt, at bygningurin verður dagførdur við ferðavinnuligum endamálum. Byggisamtyktin skal stuðla og ikki forða framtíðar útbygging og umvæling av bygningum til hesi endamál.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Eftir nærri viðgerð í umsitingini verður mett óhóskandi at útbyggja bøin omanfyri Gamla veg. Mett verður, at fløtan eigur at verða varðveitt, soleiðis at dámur og sýnið heim í gomlu bygdina verður tryggjað.

Umsitingin er samd í, at gamla fjósið kann mennast og endurnýtast til ferðavinnuligt endamál, og hevur gjørt eitt nýtt uppskot, har ásetingar fyri miðstaðarøkið vera galdandi millum fjósið og havnarlagið. Partur av óbygda bønum eystanfyri verður broyttur til D1 øki (frílendi).

Til tess at tryggja, at bygging í øki C verður framd við fyriliti til serstaka økið, metir umsitingin, at tað er neyðugt at rætta punkt 2 í øki C, sum nú sigur:

"Bygging verður einans loyvd sambært eini byggiætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrligt avmarkað øki. "

soleiðis at tað ístaðin stendur:

"Bygging verður einans loyvd sambært heildarætlan, sum sýnir, hvussu økið verður skipað, og sum verður góðkend sum serstakt skjal av býráðnum og avvarðandi myndugleikum."

- **Fleiri bústaðarøkir**

Í broytingaruppskotið (10 undirskriftir) verður grundgivið fyri at leggja fleiri nýggj bústaðarøkir afturat. Sambært viðmerkingini er tað av alstórum týdningi at veita møguleika at byggja fleiri bústaðir skjótt, soleiðis at yngri fólk leggjast afturat og bygdin verður framtíðartryggjað. Hesi ítøkiligu broytingaruppskot verða nevnd:

- **Mælt verður til at øki C (miðstaðarøki) sambært uppskotinum verður broytt til øki A (sethús).**

Hetta økið kann sambært viðmerkingini leggjast til bústaðarbygging á ein skjótan og ómakaleysan hátt, av tí at tekniskar leiðingar liggja tætt við. Víst verður eisini á, at nógv orka hevur verið løgd í at menna ferðavinnuna í Kirkjubø seinastu árini, og er hendan broytingin tískil ein tiltrongd umraðfesting.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Vísandi til viðmerking omanfyri metir umsitingin, at økið hevur týdning sum óbygt frílendi, og verður frámælt at byggja nýggjar bústaðir so tætt at søguliga økinum, ið telist millum mest vitjanarverdu býlingar í landinum.

- **Fleiri sethús í Lágabø**

Mælt verður til, at sethúsaøkið í Lágabø verður økt, soleiðis at møguleiki verður at byggja eitt hús hvørjumegin vegin, við innkoyringina til býlingin, umframt at vegurin verður longdur, soleiðis at pláss verður fyri umleið fýra sethúsum vestanfyri.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin er jalig fyri møguleikanum at víðka sethúsaøkið, og hevur tillagað uppskotið samsvarandi broytingaruppskotinum, soleiðis at býlingurin hevur møguleika at veða víðkaður í framtíðini. Byggisamtyktarøkið verður víðkað sambært eini ætlan, har mælt verður til grundstykkjavíddir á uml. 400m^2, umframt at pláss verður lagt av til parkering.

- **D1 økið millum Geilina og Ovaraveg skal broytast til A (sethús)**

Mælt verður frá at áseta frílendi, har galdandi F økið sambært uppskotinum verður broytt til D1 (partur av matr. nr 25b). Spælipláss við fótbóltsvølli er staðsett nærhendis, og sambært grundgevingini er bygdin mestsum eitt stórt frílendi. Ístaðin átti hetta økið at verið broytt til sethúsaøki.

Síðani hoyringsfreistin er farin, hevur kommunan samskift við eigarar av matr. nr. 25b, (sí mál mál nr. J.nr. 25/06086) og ynskja tey somuleiðis, at byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at fríøkið framyvir verður broytt til sethúsaøki.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Staðsetingin av matr. nr 25b er miðskeiðis í bygdini, har fleiri vegir renna saman, og er eingin beinleiðis atkomuvegur til økið. Tískil eru umstøður, ið tala fyri, at økið verður ment sum fríøki ella spælipláss fyri bygdina. Hóast ásetingar fyri F-alment fríøki hava verið galdandi síðani áðrenn kommunusamanleggingina, er henda ætlanin ongantíð framd, og ístaðin er spælipláss staðsett á matr. nr 20c.

Mælt verður til at ganga viðmerkingini á møti, so at sethúsaøkini omanfyri Geilina og Ovaraveg hava møguleika at verða knýt saman í framtíðini. Sambært matrikkullógini § 17 stk 8, kunnu matriklar ikki býtast

frá, uttan við atgongd til almennan veg, og er menning av økinum tískil treytað av, at eigari tryggjar nøktandi vegatkomu.

- **A økið vestan fyri "Inni á Fjósi 6" verður broytt til C øki**

Ynskið er ikki, at Kirkjubøur skal mennast sum ein long og "óbygdaslig" bygd. Økið vestan fyri Inni á Fjósi 6 eigur heldur at verða lagt av til íbúðarbygging, sum kann tryggja, at eldri borgarar í Kirkjubø fáa møguleika at selja hús og flyta í minni íbúð. Hetta kann skapa umstøður, so yngri familjur fáa gagnnýtt hús í bygdini.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum um endurskoðan er omanfyri 300 m langur geiri avsettur til sethúsabygging omanfyri grúsvegin vestan fyri Inni á Fjósi 6. Henda ásetingin hevur verið galdandi síðani 80'ini, uttan at útstykking er framd. Umsitingin er samd í, at tað ikki er ynskiligt at menna kirkjubø sum eina avlanga og smala bygd.

Umsitingin metir tó ikki, at íbúðarbygging hóskar til dámin í Kirkjubø, og mælir tískil frá at leggja økið av til C-miðstaðarbygging. Ásetingar til miðstaðarbygging hava til endamáls at skipa tætta og fjølbroytta bygging miðskeiðis í bygdini.

Mælt verður til at strika nevnda byggilendið, og at støða kann takast til nýtslu, snið o.a. í samband við eina ítøkiliga bygdaætlan.

- **Leggja áseting afturat, sum tryggjar, at sethús hava mønureising, eru svørt/myrk og hava hvít ella reyð vindeygu.**

Ynskið er at gera ásetingar, sum tryggja dámin, tá bygdin í framtíðini verður ment.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Verandi dámur, har flestu sethúsini hava mønureising, eru svørt, hava reyð ella hvít vindeygu, er staðbundin siður, ið hevur ment seg uttan treytir í byggisamtyktini. Av tí at talan er um serstakt arkitektoniskt brigdi fyri Kirkjubø, sum umsitingin metir er vert at verja, er uppskot um áseting lagt afturat, sum hevur til endamáls at verja henda dámin framyvir.

Umsitingin gongur viðmerkingini á møti við at strika møguleika at byggja sethús við einvegis takhalli, og leggur niðanfyristandandi orðing afturat ásetingum galdandi fyri umráðispart A:

"10. Dámurin skal varðveitast í samsvari við føroyskan byggisið. Framsíður og skjøldrar skulu vera úr viði og skulu vera svørt ella myrk. Vindeygu skulu vera hvít ella reyð. Tekjur skulu vera svartar, grønar ella flagaðar."

- **Óheppin hæddarbroyting í sethúsaøki**

Mest loyvda hædd til mønu í sethúsaøkjum hækkar úr 8 m upp í 9 m, og hetta kann føra til óhóskandi hús í bygdarmyndini.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Av tí at galdandi áseting tekur útgangstøði í miðaljørðildi, so merkir tað í veruleikanum, at hús í brøttum lendi, og í ávísum førum kunnu byggjast upp um 9 m. Dømir eru um, at hús eru bygd hægri enn 8 m í Kirkjubø. Uppskotið tekur útgangstøði í, at mátað verður frá planeringskotu, og er betri í samsvari við bygging, har innleggingar so sum ventilatión er millum hæddirnar.

Broytingin merkir tó, at í sløttum lendi sleppa hús hægri enn í verandi áseting, men av tí at onki nýtt sethúsaøki er lagt út upp at søguligu húsunum, metir umsitingin ikki at henda ásetingin viðførir týðandi broytingar í bygdamyndini.

- **Ynskið um at tryggja íbúgvum úr Kirkjubø fyrsta rætt til nýggj grundstykkir**

Ynskið er, at skipan verður sett í verk, sum hevur til endamáls at tryggja, at borgarar búsitandi í Kirkjubø koma í fyrstu røð, tá ið nýggj grundstykkir vera útlutaði. Lagt verður afturat, at borgarar við tilknýti til bygdina (t.d. tey, ið eru uppvaksin í Kirkjubø) koma í aðru røð.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Treytir í sambandi við útlutan av grundøkjum hoyra ikki til ásetingar í byggisamtykt.

Býráðið hevur í 2023 samtykt reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús, og stríðir broytingaruppskotið ímóti reglugerðini, sum raðfestir borgarar við skrásettum bústaði í Tórshavnar kommunu, umframt føroyingar í lestrarørindum. Ynskjast aðrar treytir fyri Kirkjubø, verður mælt til at taka málið upp í serstøkum málið, sum í fyrstu atløgu skal takast upp í staðbundnu nevnd.

- **Bústaðarskylda**

Bygdin er lítil og tað hevur stóran týdning, at hús ikki standa tóm. Mælt verður til bústaðarskyldu, og at tryggja langtíðarleigumál, soleiðis at hús ikki vera bygd ella keypt við stutttíðarútleigu (summarhús) sum endamáli.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Ein býarskipanarlig avbjóðing í allari kommununi er at fyribyrgja, at býlingar standa tómir, og er tað ynskiligt, at hetta framyvir í størri mun verður skipað í summarhúsaøkjum (F øki í byggisamtyktini). Umsitingin hevur í hesi løtu ikki heimild at seta krøv um bústaðarskyldu í byggisamtykt, men hevur áður heitt á landsmyndugleikar at fáa møguleikar til tess. Umsitingin hevur eisini heitt á landsmyndugleikar um at fáa heimild at avmarka stutttíðarleigu.

- **Staðseting og ásetingar fyri neystaøkið**

Eigari av neystagrund matr. nr 17 vísir á, at økið sambært uppskotinum verður innan fyri øki C, har byggi- og nýtslustigi er ávikavist 0,25 og 0,5, og ynskir at hendan ásetingin verður broytt, soleiðis at byggjast kann út í mark, sum vanligt er í neystagrundum.

Í einum øðrum hoyringsskrivi sigur sami borgari, at staðseting av neystaøkinum sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum er óheppin, tí at um økið verður nýtt til nýggja neystabygging fer tað at hava neiliga umhvørvisliga ávirkan á fugla- og djóralívið.

Mælt verður ístaðin til at leggja neystaøkið á Gomlurætt, har tað er somuleiðis er møguleiki at menna eitt øki til frítíðarlív kajakk/seyðaberg o.a.

Tjóðsavnið vísir somuleiðis á, at tað sambært uppskotinum verður møguligt at byggja neyst upp í 7 m, og at hendan hæddin er alt ov dominerandi. Sambært Tjóðsavninum er tað er óheppið, um frítíðarhús verða bygd fram við fjøruni – serliga í Kirkjubø.

Tað verður **staðfest**, at tað helst er **ein feilur**, at uppskotið loyvir frítíðarhús í neystum, tí býráðið samtykti tað øvugta, sí mál mál (*J.nr. 22/00590 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø*).

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin er samd í viðmerkingini frá Tjóðsavninum viðv. neystabygging, ið loyvir frítíðarbústøðum í Kirkjubø, og er talan um ein feil, tá útgávan við hesi áseting varð løgd til almenna hoyring. Umsitingin gongur mótmælunum frá borgara og Tjóðsavninum á møti við at gera nýtt uppskot, har neysatøkið fram við fjøruni verður broytt til D1-frílendi.

Gomlu neystagrundirnar (matr. nr. 17, 11, 14 og 26) kunnu annaðhvørt flytast í einum møguligum makaskifti, ella byggjast uppaftur í verandi staðseting, men um tað seinna verður gjørt er, sum víst á í viðmerking omanfyri, neyðugt at loyva bygging út í mark (tvs. eitt byggistig á 1), og eitt tilsvarandi nýtslustig. Umsitingin mælir til, at varðveita C øki, men at leggja viðkomandi áseting og tabel afturat, sum loyvir einum øktum nýtslu- og byggistigið í takt við minkandi matrikkulvídd. Tá ið matrikkulvíddin er 50m^2 ella minni, verður byggistigið og nýtslustigið 1. Endamálið við tílíkari áseting er, at møguleiki verður at byggja bygningar við íblástri frá gomlu neystarøðini upp aftur, og at hesir í framtíðini eisini kunnu brúkast til miðstaðar endamál. Áseting um, at bygging einans verður loyvd sambært góðkendari heildarætlan í øki C, hevur til endamáls at tryggja, at ein møgulig bygging á matr.nr 17, 11, 14 og 26, verður framd við virðing fyri søguliga nærumhvørvinum.

Møguleiki er at skipa neystabygging í leingjan av einum frítíðardepli á Gomlurætt. Tó metir umsitingin, at tað er skilabest, at møgulig byggisamtyktarbroyting í hesum sambandi eigur at veða gjørd, eftir at umstøður fyri hesum eru betri kannaðar, og ein møgulig ætlan fyriliggur.

- **Óheppin broyting av lendingini til byggiøki (B1)**

Sambært uppskotinum verður **lendingin og grótkastið broytt til B1-øki**, og er **møguleiki at byggja á økinum**. Hetta verður mett sum **óhóskandi**, hóast 12 m frástøða frá bryggjutrom er ásett.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar
Sambært uppskotinum kann ikki byggjast nærri enn 12 m frá bryggjutromini, og verður tískil fyribyrgt at byggjast kann í økinum. Tó staðfestir B1 ásetingin at økið verður tilskilað virksemi, ið hevur við havnarøki at gera, og metir umsitingin at ásetingin tískil er hóskandi.

- **Ógreið og mótsigandi áseting um landbúnaðarøki (G)**

Gamla J-økið ("Bóndahús") er broytt til G-øki, men **ásetingin er ógreið**. **Stóra fjósið** frá 1800-talinum liggur í hesum øki og hevur mentanarligan týdning**.**

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Vísandi til fyrstu viðmerking og svar frá umsitingini, er ásetingin í fyrsta uppskotinum sannlíkt ikki hóskandi, og verður økið í nýggjum uppskotið lagt til C miðstaðarbygging, sum rúmar møguleika fyri meira fjølbroyttum virksemi.

- **Avtøka av friðaðum øki (H1) – uttan samráð við Tjóðsavnið**

Verandi **H1-øki (friðað fornminnaøki)** verða sambært uppskotinum tikin burtur og løgd sum D1-øki (frílendi).

Hetta er **óhóskandi**, tí H1-økini vóru gjørd í samstarvi við Tjóðsavnið fyri at tryggja fornminni. Slík broyting **eigur at verða viðgjørd saman við Tjóðsavninum** áðrenn. Tá fornminnaøkini **ikki eru sjónlig á kortinum**, er vandi fyri, at tey **verða yvirsædd í framtíðar byggiplanum**.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin hevur atgongd til kort, sum lýsa fornminnir, og er tað týdningarmikið, at hesi eru dagførd, almenn og eftirfarandi, í sambandi við viðkomandi málsviðgerð av byggisamtyktum og broytingum av býarplanum. Umsitingin metir ikki, at tørvur á at áseta friðað økir í serligum umráðisparti, sum nágreinar orsøk fyri, at eitt øki verður lagt til frílendi, tá ið D1 økið lýkur hesa treyt.

Umsitingin ásannar tó, at serlig lendiseyðkennir og fornminnir kunnu gerast meira sjónlig á talgiltum kortum, til tess at gera tað lættari at síggja, hvørji og hví ávís økir í framtíðini krevja viðgerð og hoyring hjá friðingarmyndugleikum.

- **Ov víðgongd bygging í miðstaðarøki (C)**

Verandi E-øki (almennir stovnar) verður víðkað og broytt til **C-øki (miðstaðarbygging)** heilt oman í fjøruna. Ásetingin loyvir **handlum, gistingarhúsum og matstovum**, sum **ikki hóskar til bygdina ella til fornminnaøkið**.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin metir, at virksemi so sum handil, matstova og gistingarhús kann hóska til bygdina, um hetta verður bygt og umsitið við serligum atliti til søguliga dámin og verandi virksemi. C økisparturin verður mettur at hóska til bæði farstøðina og parkeringsplássi, sum tænir gomlu bygdini og øllum virkesminum har.

- **B2 økið hóskar ikki á matr. nr 3b og part av matr. nr. 3a**

Økið við vakstrarhúsið norðan fyri Gomlurætt, sum í løtuni er lagt av sum C1A øki, vinnuvirki, ið hevur við matvøruframleiðslu at gera, verður broytt til B2 øki, vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt. Tjóðsavnið viðmerkir, at talan er um eina stóra broyting, har farið verður frá landbúnaðarvirksemi til vinnuvirksemi yvirhøvur.

Náttúrufriðingarnevndin (og síðani yvirfriðingarnevndin) kann geva loyvi til bygging uttangarðs í sambandi við landbúnaðarvirksemi. Um økið verður broytt til at kunna rúma annað virksemi, má hetta í øllum førum til viðgerðar sambært náttúrufriðingarlógini. Tjóðsavnið heldur tað vera skeivt at leggja vinnuligt virksemi úti í náttúruni. Sambært uppskotinum kann byggjast upp til 10 m hædd í B2 økjum, og er hetta sambært Tjóðsavninum alt ov nógv í einum tílíkum lendi. Tað eigur ikki at vera loyvd hægri bygging enn verandi. Tjóðsavnið skjýtur upp, heldur at broyta ásetingina fyri økið til at vera 4. grundumráði.

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Viðkomandi øki verður nýtt til vinnuligt virksemi, og er B2 samsvarandi áseting í uppskotinum um at endurskoða byggisamtyktina. Umsitingin ásannar, at um alt økið, soleiðis sum tað er ásett í uppskotinum, verður víðkað til vinnuligt virksemi, umframt at bygt verður í 10 m hædd, er talan um eitt ógvusligt inntriv.

Í nýggjum uppskotið verður markið broytt til økið kring bygningin, og tryggjar hetta, at tað ikki verður møguligt at byggja hægri enn verandi bygning.

- **Ógreiðleikar og ósamsvar í byggisamtyktini og býarskipanini**

At enda vísir Tjóðsavnið á, at umráðispartar (D2 og F) eru **nevnd í byggisamtyktini**, men **síggjast ikki á kortinum (býarplaninum)**. Hetta ger tað **torført at fáa greiðu á, hvat í veruleikanum verður broytt.**

Umsitingin hevur hesar viðmkeringar:
Tað er rætt, at ásetingar verða nevndar í uppskotinum um nýggja byggisamtykt, sum ikki eru at síggja í kortinum (býarplaninum), og ásannar umsitingin, at hetta kann tykjast ógreitt. Orsøkin til hetta er, at tað verður mett hóskandi, at nýggja byggisamtyktin fevnir um møguligar ásetingar, sum eru galdandi fyri aðrar bygdir í kommununi, soleiðis at tað er møguligt at brúka hesar ásetingar til hóskandi økir í býarplaninum í framtíðini, um tørvur er til tess. Hetta er leisturin, sum varð samtyktur í samband við málið um at endurskoða allar bygdirnar í kommununi (mál nr: 20/04243).

Samanumtikið
Nýtt uppskot um byggisamtykt fyri Kirkjubø er orðað og sæst í skjalinum *Uppskot um almenna byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025*. Samanumtikið eru sethúsaøkini (A) á kortinum broytt: Geirin vestanfyri inni á Fjósi 6 er strikaður. Bústaðarøkir eru løgd afturat fram við Lágabø og millum vegirnar Í Geilini og Ovara veg, samsvarandi við hoyringsskrivum. Og ein nýggjur geiri er teknaður í matr. nr. 15a oman fyri Ovaraveg. Staðbundna nevndin hevur borið mál fram um at finna fleiri sethúsastykkir (sí mál 25/04052), og eru hesar broytingar í samsvari við hetta mál.

Treytir um, at nýggj sethús skulu hava sama dám, eru skrivaðar í byggisamtyktina. Neystaøkið (E) og Bóndahús (G) økini eru tikin burtur úr uppskotinum, og eru ásetingar fyri miðstaðarøki (C) broyttar, soleiðis at markið er rættað og fevnir um gamla fjósið, meðan bøurin millum spæliplássið og bussterminalin í stóran mun er lagdur sum frílendi.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
- *J. nr. 20/04243 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*
- *J.nr. 22/00590 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø*
- *J.nr. 21/03382 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*
- *J.nr. 25/06086 Umsókn um broyting av fríøkið matr. nr. 25b, Ovarivegur 16, Kirkjubøur*
- *J.nr. 25/04052 Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø*

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið, og vóru eftirfylgjandi gjørdar hesar broytingar:

1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III §3)

Byggimálsdeildin setti eisini spurnatekin við, um heimild er at loyva/sýta ávísa vegetatión, soleiðis sum orðað í innleiðandi tekstinum undir yvirskriftini “Endamál”. Innleiðandi teksturin í byggisamtyktini er tikin úr galdandi byggisamtykt, og er ynskiligt at varðveita tekstin, áðrenn ein nýggj bygdaætlan er dagførd fyri

Kirkjubø. Upprunaliga brotið, sum sipar til planting av trøum og runnum kring vegir og býlingar er tó fyribils tikið úr, vísandi til viðmerking um væntandi heimild at kunna krevja/sýta ávísa vegetatión.

At enda viðmældi byggimálsdeildin at talmerking av greinum ikki byrjar umaftur undir hvørjum kapitli, men ístaðin er kronologiskt fyri alla byggisamtyktina. Hetta er vanligur bygnaður í kunngerðum og lógum, og sambært byggimálsdeildini, eisini lættari at umsita.

Býarskipanardeildin vil tó fyribils ikki at broyta bygnaðin, av tí at verandi bygnaður er galdandi í øllum byggisamtyktunum í Tórshavnar kommunu, og er m.a. eitt av endamálunum í hesi endurskoðan at javnstilla byggisamtyktirnar í bygnaði. Býarskipanardeildin vil taka hesa viðmerking til eftirtektar í eini komandi dagføring av byggisamtyktini.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐

Skjøl
- *J.nr. 20/04243-1 45/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 12.02.2024 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*
- *J.nr. 25/01100-14 - Upprunalig málslýsing, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22-00590*
- *J.nr 25/01100-14 – Upprunaligt uppskot, 21.11.2024*
- *J. nr. 25/01100-8 - Viðmerkingar og broytingaruppskot*
- *J.nr. 25/01100-13 - Kirkjubøur kort - áðrenn broyting*
- *J.nr. 25/01100-13 - Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025*
- *J. nr. 25/01100-13 Almenna byggisamtyktin - Kirkjubøur - Við markeraðum broytingum*
- J*.nr. 2*5/01100-13 *Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting*
- *j.nr. 25/01100-13 Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025*

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kirkjubø sambært skjølunum *Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025*, og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Býráðsfundur 11. desember 2025: Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, eini atkvøðu ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Ískoyti:
Uppskotið lá til almenna hoyring frá 19. desember 2025 til 3. februar 2026. Kommunan móttók fimm hoyringarskriv, sí skjal nr. *Viðmerkingar og broytingaruppskot jan. 2026, j.nr. 25/01100-24,* umboðandi Búnaðarstovuna, festarar, borgarar í Kirkjubø og Bóndafelag Føroya.

Niðanfyri verða allar viðmerkingarnar viðgjørdar og svaraðar av umsitingini.

- **Ov stutt hoyringsfreist**

Í viðmerkingunum verður funnist at væntandi tíð at viðmerkja uppskotið, og at festibóndir ikki hava verið hoyrdir í tilgongdini.

Svar frá umsitingini:
Fyrsta uppskotið lá til almenna hoyring millum 22. novembur 2024 og 29. januar 2025. Sambært § 6 í byggi- og býarskipanarlógini skal hoyringstíðarskeiðið vera 6 vikur, men varð freistin longd vegna almennan borgarafund um uppskotið 22. januar 2025. Dagførda uppskotið hevur somuleiðis verið lagt til almenna hoyring í 6 vikur. Viðmerkingar hjá festibóndum hava verið viðgjørdar í fyrsta uppskotinum eins og tær vera viðgjørdar niðanfyri.

- **Landbúnaðarlendið minkar**

Búnaðarstovan frámælir bygging á teimum økjunum, sum sambært uppskotinum í framtíðini kunnu mennast til sethúsaútstykkingar, og vísir á týdningin at varðveita landbúnaðar- og matvøruframleiðslulendi. Grundgivið verður eisini út frá sáttmálanum um kommunusamanlegging, sum staðfestir at Kirkjubøur skal varðveitast sum landbúnaðarbygd. Harumframt vísir Bóndafelagið á, at sambært landbúnaðarpolitikkinum hjá landinum skal góð landbúnaðarjørð framyvir ikki takast til byggilendi, og tískil stríðir byggisamtyktaruppskotið ímóti løgtingsins vilja.

Svar frá umsitingini:
Umsitingin tekur undir við at landbúnaðarlendið eigur at virðast og verjast eins og samleikin hjá Kirkjubø sum landbúnaðarbygd. Byggisamtyktaruppskotið hevur samstundis til endamáls at víðka møguleikar at seta búgv, vísandi til mál um Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø (mál nr 25/04052), har stabundna nevndin ynskir raðfestan av fleiri sethúsaøkjum í Kirkjubø.

Hesi ynskir umboða mótstríðandi áhugamál, og avbjóðingin gerst ikki minni fløkjaslig av tí stóra siðsøguliga virðinum sum Kirkjubøur hevur, og sum menningarætlan fyri ferðavinnu staðfestir.

Byggisamtyktaruppskotið kemur at umboða ymisk áhugamál og kann elva til neyðsemjur. Umsitingin metir tað vera tørv á eini bygdaætlan, sum lýsir áhugamálini nærri og tekur støðu til, hvussu ein framtíðar menning skal fyrihalda seg til hesi. Í dagførdum uppskotið verður nýtt byggilendi til sethús avmarkað til økið eystan fyri verandi útstykking Í Lágabø, niðanfyri Í Geilini og fyri matr. nr 25b millum Geilina og Ovaraveg. Uppskotið verður broytt, soleiðis at øki við matr. nr. 15a, fram við Ovaraveg og matr. nr 8a, t.e. leingjan av vegnum Í Lágabø, verður varðveitt sum bøur, vegna landbúnaðarliga virðið.

- **Matr. nr 21a niðanfyri Í Geilini skal varðveitast sum bøur**

Búnaðarstovan mótmælir ítøkiliga bygging á hesum økinum, og er hetta einasti partur av innangarðsjørðini hjá festara inni í Dølum. Tískil hevur økið týdning fyri bóndavirksemi og møguleikar at reka festið skynsamt.

Svar frá umsitingini:
Á fundi 09.03.2026 við umboð fyri festara í Dølum, varð semja funnin um eina semju, sum bæði rúmar víðkaðum bóndavirksemi, á matr. nr. 20a, samstundis sum sethús kunnu byggjast á matr. nr. 21a niðanfyri Í geilini. Hildið verður so statt fast við uppskotið við teimum broytingum, at markið fyri sethúsaøkið verður tillagað eini møguligari útstykking, umframt at sethúsaøkið verður víðkað til allan matr. nr. 20a í sambandi við bygging av einum bygningi/hjalli til búnaðarvirksemið. Umsitingin metir, at økið hóskar seg væl til sethúsabygging, og hevur lendið niðanfyri vegin í Geilini verið lagt av til endamálið síðani áðrenn kommunusamanleggingina í 2004.

- **Matr. nr. 8a. Leingjan av í Lágabø (Garðajørð) skal varðveitast sum bøur**

Búnaðarstovan mótmælir ítøkiliga bygging á hesum økinum og sambært hoyringarskrivi frá festara og frá Bóndafelag Føroya er hetta besti slátturbøur í bygdini. Ein tílík broyting er eitt inntriv í raksturin av festunum, og hevur tað stórar fíggjarligar avleiðingar bæði nú og framyvir, um veltur bøur verður tikin til endamáls uttan um festið.

Svar frá umsitingini:
Umsitingin gongur viðmerkingini á møti.

- **Matr. nr 15a Omanfyri Ovaraveg skal varðveitast sum bøur**

Búnaðarstovan mótmælir ítøkiliga bygging á hesum økinum.

Svar frá umsitingini:
Umsitingin gongur viðmerkingini á møti við at varðveita økið á matr. nr. 15a til landbúnaðarjørð.

- **Ásetingar fyri H (frílendi) skulu varðveitast**

Nýggj áseting fyri frílendi hevur avmarkandi ávirkan á landbúnaðarraksturin innangarðs. Í galdandi byggisamtykt eru H og H1 galdandi fyri bøin (H1 er serlig øki til varðveiting). Í uppskotinum eru øll økini broytt til D1, og verður ítøkiliga mótmælt, at galdandi ásetingarnar fyri H (ítøkiliga **stk 2 og 3**) vera strikaðar.

Talan er um soljóðandi ásetingar í verandi áseting:

> ***Stk 2****. Á teim í 1. stk. fyrr nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, sum skila til virðið á økinum.*
>
> ***Stk 3****. Loyvi kann gevast til at byggja einstøk úthús, sum eru neyðug fyri raksturin av garðsbrúkinum, t.d. seyðahús. Og uppdyrkingarvegir kunnu gerast, tá nýtingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt náttúrligt avmarkað størri øki.*

Sambært broytingaruppskotinum verður ásetingin soljóðandi:

Stk 1. Umráðisparturin verður lagdur til frílendi, t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.

Stk. 2. Útstykking má ikki fara fram.

Harumframt verður aftur víst á, eins og viðgjørt var í fyrra hoyringsumfarinum, at tá ið H1 (fornminni) verður lagt saman við kringliggjandi frílendi D1, verður tað í byggisamtyktini ómøguligt at síggja, hvar fornminnir eru staðsett.

Borgari spyr eisini inn til, hvussu avmarkandi D1 ásetingar verða, tá tað verður galdandi fyri spæliplássið (20c), og viðv. atgongd til toftirnar í Árnanesi.

Svar frá umsitingini:
Umsitingin ásannar avmarkandi ávirkan fyri bóndaskap, um H verður broytt til D1-frílendi, av tí at D1 ikki staðfestir, at økið verður tilskilað landbúnðarvirksemi. Umsitingin mælir tí til at broyta býarplanin, soleiðis at H økini í Kirkjubø vera broytt til 4. grundumráði

H1 økið, sum sambært galdandi byggisamtykt er lagt til friðað øki av mentunar- og søguligum grundum, verður sambært nýggjum uppskoti broytt til D1 øki, og á tann hátt lýsir byggisamtyktin meira nágreiniliga, hvørji økir í bygdini hava serligt fornfrøðiligt- og
varðveitingarvirði. Her skal leggjast afturat, at ásetingar í D1 ikki forða lendisgøtuskipanum, og tí hóskar hetta til økir við fornfrøðiligum og vitjunarverdum virði. Samstundis verður matr. nr. 20c (spæliplássið) broytt til A-sethúsaøki, tí umframt lendisgøtur, kann væntast meira umfevnandi bygging. Tað er somuleiðis vanligt aðrastaðni í Tórshavnar kommunu, at spæliplárs liggja í somu ásetingum sum sethús.

- **Mótmælt at byggisamtykt fyri Heimaru Forar verður broytt frá E (almennir stovnar) til D1 (frílendi).**

Í uppskotinum verður byggisamtyktin fyri Heimaru Forar, t.e. bøurin miðskeiðis í bygdini omanfyri almenna parkeringsplássið, broytt, eftir at byggisamtyktin í 2022 varð broytt frá H1 frílendi til E (almennir stovnar). Endamálið var tá at byggja til ferðavinnuendamál. Ætlanin hevur verið at hýsa savnsvirksemi, matstovu, v.m. og at framtíðartryggja garðin. Í komandi byggisamtykt verður partur av økinum lagdur aftur til D1, og so statt fer ætlanin hjá festara fyri skeyti. Um økið verður broytt til frílendi, er av størsta týdningi, at byggisamtyktin loyvir bygging av landbúnaðarbygningum á økinum, so sum brunnar, køstur, maskinhøll, o.a.

Festarin leggur síðani afturat, at ein treyt átti at verið, at einans festið kann byggja á hesum lendi, og hevur í teldubrævasamskifti til málið lagt afturat, at onnur treyt kundi verið, at einans byggjast kann í fullari semju við festaran. At enda verður víst á, at onnur áhugamál ikki skulu takast fram um áhugamálini hjá festinum í D1 økjum, tað verði seg landbúnaðarlig, ella onnur viðurskifit, ið verða mett neyðug at reka festið.

Svar frá umsitingini:
Umsitingin hevur móttikið uppskot uppá bygning á bønum, sum Tjóðsavið í viðmerking til málið frámælir vegna lutfalsligu stóru víddina. Í viðmerking dagf. 17 november 2025 skrivar Tjóðsavnið soleiðis:

> "Samanumtikið kann sigast, at í nýggja uppskotinum er bygningurin alt ov dominerandi, hann tekur útsýni frá fornminnunum, hann lækkar mentanarligu upplivingina og virði av søguliga Kirkjubø sum heild. Verður byggingin framd, gerast fornminnini og søguligu bygningarnir nakað, sum liggur aftanfyri ein stóran vitjanardepil og veitsluhøll. Aðrir bygningar eru á staðnum, har góðar alternativar loysnir kunnu fremjast."

Mælt verður til at endurnýta fjósið, og metir Tjóðsavnið, at góðir møguleikar eru at hýsa tí virksemi, sum ætlanin er at hava í nýggju byggingini. Ein loysn, har fjósið verður endurnýtt, hevði ikki tikið tign frá søguliga Kirkjubø, men heldur lagt afturat mentanararvinum á staðnum.

At avmarka byggiøkið á bønum var so statt ein roynd at tryggja ein ávísan dám og geva luft í bygdini, og hevði henda ætlanin undirtøku frá Tjóðsavninum.

Á fundi 19.03.2026 við festaran og í viðmerkingum til málið verður víst á, at sum støðan er í dag, og ikki minst um ferðavinnan veksur komandi 10 árini, verður tørvur á hægri ferðavinnukapasiteti. Festi mælir tí til, at byggisamtyktin ikki forðar bygging til hetta endamálið. Umsitingin metir, at byggjast kann á hesum økinum við ferðavinnuendamáli, men at vavið má avmarkast í mun til søguligu húsini.

Í nýggjum uppskoti verður nevndi bøurin lagdur aftur til byggiøki, undir ásetingunum C-miðstaðarøki, og verður bygging treytað av eini góðkendari heildarætlan. Endamálið við hesi loysnini er tryggja skynsama atkomu, hóskandi lutfall og fagurfrøðilig atlit, í og við at heildarætlanin skal fremjast í tættum samráði við friðingarmyndugleikar.

Í mun til at seta treytir til tess at tryggja áhugamálunum hjá festinum, verður hetta ikki mett hóskandi í byggisamtyktini. Byggivaldið liggur hjá kommunala byggimyndugleikanum; ikki hjá bóndanum. Tað er ikki bóndin, sum játtar byggiloyvir; tað ger kommunan.

Endamáli við eini byggisamtykt er at regulera m.a. býarskipan og bygging. Byggisamtyktin tekur ikki støðu til, hvør kann byggja eina ávísa bygging. Tí er byggisamtyktin ikki rætta stað at áseta, hvør kann byggja hvat, hvar – herundir heldur ikki ásetingar um, at tað einans eru bøndur, sum kunnu byggja.

Í stk 2 fyri umráðispart C, er áseting, sum krevur at bygging fer fram sambært góðkendari heildarætlan av býráði og avvarðandi myndugleikum, og fevnir hetta um festið. Hetta er í uppskotinum ikki galdandi fyri D1.

- **Umráðispartur fyri neyst verður tikin burtur**

Mótmælt verður, at ongin umráðispartur fyri neyst er galdandi fyri økið millum parkeringsplássið og kirkjuna, har tað í dag eru fýra neystagrundir. Biðið verður um, at øki í Kirkjubø framvegis verður sett av til neystagrundir í nýggju byggisamtyktini.

Svar frá umsitingini:
Økið, har neystamatriklarnir eru, er í verandi støðu ikki eitt neystaøki, og er uppskotið so statt ikki ein broyting, sum avmarkar í mun til verandi byggisamtykt. Tó er áseting løgd afturat í øki C, sum hevur til endamáls at loyva neystalíknandi bygging á matriklunum, um hetta verður framt í samsvari við góðkenda heildarætlan fyri økið.

Verandi neystaøki, staðsett millum parkeringsplássið og fjøruna vestanfyri, verður tikið burtur, samsvarandi mótmæli í fyrra hoyringartíðarskeiði, har grundgivið var fyri at verja náttúru, og at neystabygging upp í 7 m hevði verið óhóskandi fyri dámin.

Umsitingin er sinnað at finna hóskandi neystaøki í Kirkjubø, og skal hetta gerast út frá einum tørvi ella eini bygdaætlan.

- **J (bóndahús) áseting eigur at vera varðveitt**

Mótmælt verður at avtaka ásetingar fyri J-bóndahús, og spurt verður inn til, um hetta forðar fyri, at bygningar vera nýttir til fóður, seyðahald ella fletting. Sambært mótmælinum er hetta ikki í samsvari við ætlanina um at varðveita serstaka dámin í bygdini, og víst verður á, at í uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað eru økir í bygdini framvegis sett av til bóndahús (øki G).

Svar frá umsitingini:
Vísandi til viðmerking omanfyri verður J bóndaøki, oman fyri Ovaraveg, varðveitt undir nýggja heitinum G-bóndaøki. Hetta er somuleiðis í samsvari við viðmerking frá festara, um at varðveita møguleika at byggja.

Leggjast skal afturat, at bóndaskapur og viðkomandi bygging kann fara fram í 4. grundumráði, og smávegis bóndavirksemi (fóður, seyðahald og fletting) er loyvd í øllum umráðispørtum. Tískil er sambært uppskotinum rúm fyri bóndavirksemi bæði innan og uttan fyri bøgarðarnar, og metir umsitingin ikki, at ein avmarking av verandi økisparti, J bóndahús, broytir hetta munandi.

- **Mótmæla at áseting fyri gamla fjósið verður broytt til C miðstaðarendamál**

Mótmælt verður, at økið verður broytt til miðstaðarbygging, stovnar og mentanarlig endamál, tí at ásetingin er grundleggjandi ósamsvarandi verandi og framhaldandi nýtslu av økinum.

Svar frá umsitingini:
Nógv bendir á, at framtíðar nýtslan fer at víkja frá søguligu nýtsluni, tí sum staðfest í viðmerkingum til málið, hevur ferðavinnuvøksturin seinastu árini ført við sær ein tørv á møguligari bygging við Heimaru Forar og/ella umbygging av gamla fjósinum.

C økið umboðar eina fjølbroytta nýtslu, og um hetta verður galdandi fyri fjósið í framtíðini, avmarkar tað ikki verandi landbúnaðarliga virkseminum. Mett verður, at gamla fjósið bæði er søguliga og byggilistarliga áhugavert, og verður tað mett hóskandi at ásetingin loyvir eini framtíðarmenning, sum loyvir gestavinnu á hesum økinum. Mælt verður til at halda fast í uppskotinum.

- **Broytingaruppskot frá borgara**

Mælt verður til sethúsabygging á ovaru síðu av Ovaravegi / Heima á Garði, av tí at hetta er traðir við avmarkaðum landbúnaðarligu gagni. Víst verður eisini á geiran fram við niðaru síðu av Gamlavegi.

Svar frá umsitingini:
Dagførda uppskotið, sí Kirkjubøur kort eftir broyting, apríl 2026 loyvir bygging av umleið 10 nýggjum sethúsum, og verður hetta mett at vera hóskandi. Støða kann takast til, um fleiri økir skulu setast til sethúsabygging, eitt nú við økini, sum víst verður á í viðmerkingini. Umsitingin metir, at hetta eigur at verða tikið upp í samráð við bygdafólki og í samband við arbeiðið at gera eina nýggja bygdarætlan fyri Kirkjubø.

Nýggj skjøl

- *Viðmerkingar og broytingaruppskot jan. 2026, j.nr. 25/01100-24*
- *Kirkjubøur kort eftir broyting, apríl 2026, j.nr. 25/01100-31*

Tilmæli

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kirkjubø sambært skjølunum *Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, apríl 2026*, og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

Býráðsfundur 04. juni 2026: Atkvøtt varð um at fáa málið aftur í nevnd, ið fall við við seks atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Súna Mørk.

Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 11. juni 2026: Kunnað varð um málið. Nevndin letur inn hoyringsskriv sum part av almennu hoyringini.

Ískoyti:

Uppskotið lá til almenna hoyring frá 19. juni til 7. august 2026. Tá ið hoyringstíðarskeiðið var farið, hevði kommunan móttikið eitt hoyringssvar frá Tjóðsasvninum, sí skjal *Hoyringssvar Tjóðsavnsins í sambandi við uppskot um broyting av byggisamtykt fyri Kirkjubø.*

Niðanfyri verða viðmerkingarnar viðgjørdar og svaraðar av umsitingini.

- **D1 er ikki nøktandi vernd av fornminnum**

Í galdandi byggisamtykt verður umráðisparturin H1 nýttur til fornminni, og verður í ásetingunum sipað til fornminnislógina. D1-frílendi er sambært uppskotinum bæði galdandi fyri fornminnini og fyri kirkjugarðin. Umráðisparturin verður av Tjóðsavninum mettur at hava ov generellar ásetingar og tískil eina ov veika vernd fyri fornminnini í Kirkjubø. Víst verður ítøkiliga á, at ásetingarnar ikki verja móti grevstri í sambandi við veg, leiðingar og aðrar lendisbroytingar, ið kunnu skaða fornminni.

Tjóðsavnið vísir eisini á, at D1 hóskar betur í gamla innangarðsbønum, meðan 4. grundumráði eftir sínum endamáli hoyrir heima uttangarðs.

Svar frá umsitingini:

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot um nýggjan umráðispart D0, sum hevur til endamáls at verja fornminni. Ásetingarnar eru soljóðandi:

1. *Øki verður varðveitt av mentunar- og søguligum grundum, soleiðis sum fyriskipað er í løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948, um friðan av fornminnum og bygningum.*
2. *Útstykking og bygging má ikki fara fram.*
3. *Lendið kann ikki regulerast meira ella minni enn 0,3 m í mun til verandi lendi, uttan loyvi.*

Á henda hátt verður ynskið hjá Tjóðsavninum gingið á møti, og verður umráðisparturin mettur at vera hóskandi í Kirkjubø, vegna ávíst framhald av galdandi ásetingum. Umsitingin ivast tó í, um ein tilsipan til fornfriðingarlógina í byggisamtyktum er hóskandi í almennum byggisamtyktum, tí tá verður grundarlag fyri tilsipingum til aðrar byggiregulerandi lógir, so sum landsvegalógina. Hetta hevur ikki verið vanlig praksis, tí tá verður talan er um dupulta friðing. Umsitingin metir, at ein hóskandi leistur er at menna fullfíggjað vitanargrundarlag um fornminnir á tøkum kortskipanum, sum kunnu fremja neyðuga vernd av fornminnum, heldur enn at staðfesta hetta neyvt í byggisamtyktunum. Tó verður undantak í hesum førinum mett hóskandi fyri Kirkjubø, grundað á serligu støðuna bygdin hevur í mun til søguliga samleikan fyri alt Føroyar.

Umsitingin metir, at leisturin við 4. grundumráði innangarðs er hóskandi, vísandi til viðgerð av viðmerkingum frá búnaðarstovuni, festara og bóndafelagnum um at tryggja landbúnaðarvirksemið í bygdini.

- **Staðsetingin av D1 er flutt og óheppin**

Í uppskotinum eru mørkini fyri D1 økini teknað av nýggjum, og umframt at tað er trupult at samanbera broytingar vegna ólík lutfall í *áðrenn* og *eftir korttilfarinum,* verður víst á óhepna broyting. Verndarøkið er minkað við fjøruna, soleiðis at fornleivdirnar fyri Líkhús sambært uppskotinum eru uttan fyri verndarøkið. Tjóðsavnið mælir til, at kommunan ger nýtt uppskot og staðsetir mørkini í samstarvi við Tjóðsavnið.

Svar frá umsitingini:
Umsitingin ásannar, at broytingar í seinasta uppskotinum vóru óhepnar, í mun til økið við Líkhús, og hevur rættað mørkini fyri D1 og D0, soleiðis at tey neyvt samsvara við mørkini í galdandi byggisamtykt. Nýtt uppskot hevur verið til viðmerkingar og eru endaligu mørkini fyri D1 og D0 framleitt í samstarvi við Tjóðsavnið.

- **Fløtan til miðstaðarbygging eigur at varðveitast sum frílendi**

Fløtan millum toftirnar, Garðin, Múrin og Kirkjuna er týðandi partur av opna landslagnum. Útsýnið tvørtur um fløtuna bindur fornminnini og bygningarnar saman og ger søguliga bygdalagið lættari at uppliva og lesa. Fløtan skal tí varðveitast sum opin bøur og frílendi.

Svar frá umsitingini:
Umsitingin er samd í grundgevingini hjá Tjóðsavninum og sendi eitt uppskot til viðmerkingar, har C økið varð broytt aftur til D1, samsvarandi uppskotinum frá 2025. Í viðmerkingum frá Tjóðsavinum dagfestar 21. september 2026 (sí skjal Viðmerkingar frá Tjóðsavninum, 21. sept 2026) verður mælt til at rætta markið við at býta C-økið og D1-økið um og rætta markið millum D0-økið og C-økið, soleiðis at fornleivdir ikki liggja partvíst í byggiøki. Endamálið er at tryggja rúm fyri bygging, samstundis sum fornminnini og heildin kring tey verða varðveitt.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot (sí Kirkjubøur kort eftir broyting, oktober 2026), og metir at hetta uppskotið á hóskandi hátt bæði varðveitir bøin og eyðkenda útsýnið til gomlu bygdina, samstundis sum eitt C-byggiøki á omanfyri 2000 m^2 verður staðsett á bønum og kann loyva eini hóskandi menning í bygdini.

Aðrar viðmerkingar frá umsitingini:
Í viðmerkingum frá Tjóðsavninum (sí *Viðmerkingar frá Tjóðsavninum, 21. sept 2026*) verður eisini mælt til at lýsa og verja viðkomandi siktilinjur, umframt almennar gonguleiðir. Umsitingin mælir frá at gera hetta í almennu byggisamtyktini, av tí at tílíkar treytir ikki eru í øðrum almennum byggisamtyktum. Heldur eigur hetta at vera staðfest í eini heildarætlan fyri Kirkjubø, sum býarskipanin kann taka útgangsstøði í.

Í samskiftinum millum umsitingina og Tjóðsavnið, hevur Tjóðsavnið eisini funnist at væntandi áseting um, at bygging skal taka neyðug atlit til sermerkta umhvørvið í økinum, fornminni, friðaðar og varðveitingarverdar bygningar og garðløg v.m., og hevur mælt til, at inngangurin í byggisamtyktini greiðir nærri frá um miðaldar fornminnini, og at tey hava týdning ikki bert fyri tey, sum búgva í Kirkjubø, men fyri

allar Føroyar. Umsitingin metir, at inngangur sambært verandi uppskoti á nøktandi hátt leggur dent á hesi viðurskifti, har tað m.a. stendur soleiðis:

"Kirjubøur er millum elstu og søguríkastu bygdunum í Føroyum. Menning av Kirkjubø skal fara fram við evstu virðing fyri sereyðkennum, sum seta sín dám á bygdina."

Borgari gjørdi 6. august vart við, at samsvar ikki var millum ásetingaryvirlitið og sjálvar ásetingarnar í uppskotinum, og hevur umsitingin rættað byggisamtyktarskjalið eftirfylgjandi, sí *Almenn byggisamtyktin fyri Kirkjubø - Uppskot okt. 2026.*

Sami borgari mótmælti eisini kravinum um litir á sethúsum, og grundgav fyri, at hetta kann elva til, at bygdin gerst eitt slag av framsýning/museum burturav. Víst varð á, at neystagrundir eru, sum ikki hava viðkomandi áseting, og sambært borgaranum hevur kommunan lovað nýtt neystaøki undir oyruni, sum ongantíð er komið.

Umsitingin mælir til at halda fast í kravinum um litir út frá áðurnevdari grundgeving um at tryggja ein serstakan dám, og heldur somuleiðis fast við, at C-miðstaðarøki verður galdandi á neystagrundunum, av tí at hetta tryggjar, at neystalíknandi bygging kann fremjast sambært eini heildarætlan.

Nýggj skjøl

- *Hoyringssvar Tjóðsavnsins í sambandi við uppskot um broyting av byggisamtykt fyri Kirkjubø, j.nr. 25/01100-37*
- *Viðmerkingar frá Tjóðsavninum, 21. sept 2026, j.nr. 25/01100-39*
- *Kirkjubøur kort eftir broyting, oktober 2026, j.nr. 25/01100-41*
- *Almenn byggisamtyktin fyri Kirkjubø - Uppskot okt. 2026, j.nr. 25/01100-41*

Tilmæli

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kirkjubø sambært skjølunum *Almenn byggisamtyktin fyri Kirkjubø - Uppskot okt. 2026* og *Kirkjubøur kort eftir broyting, oktober 2026*, og beina málið í býráðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Anja Weyhe og Heidi Lava Elgeirsdóttir taka undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilælinum.

312/26 Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr. nr. 1378 og 1235a, Tórshavn

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi- og býarskipanarnevndin	31.08.2026	197/26	26/04326-4
2 Byggi- og býarskipanarnevndin	02.11.2026	234/26	26/04326-4
3 Fíggjarnevndin	11.11.2026	216/26	26/04326-4
4 Býráðsfundur	19.11.2026	312/26	26/04326-4

Upprunin til málið
Umhvørvisstovan sendir umsókn til ummælis hjá Tórshavnar kommunu.

Lýsing av málinum
Matr. nr. 1235a og 13378 eru tvær traðir á 6.008 fermetrar hvør ovarlaga á Villingardalsvegnum. Til somu matrikklar eru knýtt hvør sínar traðir á umleið 3.580 fermetrar við Oyggjarvegin.

Talan er sostatt um fýra jarðarlutir tilsamans. Søkt verður um at býta hesar jarðarlutir sundur í fýra atskildar matriklar, umframt at strika servitutt av ognunum.

Lógir, ásetingar o.a.
§§ 17 og 20 í Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., við seinni broytingum eru soljóðandi:

> " **§ 17.** Við sundurbýti má lutur ikki verða lagdur í sovorðnum skapi, at hann er óhentur til endamálið. Harundir má partur í felagseigindómi uttangarðs altíð hoyra til ávísan fastan eigindóm í somu markatalsbygd.
> *Stk. 2.* Verður tað í kommunustýrisins ummæli eftir § 20 ella á annan hátt upplýst, at tað við sundurbýtinum koma fram viðurskifti, sum ikki samsvara reglunum í:
> a) lóggávuni um byggi- og brunaviðurskifti,
> b) eini góðkendari byggisamtykt ella býarskipan, ella
> c) lóggávuni annars, kann sundurbýtið ikki verða góðkent uttan so, at avvarðandi myndugleiki hevur givið undantaksloyvi.
> *Stk. 3.* Øki, ið hoyrir til fornminni, kann ikki býtast sundur, uttan friðingarmyndugleikin frammanundan hevur góðkent býtið.
> *Stk. 4.* Í økjum, har góðkend byggisamtykt ikki hevur ásett minstustødd fyri byggigrundir ella urtagarðar, mugu hesi ikki leggjast við minni vídd enn 500 m². Sethúsabyggigrundir kunnu ikki leggjast við størri vídd enn 3000 m².
> *Stk. 5.* Eigindómar, sum longu eru byggigrundir ella urtagarðar, mugu við sundurbýti ikki verða gjørdir minni enn 500 m², uttan at hetta er ásett í góðkendari byggisamtykt.
> *Stk. 6.* Í økjum, har góðkend byggisamtykt ikki hevur ásett minstustødd fyri landbúnaðarjørð, má henda við sundurbýti ikki verða gjørd minni enn 5000 m². Tann minsta av tí í byggisamtykt ásettu stødd á landbúnaðarøki má ikki vera minni enn 3000 m².
> *Stk. 7.* Partur hjá einum eigindómi í felags eigindómi má ikki býtast sundur í minni enn 2 gyllin.
> *Stk. 8.* Lutur, sum ikki verður lagdur saman við grannalut, má ikki býtast frá uttan við atgongd til almennan veg. Ferðslurættur skal ikki vera tíðaravmarkaður ella treytaður. Tó kann verða vikið frá reglunum í hesum stykki, tá frábýtt verður til landbúnaðarendamál í bygdum, sum ikki eru útskiftar, treytað av, at tann ferðslurættur, sum er, verður verandi."

> " **§ 20.** Øll sundurbýtismál skulu sendast viðkomandi kommunustýri til ummælis. Kommunustýrið skal greiniliga skila til, um nøkur regla í § 17 er til hindurs fyri sundurbýtinum."

Byrða er lýstur á ognirnar.

M.a. soljóðandi rættindi fyri Tórshavnar býráð (byrða orða í 1912 og seinni lýst):

> “Køberen skal finde sig i, at der af Thorshavns Braad uden Udgift for ham lægges vej over det af ham købte areal til Fordel for senere Opdyrkninger og for Besiddere af udenfor liggende Tørveheder, samt at han indtil saadan Vej er anlagt, maa finde sig i, at Besiddere af udenfor liggende Tørveheder bevarer den samme Rett som hidtil til Færdsel og at der eventuelt af Godsbetyelsen gives andre Tilladelse til Vej, hvorhos Køberen forpligter sig til at anbringe og vedligeholde to Laager i hegnet paa de Steder Byraadet bestemmer”.

Og soljóðandi (byrða orðað í 1944 og seinni lýst):

> “Køberen skal være pligtig til, mod Erstatning, der fastsættes af Landbrugsraadet, at afstaa nødvendige Arealer til offentlige Veje, der maatte komme til at gennemskære Trøen, og til at hegne mod Kørevej, hvis dette kræves”

Upplýsingar frá umsitingini
Av tí at traðirnar ovarlaga á Villingadalsvegnum longu eru fysiskt atskildar frá tilhoyrandi traðum við Oyggjarvegin verður ikki mett grundarlag fyri at sýta umbøn um sundurbýti, hóast onnur trøðin við Oyggjarvegin í løtuni liggur uttan ítøkiliga vegatkomu. Galdandi byggisamtykt í økinum við Oyggjarvegnum hevur tó ætlan um vegatkomumøguleikar í økinum.

Byrðan frá 1912 umrøður ymisk viðurskiftir, herundir eisini rættindi fyri festarar. Hesum partinum varðar Búnaðarstovan av, og er hann tískil ikki viðkomandi fyri kommunala ummæli. Byrðan er skrivað á eldri donskum máli, og kann í stuttum lýsast á henda hátt:

- Tórshavnar býráð kann uttan kostnað fyri fyri eigaran (tvs. kommunan skal fíggja) gera veg á ognina til uttanfyriliggjandi traðir og torvheiðar.
- Um onnur gera veg, skal eigarin av ognini gera og viðlíkahalda tvey portur, sum Tórshavnar býrað avger staðsetingina av

Havnin er munandi vaksin síðan 1912. Býurin er vaksin út um traðirnar við Oyggjarvegin, og tískil verður ikki mett átrokandi neyðugt at varðveita rætt at gera veg til uttanfyriliggjandi økir, tí slíkir vegir eru longu – Oyggjarvegurin og Ringvegurin. Sostatt er byrðan í verki ikki viðkomandi fyri traðirnar við Oyggjarvegin, og tí verður mælt til at játta strikan av byrðuni fyri tann partin, sum umrøður rættindi hjá Tórshavnar býráð; og síðani vísa til Búnaðarstovuna fyri annað innihald.

Øðrvísi er fyri traðirnar ovarlaga á Villingardalsvegnum. Í hesum økinum er ein áleikandi ósemja millum kommununa og umsøkjaran um tann partin av Villingardalsvegnum, sum partvís kemur inn á traðirnar. Byrðurnar verða í tí málinum mettur at vera eitt avgerðandi grundarlag hjá kommununi viðvíkjandi vegnum, og tí verður mælt frá at strika byrður í verandi støðu.

Umsóknin snýr seg einans um byrðuna frá 1912. Umsøkjari hevur ikki nevnt byrðuna frá 1944 í umsókn síni. Tann byrðan verður bert umrøtt í hesi málslýsing fyri at lýsa heildina.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

22/04873	Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr. nr. 1378, Tórshavn
25/01171	Fráboðan at TK er komin inn um mark á matr. nr. 1378, við Villingardalsvegin í Tórshavn. Kravt verður at hetta verður rættað innan 17.05.2023 - 23/02724

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
Málslýsingin er skrivað í samstarvi millum teknisku fyrisiting og stjórnarskrivstovuna.

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl

26/04326-1	Umsókn
26/04326-6	1966-byrða

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna

Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli
Tekniski stjóri og deildarleiðari á byggimálsdeildini mæla til at senda játtandi ummæli til Umhvrvisstovuna um at:

- Loyva sundurbýti
- Fyri traðirnar við Oyggjarvegin: Strika tann partin av 1912-byrðuni, sum umrøður rættindi hjá Tórshavnar býráð, og vísa til Búnaðarstovuna um restina av byrðuni.
- Fyri traðirnar ovarlaga á Villingardalsvegnum: Sýta umsókn um at strika tann partin av 1912-byrðuni, sum umrøður rættindi hjá Tórshavnar býráð, og vísa til Búnaðarstovuna um restina av servituttinum.
- Beina punkt 2 og 3 fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026: Útsett

Ískoyti
Býráðið hevur í juni 2026 umrøtt ferðsluloysnir vegaføring við Oyggjarvegin og Skotarók í sambandi við serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1233a, 1233b, 1378 og 1235a (málsnr. 25/08554). Í tí málinum var niðurstøðan, at tað ikki er ynskiligt longu nú at taka støðu til framtíðarvegaføring í hesum økinum. Heldur skuldu ítøkiligar ferðsluloysnir takast upp í sambandi við eina framtíðar ítøkiliga útstykkingarætlan.

Tilmælið verður tí dagført, soleiðis at tað samsvarar við býráðssamtyktina frá juni 2026.

Dagførd skjøl
25/08554-35 Samtykt Býráðsfundur, 18.06.2026 (mál 215/26)

Dagført tilmæli
Tekniski stjóri og deildarleiðarin á byggimálsdeildini mæla til at senda soljóðandi ummæli til Umhvørvisstovuna:

- Játtandi ummæli um sundurbýti.
- Sýta umsókn um at strika tann partin av tinglýstum byrðum, sum umrøður rættindi hjá Tórshavnar býráð, og vísa til Búnaðarstovuna um restina av byrðuni.
- Beina punkt 2 fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Byggi- og býarskipanarnevndin 02. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at ganga umsóknini á møti.

313/26 Keyp av lonunum í Hoydølum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Trivnaðarnevndin	05.11.2026	46/26	25/00365-12
2 Fíggjarnevndin	11.11.2026	228/26	25/00365-12
3 Býráðsfundur	19.11.2026	313/26	25/00365-12

Upprunin til málið
Keyp av lonunum í Hoydølum.

Lýsing av málinum
Víst verður til gomlu viðfestu málslýsing 19/00224 "*Leigumál -Lonin í Hoydølum til fyribils dagstovn*".

Lonirnar skulu eftir ætlan brúkast sum skúlastovur í Hoyvík, í sambandi við útbygging og dagføring av Hoyvíkar skúla.

Lonirnar hava verið brúktar til fyribils dagstovnavirksemi í Hoydølum.

Yvirfriðingarnevndin gav kommununi lov til at hava lonirnar staðsettar á økinum til 31. Desember 2028.

Tann 29. Desember 2025 gjørdi Tórshavnar kommuna og táverandi Barna- og útbúgvingarmálaráðið eina avtalu um, at Tórshavnar kommuna keypir lonirnar í Hoydølum treytað av, at lonirnar kundu verða standandi inntil 31. Desember 2028.

Lógir, ásetingar o.a.
Treytað avtala um avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu.

Fólkaskúlalógin (*Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 7. mai 2025*)

Upplýsingar frá umsitingini
Eigaraviðurskiftini kring lonirnar hava verið soleiðis háttað, at Landsverk eigur lonirnar í Hoydølum, sum Tórshavnar kommuna sambært leigusáttmála hevur leigað.

Landsverk og Tórshavnar kommuna hava havt eitt samskifti koyrandi við Umhvørvisstovuna og friðingarmyndugleikarnar um, at Tórshavnar kommuna kundi halda fram við virkseminum í lonunum til 31. Desember 2028.

Umhvørvisstovan tók undir við ætlanini, treytað av at kommunan slepti ætlanini um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Hoydalar. Kommunan slepti hesi ætlan í sambandi við, at handilin um studentaskúlan í Hoydølum gekk aftur.

Um neyðugu loyvini vórðu fingin til vega, var ætlanin, at Tórshavnar kommuna skuldi keypa lonirnar og halda fram við virkseminum til árslok 2028. Í hesum føri skuldi kommunan hava ábyrgdina av at flyta lonirnar, tá ið virksemið helt uppat, meðan Landsverk skuldi hava ábyrgdina av at endurbøta økið.

Fekst ikki loyvi til framhaldandi virksemi eftir summarið 2026, skuldi kommunan flyta virksemið úr lonunum, og lonirnar skuldu flytast summarið 2026. Í hesum føri hevði Landsverk ábyrgdina av bæði at flyta lonirnar og at endurbøta økið.

Við støði í hesum gjørdi Tórshavnar kommuna og táverandi Barna- og útbúgvingarmálaráðið tann 29. Desember 2025 eina avtalu um, at Tórshavnar kommuna keypir lonirnar í Hoydølum treytað av, at lonirnar kundu verða standandi inntil 31. Desember 2028.

Landsverk sendi náttúrufriðingarnevndini umsókn um framhaldandi virksemi í lonunum. Tann 19. Februar 2026 gav náttúrufriðingarnevndin játtandi svar uppá umsóknina, sum tann 12. Apríl 2026 varð endaliga staðfest av Yvirfriðingarnevndini.

Lonirnar skulu eftir ætlan brúkast sum skúlastovur í Hoyvík, í sambandi við útbygging og dagføring av Hoyvíkar skúla.

Endaligi kostnaðurin fyri lonirnar er kr. 1.577.000, vísandi til viðfestu uppgerð millum land og Tórshavnar kommunu um Hoydalar og Venjingarskúlan.

Skulu lonirnar brúkast til skúlavirksemi, skal treytaða avtalan um keyp av lonunum endaliga staðfestast av býráðnum.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
16/02772: "*06-12 Nevndarsamtyktir - Hoyvíkar skúli dagføring*"
25/00333: "*06-12 Nevndarsamtyktir - Hoyvíkar skúli dagføring - 16/02772*"
25/08500: "*Val av bygginevnd fyri Hoyvíkar skúla*"

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
19/00224-6: "*Leigusáttmálið - Lonin við Studentaskúlan í Hoydølum*"
19/00224-11: "*Leigusáttmáli4_TK_US*"
19/00224-12: "*Útiøki_19.02.2019*"
25/00365-10: "*Útskrift úr gerðabókin frá náttúrufriðingarnevndini*"
25/00365-10: "*Treyta avtala 29 12 2025 um avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu*"
25/00365-10: "*Ummæli frá Umhvørvisstovuni*"
25/00365-11: "*Avgerðin hjá Yvirfriðingarnevndini tann 12. apríl 2026 um lonirnar*"
25/00365-13: "*Uppgerð millum Mentamálaráðið og Tórshavnar kommunu um Hoydalar og Venjingarskúlan*"

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar	x			

Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei
Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

Játtast av:			Játtast á:				
Deild	Verk-ætlan	Navn	Deild	Verk-ætlan	Navn	Nýggj verkætlan	Upphædd

	LK41013	Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring		L41013	Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring		Kr. 1.577.00

Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

Íløgujáttan		
Samlaður kostnaður fyri verkætlanina	Upphædd:	Kr. 1.577.000
Áður játtað	Upphædd:	0
Tíðarætlan (byrjan/endi)	Ár:	2026
Árlig avleiðing á rakstur	Upphædd:	Kr. .1.577.00

Tilmæli:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla trivnaðarnevndini til, at:

- At játta kr. 1.577.000 av LK41013 (*Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring*) á L41013 (*Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring*).
- At keypa lonirnar í Hoydølum fyri kr. 1.577.000 av konto L41013 (*Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring*).
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Trivnaðarnevndin 05. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

314/26 Fyrispurningur um møguliga víðarisølu av grundstykki – matr. nr. 135nn á Karlamagnusarbreyt 52, Hoyvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	11.11.2026	229/26	26/08111-3
2 Býráðsfundur	19.11.2026	314/26	26/08111-3

Upprunin til málið
Umsókn um loyvi til víðarisølu av grundstykki, matr. nr. 135nn, Hoyvík.

Lýsing av málinum
Fyrrverandi eigarin fekk loyvi frá býráðnum tann november 2022 at selja grundstykki í fríari sølu.

Núverandi eigari keypti grundstykki matr. nr. 135nn, Hoyvík tann 25. August 2026, frá fyrrverandi eigaranum.

Talan er um eitt óbygt grovplanerað grundstykki.

Sum áður upplýst er grundstykki selt víðari í fríari sølu, og ætlar núverandi eigari ikki at byggja á grundstykkinum.

Núverandi eigari upplýsir, at ein barnafamilja er áhugað at keypa grundstykki, men loyvi um víðarisølu er treytað av býráðssamtykt.

Lógir, ásetingar o.a.
Grein 6 í upprunaskeytinum ásetur, at:

> "(...)
> Byggingin skal vera byrja innan 2 ár frá tí, at endaligt skeyti er undirskrivað. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagið 3 ár frá tí, at endaligt skeyti er undirskrivað. Annars tilskilar kommunan særrætt til at krevja stykkið aftur móti, at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnarí tann mun,tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av samastykkitil góðar.
> Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.
> (...)"

Grein 7 í upprunaskeytinum ásetur, at:

> "(...)
> Keyparin hevur ikki loyvið til at selja stykkið víðari, fyrr enn egin sethús til privatan bústað eru bygd á stykkinum og keyparin hevur búð í privatu húsunum í 3 ár. Tórshavnar býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur
> (...)"

Upplýsingar frá umsitingini
Býráðið samtykti tann 25. mai 2022 at loyva víðarisølu av einum óbygdum grundstykki við teirri grundgeving, at grundstykkið frammanundan hevði verið selt í fríari sølu.

Samsvarandi hesum er grundstykkið á matr. nr. 135nn, Hoyvík, áður selt í fríari sølu, og verður tí mett, at somu atlit eiga at verða løgd til grund fyri einari avgerð um at loyva víðarisølu av hesum grundstykki.

Núverandi eigari hevur keypt grundstykki fyri kr. 2.100.000 í fríari sølu.

Verður grundstykkið keypt aftur av kommununi, hevði hetta kostað kommununi kr. 2.100.000 umframt tinglýsingarkostnað. Við atliti at hesum, og við støði í áður samtyktari mannagongd í líknandi máli, verður tað ikki mett at vera fíggjarliga skynsamt, at kommunan nýtir møguleikan at keypa grundstykkið aftur.

Mælt verður til, at býráðið loyvir víðarisølu av grundstykkinum á matr. nr. 135nn, Hoyvík.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið
21/03637: "*Matr.nr. 138dn, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti*"
22/01848: "*Loyvi til víðarisølu av matr. nr. 22aa Kaldbak*"

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl
21/03637-35: "*256/22 Samtykt Býráðsfundur, 24.11.2022 Matr.nr. 138dn, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti.*"
26/00158-6: "*Kort. Matr.nr. 135nn, Hoyvík*"
26/08111-1: "*Fyrispurningur um møguliga sølu av grundstykki – matr. nr. 135nn á Karlamagnusarbreyt 52, Hoyvík*"
26/08111-2: "*Upplýsingar frá umsøkjara um møguligan keypara*"

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli:
Kommunustjórin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at loyva víðarisølu av grundstykkinum matr. nr. 135nn, Hoyvík, vísandi til at talan er um eitt grundstykki sum áður er selt í fríari sølu.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

315/26 Matr.nr. 255bn, Kirkjubøur,Argir.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	11.11.2026	227/26	26/08216-2
2 Býráðsfundur	19.11.2026	315/26	26/08216-2

Upprunin til málið: Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av matr.nr. 255bn, við ábygdum sethúsum.

Lýsing av málinum:

Matr.nr. 255bn, Kirkjubøur,Argir. Hús eru bygd, og hava eigarar búð í húsunum síðani 30.04.2024.

Sambært áseting í tinglýsta skeytinum grein 7 framgongur, at keyparin hevur ikki loyvið til at selja stykkið viðari, fyrr enn egin hús eru bygd á stykkinum og keyparin hevur búð í privatu húsunum í 3 ár. Tórshavnar býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur.

Eigarar hava havt bústað í húsunum síðani 30.04.2024

Lógir, ásetingar o.a. Skeytisáseting.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒

Skjøl:
26/08216 Umsókn frá eigarum
26/08216 Kortskjal,mynd av húsum, grundgeving fyri umsókn um frávik.

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☒ Nei

Tilmæli: Kommunustjórin mælir til at loyva víðarisølu av ognini matr.nr. 255bn, Kirkjubøur/Argir. Skeytið verður annars óbroytt galdandi í øllum orðum og setningum tess.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

316/26 Avrikssáttmáli við Visit Tórshavn 2027-2028

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Vinnunevndin	04.11.2026	33/26	26/08200-2
2 Býráðsfundur	19.11.2026	316/26	26/08200-2

Upprunin til málið
Samstarvið millum Tórshavnar kommunu og Felagið Tórshavn

Lýsing av málinum
Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn dagføra leypandi samstarvið sínámillum.

Avrikssáttmálin skal samtykkjast av býráðnum og nevndini í Felagnum Tórshavn.

Endamálið hjá Visit Tórshavn er at arbeiða ítøkiliga við ferðavinnu, marknaðarføring, branding av Tórshavn og menning av vinnuferðavinnu og at kunna um Tórshavn bæði innan- og uttanlands. Visit Tórshavn arbeiðir við útgangsstøði í teimum trimum súlunum í burðardyggari ferðavinnu, ið taka atlit til trivnað, umhvørvi og búskap.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini
Uppskot til avrikssáttmála er gjørt í samstarvi við leiðsluna í Felagnum Tórshavn.
Í avrikssáttmálanum 2027-2028 er millum annað ásett, at Visit Tórshavn skal arbeiða við at menna eina burðardygga og regenerativa ferðavinnu, skipa fyri førleikamennandi skeið, menna ferðavinnu fyri øll, skelting, talgils kort og gongutúrar o.a.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl
Avrikssáttmáli, j.nr. 26/08200-1

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at taka undir við avrikssáttmálanum við Visit Tórshavn.

Vinnunevndin 04. november 2026: Samtykt at taka undir við avrikssáttmálanum við Visit Tórshavn.

317/26 Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2027 til 2030

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Býráðsfundur	19.11.2026	317/26	26/08426-1

Málslýsing:
2 Sbrt. §2. í Ll. nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. skal Tórshavnar kommuna tilnevna ein lim til leiklistaráðið. Landsstýrismaðurin í Almanna og mentamálum setir nevndina, ið hevur 7 limir. Virksemi ráðsins er nærri lýst í §3 og 4 í lógini.

Víst verður til fundarskipan hjá Tórshavnar býráð MEIRILUTAVAL§ 15, ið er soljóðandi:

“1. petti. Tá ið býráðið skal velja 1 umboð ella 1 lim í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir meirilutavalháttinum.

2. petti. Við meirilutavali verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum, er valt. Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um. Fær hvørgin teirra meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti.”

Kommunan er biðin um at tilnevna eina kvinnu og ein mann soleiðis, at landsstýrismaðurin hevur møguleika fyri at seta eina nevnd í tráð við javnstøðulógina.

Tilmæli:
Borgarstjórin skjýtur upp at tilnevna Heina Gaard og Sunnuvu Bæk.

318/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevndin	18.02.2026	48/26	26/00100-1
10 Fíggjarnevndin	27.05.2026	134/26	26/00100-1
11 Býráðsfundur	04.06.2026	198/26	26/00100-1
12 Fíggjarnevndin	10.06.2026	154/26	26/00100-1
13 Fíggjarnevndin	18.06.2026	163/26	26/00100-1
14 Býráðsfundur	18.06.2026	238/26	26/00100-1
15 Fíggjarnevndin	09.09.2026	190/26	26/00100-1
16 Býráðsfundur	17.09.2026	265/26	26/00100-1
17 Fíggjarnevndin	07.10.2026	205/26	26/00100-1
18 Býráðsfundur	22.10.2026	289/26	26/00100-1
19 Fíggjarnevndin	11.11.2026	232/26	26/00100-1
2 Býráðsfundur	26.02.2026	67/26	26/00100-1
20 Býráðsfundur	19.11.2026	318/26	26/00100-1
3 Fíggjarnevndin	17.03.2026	73/26	26/00100-1
4 Býráðsfundur	19.03.2026	96/26	26/00100-1
5 Fíggjarnevndin	22.04.2026	99/26	26/00100-1
6 Fíggjarnevndin	29.04.2026	107/26	26/00100-1
7 Býráðsfundur	30.04.2026	136/26	26/00100-1
8 Býráðsfundur	05.05.2026	169/26	26/00100-1
9 Fíggjarnevndin	13.05.2026	128/26	26/00100-1

Upprunin til málið
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Lýsing av málinum

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Ískoyti:
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 18. februar 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 26. februar 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 17. mars 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 19. mars 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri mars verður lagt frá á fundinum.

Fíggjarnevndin 22. apríl 2026: Útsett.

Fíggjarnevndin 29. apríl 2026: Framlagt.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

Býráðsfundur 30. apríl 2026: Útsett.

Býráðsfundur 05. mai 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 13. mai 2026: Útsett.

Fíggjarnevndin 27. mai 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 04. juni 2026: Framlagt og góðkent.

Fíggjarnevndin 10. juni 2026: Útsett.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 18. juni 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 18. juni 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 09. september 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 17. september 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri august verður fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 07. oktober 2026: Framlagt.

Býráðsfundur 22. oktober 2026: Framlagt og góðkent.

Ískoyti:
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

Fíggjarnevndin 11. november 2026: Framlagt.

319/26 Nýggj skatepark í Gundadali - 23/05071

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Býráðsfundur	19.11.2026	319/26	25/00154-2

Upprunin til málið

Lýsing av málinum
Í hesum tíðum verður víst á týdningin av at hava møguleika at røra seg fysiskt. Nógvar skipaðar ítróttargreinar eru í Tórshavnar kommunu, men tá tað snýr seg um rørslu, tá er tað av týdningi, at kommunan somuleiðis veitir karmar til tey heldur óskipaðu fysisku virksemini.

Skate og parkour eru tvær heldur minni og í dag óskipaðar ítróttargreinar. Hesar ítróttargreinar tykjast ofta tiltalandi fyri børn og ung, sum ikki eru til bóltspæl, kappróður ella svimjing, men heldur vilja íðka ítrótt, sum er minni skipað og meiri tilvildarlig. Upprunaliga var ein rampa millum Svimjihøllina og HB- og B36 húsið. Henda rampa varð tikin niður fyri nógvum árum síðani. Síðani varð ein rampa bygd heilt sjálvboðið av ágrýtnum ungum úti á Frælsinum.

Nógv ung standa við einum stórum tómrúmi, nú rampan á Frælsinum fyri fleiri árum síðani bleiv tikin burtur.
Tískil er av týdningi at seta ferð á arbeiðið at skapa eina nýggja “skatepark” í kommununi.

Staðseting:
Í longri tíð hevur verið arbeitt við at skipa torgið í Gundadali, framman fyri FSF og niðara vøll. Fleiri tankar hava verið uppi og vent, m.a. var ein føst skoytibreyt uppi at venda, fyrst í 2020’unum. Men mett var, at frægast var at hava eina tílíka breyt niðri í býnum, og samstundis er eftirspurningurin og áhugin fánaður.
Skate-virksemið hóskar seg væl í Gundadali, sum er okkara miðdepil fyri ítrótt, og tískil verður mett ráðiligt at staðseta skate og parkour í økinum framman fyri FSF og niðara vøll.

Skatefelagið, sum fleiri ferð hevur vent sær til kommununa um at fáa sett gongd á eina veruliga skatepark, vísir í teirra umsókn á, at kommunan eigur at fáa sær holla ráðgeving til hetta arbeiði. Skatefelagið ynskir at luttaka í tilgongdini, umframt at tey vísa á ráðgevingar- og menningartoymið við Tony Hawk á odda, sum hevur játtað at hjálpa í tilgongdini.

Mett verður at sjálv skateparkin við øllum neyðugum fasilitetum kostar 3 - 3,5 mió kr. Skateparkin, sum verður í millum 500-800 m^2, er bert ein partur av yvirskipaðu ætlanini á økinum, sum er uml. 5000m^2. Yvirskipaða ætlanini umfatar eisini t.d. uppihaldsøkir, trappur, handicap-rampur, paviliongir, ljósmastrar, býarrúmsinventar og møguligt spæliplássútbúnaður, blómubed og planting og ymiskt annað.
Viðheft í málinum er eitt skipanaruppskot frá 2024 (sum bleiv tillagað á sumri 2026). Sigast skal, at skipanaruppskotið varð gjørt við støði í, at ein skoytibreyt bleiv gjørd í økinum, og tískil er ein partur av økinum flatur. Um hesin parturin verður gjørdur til skate øki, skal hetta sjálvsagt broytast til nýggja tørvin. Men funktiónsuppdeilingin, og markamótini, í millum trygdarøkið hjá FSF, og tað sum er ætlað sum alment kommunalt øki, til torg o.a., sæst í hesum tilfarinum, og er enn galdandi.

Ein breyt til skatevirksemi er eisini tengd at málinum um torgverkaætlanina mál 21/03047 & 25/02295 (torg í Gundadali), og 26/03294 (Torg í Gundadali – Oyggjaleikir 2027).
Sostatt er skipanaruppskot er gjørt yvir økið. Her eru

Møguligur stuðul
FSF er áhugað í at økið verður gjørt soleiðis, at áhugamálini hjá FSF verða gingin á møti. Harvið kann FSF bera ein part av kostnaðinum.
Eisini er ein møguleiki at søkja um stuðul frá útlendskum grunnum til partar av torgverkætlanini í Gundadali.

Býráðið samtykti 12. desember 2024 fylgjandi:
- At skatevirksemið verður staðsett á torgið framman fyri FSF og niðara vøll.
- At farið verður undir at kanna møguleikarnar í økinum og saman við fakligu ráðgevunum innan skatevirksemið at menna eina ætlan fyri virksemið.
- At komið verður aftur í nevnd, tá kostnaðurin fyri verkætlanina er kendur.
- At játtaðar verða kr. 1.300.000 av kt. 6275, LK62996, Miðbýarætlan til kt. 6275, L62055, Torg frammanfyri FSF.
- At málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini
Kr. 1.300.000 blivu játtaðar til kt. 6275, L62055, Torg frammanfyri FSF. Upphæddin stendur tøk enn.

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:

Ískoyti:
Kommunulistin biður um, at málið um nýggja skatepark í Gundadali verður sett til ummælis á komandi býráðsfundi.
Vit ynskja tí eina dagføring av málinum, serliga viðvíkjandi:

* hvussu nógv av játtanini er brúkt ella bundið
* um ætlanin er at fáa skateparkina lidna í hesi býráðssetuni

320/26 Eldradepil í Kollafirði

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Heilsu- og eldranevndin	05.06.2025	16/25	25/06061-1
2 Heilsu- og eldranevndin	04.09.2025	18/25	25/06061-1
3 Fíggjarnevndin	10.09.2025	134/25	25/06061-1
4 Býráðsfundur	18.09.2025	187/25	25/06061-1
5 Kollafjarðarnevndin	24.09.2025	14/25	25/06061-1
6 Býráðsfundur	18.06.2026	239/26	25/06061-1
7 Býráðsfundur	17.09.2026	268/26	25/06061-1
8 Kollafjarðarnevndin	27.10.2026	22/26	25/06061-1
9 Býráðsfundur	19.11.2026	320/26	25/06061-1

Upprunin til málið

Lýsing av málinum

Lógir, ásetingar o.a.

Upplýsingar frá umsitingini

Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

Skjøl

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

	Fyri Tórshavnar kommunu	Fyri ávís økir í kommununi	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar				
Umhvørvisavleiðingar				
Møgulig frávik/lættar frá ásetingum				
Sosialar avleiðingar				
Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar				

Fíggjarligar avleiðingar: ☐ Ja ☐ Nei

Tilmæli:
Tekstur og tilmæli kemur áðrenn fundin.

Heilsu- og eldranevndin 05. juni 2025: Tikið av skrá.

Ískoyti:
Í september 2017 samtykti býráðið eina útbyggingarætlan fyri eldraøkið í Tórshavnar kommunu. Síðsta tilmælið í útbýggingarætlanini var at gera ein eldradepil í Kollafirði. Hini tilmælini í útbygginargarætlanini eru gjørd ella eru í gerð. Urd og Demensdepilin vóru liðug og lótu upp á sumri í 2021, og nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 røktaríbúðum er í gerð á Stórubrekku í Hoyvík.

Síðan útbyggingarætlanin bleiv samtykt hevur Heilsu- og umsorganartænastan miðvíst arbeitt við ymsum átøkum, sum stuðla undir, at fólk á eldraøkinum klára seg betur sjálvi og hetta sæst aftur í bíðilistunum. Serliga sæst broyting í bíðilistunum, eftir at Urd og demensdepilin lótu upp á sumri í 2021. Hóast fólkatalið er javnt vaksandi, hevur biðilistin til búpláss verið rættiliga stabilur í nøkur ár. Nú er bíðilistin spakuliga byrjaður at vaksa aftur, tó ikki til sama stig, sum áðrenn 2021.

Væntandi kemur bíðilistin til búpláss aftur á stigið frá 2022, tá nýggja røktarheimið á Stórubrekku letur upp.

Síðsta tilmæli í útbyggingarætlanini er at gera eldradepil í Kollafirði.

Í virkisætlanini stendur soleiðis í tilmælinum um eldradepil í Kollafirði:

5. Eldradepil í Kollafirði 2024-2025
Mælt verður til:
- At bygdur verður eldradepil við umleið 24-30 plássum. Blandað røktarbúpláss, stutttíðarpláss og røktaríbúðir saman við dagtilhaldi og venjingarumstøðum. Við atliti at tørvinum á størri røktarbygging í høvuðsstaðarøkinum, verður mett, at eldradepilin í Kollafirði verður raðfestur at taka í nýtslu um 7-8 ár.
- At heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at ávísa hóskandi grundøki til at byggja á.

Verðandi umstøður á Sambýlinum í Kollafirði eru als ikki nøktandi. Kømrini eru smá og hava ikki egi wc. Arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum eru ikki nøktandi, og umstøðurnar eru soleiðis, at ikki ber til at hava fólk við stórum røktartørvi ella demenssjúku búgvandi á sambýlinum. Hetta ger, at tað til tíðir eru tøk pláss, tí tey sum hava tørv á plássunum ikki rúmast á sambýlinum, men mugu flyta til Havnar í hóskandi umstøður á heimum, sum eru gjørd til tørvin.

Ár	2000	2005	2010	2015	2020	2025
Fólkatal í alt	1.188	3.278	3.249	3.196	3.293	3.304
Fólkatal 67+	99	110	138	169	179	197
Fólkatal 80+	27	32	38	53	47	59
- Kollafjørður						
- Oyrareingir						
- Signabøur						
- Kaldbak						
- Kaldbaksbotnur						
- Mjørkadalur						
- Sund						
- Norðradalur						
- Syðradalur, Streymoy						

Talvan omanfyri vísir samlaðu gongdina í fólkatalinum í nevndu bygdum frá 2000 til 2025. Runt roknað kann man siga, at talið av fólki ávíkavist 67+ og 80+ er dupult so stórt í 2025, sum tað var í 2000.

Til ber ikki at fáa framroknaði tøl frá hagstovunum um nevndu økir. Tó vita vit, at talið av eldri borgarum fer at vaksa fleiri ár afturat.

Í løtuni (juli 2025) búgva 10 borgarar á røktarheimi í Tórshavn, sum áðrenn tey fluttu inn, høvdu bústað í Kollafirði. Tað búgva í løtuni 6 fólk á sambýlinum í Kollafirði. Tað vil siga í løtuni búgva 16 fólk úr Kollafirði á búplássum í kommununi.

Við hesum í huga og at talið av eldri fer at vaksa í framtíðini er tað hóskandi, at ein eldradepil í Kollafirðið rúmar eini 24 búfólkum við blandaðum tørvi. Tað verið seg tørvur á lættari røkt (sambýli) tyngri røkt (røktarheim) og demenssjúkum (demensdeild). Eisini er hugsa, at umlætting kann rúmast á teimum 26 plássunum. Umráðandi er, at eldradepilin í Kollafirðið kann vera fleksibul við atliti at tørvinum hjá borgarunum.

Ein loysn kann vera at skipa eldradepilin við tveimum deildum við 11 búfólkum og tveimum atknýttum í røktaríbúðum pr. deild. Soleiðis, at samlaða talið verður 26 pláss til tann blandaða tørvin. Hetta eigur tó at vera lýst nærri í einari neyvari tørvslýsing, so atlit eisini verður tikið til framtíðar rakstur av eldradeplinum.

Frontaldemens deild á eldradeplinum í Kollafirði.
Í Tórshavnar kommunu er stórur tøvur á at skipa frontaldemesøkið. Arbeiðið við at menna fakligt tilboð til fólk við frontaldemens er í gongd, men tað er trupult at veita hetta tilboð á vanligum demensdeildum, tí tørvurin á hjálp, røkt, vegleiðing osv. hjá fólki við frontaldemens er ikki tann sami, sum tørvurin hjá fólki við øðrum demenssjúkum. At fólk við frontaldemenssjúku búgva millum við øðrum demenssjúkum skapar stórar avbjóðingar á deildunum. At hesi búgva á somu deildum er ikki nøktandi tilboð fyri hvørgan partin. Tað er sera trupult hjá starvsfólkunum at tryggja eina góða røkt til allar borgarar, tá fólk við frontaldemens og fólk við øðrum demenssjúkum er saman á røktarheimum.

Tørvur er á at skipa eitt samlað frontaldemenstilboð í Tórshavnar kommunu, bæði viðvíkjandi hølisviðurskiftum og fakligaheit. Hetta kundi møguliga verið gjørt í samstarvi við aðrar kommunur.

Frontaldemens er sergrein innan demensøkið, og tí er umráðandi, at servitanin verður savnað á einum stað fyri at tryggja borgaranum allar bestu røktina í sínari demenssjúku.

Í dag hava vit ikki umstøður at skipa eitt samlasamlað tilboð til borgarar við frontaldemens á einum stað.

Ein møguleiki kundi verið at skipa eina frontaldemensdeild í samband við byggingina av eldradeplinum í Kollafirði.

Ein frontaldemensdeild eigur at hava gott pláss soleiðis, at møguleiki er at skerma hvønn einkultan borgara, bæði fyri at verja viðkomandi og fyri at verja hini, sum eru á deildini. Eisini skal vera møguleiki hjá borgaranum at fara útum,uttan at vera til vanda fyri seg sjálvan ella onnur. Tvs. at ein góður garður eigur at vera uttanum.

Frontaldemensdeildin eigur at hava pláss fyri 6 borgarum. Um man ynskir at kunna bjóða tænastuna til aðarar kommunur í Føroyum, so kundi talan verið um 8 pláss. Ábendinagar eru um, at áhugi er fyri hesum uttanfyri Tórshavnar kommunu. Hetta skal tó kannast nærri og skipast í fasta legu. Tó ber til eftir lógini um heimatænasu, eldrarøkt v.m at bjóða tænastur út til onnur samstørv.

Samlað svarar tað til ein eldradepil, sum hevur búpláss til 32 fólk. (34 fólk) Umlætting og búpláss verður skipað eftir galdandi tørvinum til eina og hvørja tíð.

Umframt blandað pláss fyri 32 fólkum, (34), skal eldradepilin hava rúm fyri dagtilhaldi til 30 fólk og venjingarhølir til bæði heimabúgvandi og búfólk. Felagskøkur má vera í húsinum, sum ger mat til búfólk og fólk á dagtilhaldinum. Eisini eiga hølir at vera gjørd til heimatænastuna evt. sum sjúkrarøktarfrøðingaklinikk. Umframt hetta so mugu vera øll vanlig arbeiðsrúm, skrivstovur, samrøðurúm og fundarhøli. Kølirúm eigur at vera í húsinum. Hugsast má um uttanum øki har tað skulu vera góðir møguleika at fara útum, og tað er serliga umráðandi, at uttanum øki á frontaldemseindini er skipað soleiðis, at borgarin fær góðan møguleika at røra seg.

Hóast bíðilistarnir til búpláss ikki eru á sama stigi, sum tá virksemisætlanin bleiv samtykt, so er ongin ivi um, at Sambýlið í Kollafirðið ikki longur er tíðarhóskandi og kann ikki halda fram at vera sambýli. Um ein

frontaldemenseind kann rúmast í projektinum, verður hetta eitt nýbrot innan eldraøkið og ein stórur bati fyri tænastuna og tilboðini á eldraøkinum í Tórshavnar kommunu

Tilmæli:
Heilsu- og umsorgarnarstjórin og leiðarin á heilsu- og umsorganardeildini mæla til, at valda staðseting verður endaliga fingin uppá pláss. Haraftrat at seta bygginevnd til eldradepilin í Kollafirði, at heimila fyrisitingini at fara undir at gera byggiskrá, og til tað endamálið at játta kr. 1 mio av L27013 Eldradepil í Kollafirði til LK 27013 Eldradepil í Kollafirði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina

Heilsu- og eldranevndin 04. september 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 10. september 2025: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Býráðsfundur 18. september 2025: Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

Somuleiðis einmælt samtykt at velja hesi í bygginevndina fyri verkætlanina: Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen.

Kollafjarðarnevndin 24. september 2025: Kunnað varð um málið.

Ískoyti:
Bergur Robert Dam Jensen biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Býráðsfundur 18. juni 2026: Tikið av skrá.

Býráðsfundur 17. september 2026: Bergur Robert Dam Jensen bað um at fáa uppskot til atkvøðugreiðslu um at broyta staðsetingina av eldradeplinum frá Todnesi til Norðreki skal til atkvøðugreiðslu.

Uppskotið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og fýra ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmse, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe og Guttormur í Skála.

Síðan varð atkvøtt um uppskot frá Bergi Robert Dam Jensen um at eldradepilin verður fluttur av Todnesi til Norðreki, og at umsitingin kemur við eini heildarætaln fyri Norðreki, har nýggj kirkja, eldradepil og evt eldrabústaðir verða staðsettir, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

Kollafjarðarnevndin 27. oktober 2026: Heilsu- og umsorganarstjórin kunnaði um málið.

Ískoyti:
Heidi Lava Elgeirsdóttir biður um (eftir svarið frá Kommunala eftirlitinum), at fáa mál um gegni í samtyktum máli nr 268/26 fyri Býráðið, soljóðandi:

Vísandi til svar frá hjá Kommunala eftirlitinum í samband við kæru um ógegni og manglandi málsviðgerð, skal støða takast til, um at reisa málið í býráðnum.

Heidi Lava Elgeirsdóttir hevur svarað Kommunala eftirlitið, at gegnisspurningurin verður reistur fyri at fáa eina niðurstøðu.

Heidi Lava Elgeirsdóttir biðir um at fáa málið til viðgerðar og støðutakan á býráðfundi, so at Kommunala eftirlitið kann viðgera málið og gera eina niðurstøðu í kæruni.